14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	500	500	510
Inntøkur	**0**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*0*	-	-	-	-	-

23. Fyrisiting Løgtingsins

Nettoútreiðsla	5.706	6.240	6.252	6.598	8.052	8.198
Útreiðslur	**5.711**	**6.236**	**6.252**	**6.598**	**8.052**	**8.198**
11. Lønir v.m.	3.974	4.272	4.439	4.584	4.974	5.059
14. Keyp av vørum og tænastum	1.352	1.416	1.629	2.000	2.263	2.308
15. Keyp av útbúnaði, netto	111	509	116	14	800	816
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	256	29	53	-	15	15
17. Avskrivingar o.a.	11	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	7	11	14	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	-	-	1	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	0	-	-	-
Inntøkur	**5**	**-4**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*5*	*1*	-	-	-	-
61. Skattur og avgjøld	-	*-5*	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 21 Stuðul til parlamentariska arbeiðið

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	4,0	4,0	5,0	5,0	5,0	5,0
Fulltíðarstørv	4,0	4,0	5,0	5,0	5,0	5,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,0	1,1	1,1	1,2	1,2	1,2

Starvsfólkayvirlit: 23 Fyrisiting Løgtingsins

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	2,0	1,8	2,0	2,0	2,0	2,0
Onnur	8,5	9,0	9,0	9,0	10,5	10,5
Fulltíðarstørv	10,5	10,8	11,0	11,0	12,5	12,5
Lønarpartur (mió. kr.)	4,0	4,3	4,4	4,6	5,0	5,1

1.10.1.10. Nýggjur bygningur til Føroya Løgtings (Løgujáttan)

3. byggistig, sum fatar um umbygging og innrætting av kjallara, 1. og 2. hædd, verður væntandi liðugt um ársskifti 2006/7. 3. byggistig er mett at kosta 30 mió. kr. Mælt verður til at seta av 2 mió. kr. í 2007 til uttanumøkið og møguliga annað sum restar í.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	11.567	814	6.441	20.000	2.000	-
10. Nýggjur bygningur til Føroya Løgtings						
Útreiðslur	**11.567**	**814**	**6.441**	**20.000**	**2.000**	**-**
11. Lønir v.m.	-	36	128	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	1	-	9	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-36	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	11.565	814	6.304	20.000	2.000	-

1.10.2. Stovnar knýttir at løgtinginum

1.10.2.01. Landsgrannskoðanin (Rakstrarjáttan)

Reglur fyri grannskoðan av landsroknskapinum v.m. eru ásettar í løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999. Játtanin til Landsgrannskoðanina er sundurgreinað á undirkontu 20. Herumframt er samsýning/fundarpeningur til løgtingsgrannskoðararnar tikin við á undirkontu 21.

Landsgrannskoðanin hevur til endamáls at grannskoða landsroknskapin, sum fevnir um inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini umframt ogn og skuld landskassans. Sambært § 8, stk. 2, skal Landsgrannskoðanin kanna, um tey í § 4, stk. 2 og 3, nevndu krøv til roknskapin eru hildin, og harumframt skal grannskoðanin regluliga kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar. Umframt grannskoðan av, um roknskapurin er uppsettur í samsvari við galdandi bókhalds- og roknskaparreglur, og um stovnurin hevur hildið galdandi játtanarreglur og aðrar lógir og reglur á økinum, skal grannskoðanin eisini fevna um "vanliga fyrisitingargrannskoðan". Landsgrannskoðanin er í ávísan mun við í

arbeiði, ella ummælir reglur og ásetingar viðvíkjandi eftirlits-, grannskoðanar-, játtanar- og roknskaparviðurskiftum. Harumframt fyrireikar og avgreiðir Landgrannskoðanin mál vegna løgtingsgrannskoðararnar.

Orsøkin til, at standardkonta 14 hækkar umleið 300 tkr. er, at Landsgrannskoðanin ætlar at luttaka í samstarvinum millum stovnar undir Fíggjarmálaráðnum um felags net-, mail, back-up og servaraumsiting. Talan er eisini um eykaútreiðslur í sambandi við seminarið um fíggjargrannskoðan fyri norðurlendskar ríkisgrannskoðarar, sum Landsgrannskoðarin skal skipa fyri.

Løgtingsgrannskoðararnir eru 4 løgtingsmenn, sum Løgtingið hevur valt sambært § 1 í lógini. Sambært § 4 er álagt løgtingsgrannskoðarunum at fara ígjøgnum landsroknskapin og aðrar roknskapir hjá landsstovnum o.l., og sambært § 19 skulu løgtingsgrannskoðararnir leggja uppskot til samtyktar fyri tingið um góðkenning av roknskapunum saman við viðmerkingum sínum. Í § 3 eru ásetingar um samsýning/ fundarpening.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.		2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan		4.485	4.543	4.717	5.072	5.630	5.730
Útreiðslur		4.485	4.543	4.717	5.072	5.630	5.730
20.	**Vanligt virksemi**						
	Nettoútreiðsla	4.427	4.460	4.673	4.952	5.510	5.608
	Útreiðslur	**4.427**	**4.460**	**4.673**	**4.952**	**5.510**	**5.608**
	11. Lønir v.m.	3.198	3.482	3.657	3.935	4.193	4.264
	14. Keyp av vørum og tænastum	1.025	537	542	542	851	868
	15. Keyp av útbúnaði, netto	13	229	128	143	136	139
	16. Leiga, viðlíkahald og skattur	190	207	343	330	328	335
	19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	5	2	2	2	2
	71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-
21.	**Løgtingsgrannskoðararnir**						
	Nettoútreiðsla	58	83	44	120	120	122
	Útreiðslur	**58**	**83**	**44**	**120**	**120**	**122**
	11. Lønir v.m.	58	57	44	120	120	122
	14. Keyp av vørum og tænastum	-	27	-	-	-	-
	71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	8,0	8,4	9,1	9,1	8,7	8,7
Fulltíðarstørv	9,0	9,4	10,1	10,1	9,7	9,7
Lønarpartur (mió. kr.)	3,2	3,5	3,7	3,9	4,2	4,3

1.10.2.07. Løgtingsins umboðsmaður (Rakstrarjáttan)

Løgtingsins umboðsmaður virkar sambært løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann. Sambært § 5 í lógini skal umboðsmaðurin hava eftirlit við, at almenna fyrisitingin ikki ger mistøk ella vanrøkir skyldur sínar, og at hendan ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum. Hetta eftirlit verður serliga framt í sambandi við viðgerð av klagum frá borgarum, men umboðsmaðurin kann eisini taka upp mál av sínum eintingum. Talið av klagum er støðugt vaksandi. Í 2001 var talið 39, men í 2002 vóru 82 klagur. Umframt umboðsmannin er embætið mannað við tveimum løgfrøðiligum ráðgevum og einum skrivstovufulltrúa.

Viðvíkjandi hækkingini í lønarpartinum skal nevnast, at væntast kann, at í ávísum klagum um Fiskimálaráðið, kann umboðsmaðurin vera ógegnigur. Í hesum málum verður tørvur á, at ein settur umboðsmaður skal útnevnast og lønast til at viðgera hesi mál.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.749	2.386	2.648	3.000	3.200	3.257
Útreiðslur	1.749	2.390	2.648	3.000	3.200	3.257
Inntøkur	-	4	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	1.749	2.386	2.648	3.000	3.200	3.257
Útreiðslur	**1.749**	**2.390**	**2.648**	**3.000**	**3.200**	**3.257**
11. Lønir v.m.	1.368	1.597	2.011	2.220	2.300	2.339
14. Keyp av vørum og tænastum	316	411	425	550	630	643
15. Keyp av útbúnaði, netto	8	217	52	50	70	71
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	56	165	160	180	200	204
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	0	-	-	-
Inntøkur	**-**	**4**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	-	*4*	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007** **F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	1,0	2,0	2,0	2,0
Onnur	2,2	2,4	3,5	2,5	2,5	2,5
Fulltíðarstørv	3,2	3,4	4,5	4,5	4,5	4,5
Lønarpartur (mió. kr.)	1,4	1,6	2,0	2,2	2,3	2,3

§ 2 Løgmansfyrisitingin

Felagsútreiðslur

2.11.1. Fyrisiting

2.11.1.02. Løgmansskrivstovan (Rakstrarjáttan)

Løgmansskrivstovan røkir tær uppgávur, sum løgmanni eru tillutaðar samsvarandi stýrisskipanini, og uppgávur, sum hoyra til embætið sambært málsbýti landsstýrisins.

Høvuðsuppgávurnar hjá Løgmansskrivstovuni eru:

- at ráðgeva løgmanni, hvørs málsøki eru forsætismál og uttanríkismál
- at umsita tey málsøki, sum eru løgd til løgmann
- samskipandi virksemi millum stjórnarráðini
- at loysa tvørvegis arbeiðsuppávur og standa fyri tvørvegis verkætlanum, sum ikki natúrliga hoyra til ávíst stjórnarráð

Virkisøkið kann greinast soleiðis:

- stýrisskipanarviðurskifti, ríkislógir og slíkt, sum ikki hoyrir til annað stjórnarráð
- samskipa virksemi hjá landsstýrinum og millum stjórnarráðini
- uttanríkismál, so sum millumlandaviðurskifti, ríkisfelagsskapurin, norðurlandamál, millumlandasamráðingar og millumlandafelagsskapir
- umboðanarmál, sum fata um vitjanir hjá útlendskum stjórnarumboðum, at vitja útlendsk stjórnarumboð, móttøkur og annað
- menningartiltøk sum t.d. nýskipan í almenna bygnaðinum, norðurlendskt tænastumannaumbýti og kunningarpolitikkur
- samskipa einskiljingarætlan landsstýrisins
- standa fyri og samskipa Visjón 2015
- standa fyri og samskipa arbeiði, ið stuðla undir at alheimsgera Føroyar í breiðum týdningi
- standa fyri og samskipa menningarsamstarv við menningarlond

Løgmansskrivstovan er skipað við trimum linjudeildum: Uttanríkisdeildini, Stjórnardeildini og Menningardeildini, og einari tænastueind: Ritaraeindini.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at virka fyri eini størri luttøku í altjóðagerðini og arbeitt verður við fleiri verkætlanum. Hetta virksemi heldur fram í 2007 og økini sum eru uppraðfest eru ES, EFTA, Visjón 2015 og verkætlanir ið stuðla undir at alheimsgera Føroyar í breiðum týdningi. Harumframt samskipar Løgmansskrivstovan verkætlanir, ið miðvíst betra almennu fyrisitingina.

Undirkonta 25. Landsstýrið hevur sett sær fyri at virka fyri eini størri luttøku í altjóðagerðini og arbeitt verður við fleiri verkætlanum. Í fjør varð peningur játtaður til hetta endamál á undirkontu 25, men av tí at hetta virksemi er ein samrunnin partur av virkseminum í Løgmansskrivstovuni, er henda játtan nú flutt inn undir undirkontu 20. Vanligt virksemi.

Undirkonta 26. Landsstýrið arbeiður framhaldandi við at fyrireika einskiljingarnar av fyritøkum landsins. Ávísar fyrireikingar verða gjørdar av fyrisiting landsstýrisins, meðan aðrar skulu gerast av serkønum ráðgevarum. Ætlanin er framvegis, at landsstýrismaður, samstundis sum hann leggur mál fyri Løgtingið um einskiljing av fyritøku, leggur uppskot um eykajáttan til kostnað av serkønari fíggjarligari og løgfrøðiligari ráðgeving. Neyðugt er tó í ávísum føri at keypa ráðgevatænastur til tað lógarfyrireikandi arbeiðið, og tí er neyðugt við játtan til endamálið. Í fjør varð peningur játtaður til hetta endamál á undirkontu 26, men av tí at hetta virksemi er ein samrunnin partur av virkseminum í Løgmansskrivstovuni, er henda játtan nú flutt inn undir undirkontu 20. Vanligt virksemi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	11.670	11.914	12.947	13.273	13.493	13.750
Útreiðslur	12.209	12.623	13.820	13.823	14.043	14.300
Inntøkur	539	708	872	550	550	550
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	11.318	12.015	12.861	11.823	13.543	13.792
Útreiðslur	**11.360**	**12.180**	**13.293**	**11.923**	**13.643**	**13.892**
11. Lønir v.m.	7.309	8.117	8.421	9.000	9.361	9.524
14. Keyp av vørum og tænastum	3.284	3.602	4.571	2.693	4.047	4.128
15. Keyp av útbúnaði, netto	617	322	222	150	153	156
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	32	102	39	50	51	52
17. Avskrivingar o.a.	-	4	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	31	33	17	30	31	32
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	88	-	23	-	-	-
Inntøkur	**43**	**166**	**432**	**100**	**100**	**100**
21. Søla av vøru og tænastum	*43*	*166*	*432*	*100*	*100*	*100*
23. Nevndir						
Nettoútreiðsla	-	-	101	-	-	-
Útreiðslur	**-**	**-**	**101**	**-**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	-	-	101	-	-	-
24. Hernaðarkanning						
Nettoútreiðsla	501	-	-	-	-	-
Útreiðslur	**501**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	501	-	-	-	-	-
25. Altjóðagerð						
Nettoútreiðsla	-	-	-	500	-	-
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**500**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	-	-	-	200	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	300	-	-

26. Einskiljing						
Nettoútreiðsla	-	-	-	1.000	-	-
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**1.000**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	1.000	-	-
40. Inntøkufíggjað virksemi						
Nettoútreiðsla	-149	-100	-14	-50	-50	-42
Útreiðslur	**348**	**442**	**426**	**400**	**400**	**408**
11. Lønir v.m.	100	103	72	100	100	102
14. Keyp av vørum og tænastum	248	339	353	300	300	306
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-
Inntøkur	**497**	**543**	**440**	**450**	**450**	**450**
21. Søla av vøru og tænastum	*497*	*543*	*440*	*450*	*450*	*450*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	3,0	6,0	7,0	8,0	6,0	6,0
Onnur	19,0	14,2	11,8	11,2	13,2	13,2
Fulltíðarstørv	22,0	20,2	18,8	19,2	19,2	19,2
Lønarpartur (mió. kr.)	7,3	8,1	8,4	9,0	9,4	9,5

2.11.1.12. Viðlíkahald (Rakstrarjáttan)

Endamálið við hesi rakstrarjáttan er at røkja landsins ognir í Tinganesi og á Reyni.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	347	495	675	500	500	510
Útreiðslur	347	495	675	500	500	510
20. Viðlíkahald						
Nettoútreiðsla	347	495	675	500	500	510
Útreiðslur	**347**	**495**	**675**	**500**	**500**	**510**
14. Keyp av vørum og tænastum	1	9	38	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	38	33	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	346	448	584	500	500	510
31. Bygging og løguframleiðsla	-	-	19	-	-	-

2.11.1.21. Umbygging í Tinganesi (Løgujáttan)

Játtanin fer til at umbyggja og umvæla Stokkastovuna og Bakkapakkhúsið umframt aðrar ognir í Tinganesi.

Høvuðskontan er felags fyri øll ráðini, ið húsast í Tinganesi. Í 2004 vórðu játtanir svarandi til 1 mió. kr. í hesum sambandi fluttar frá § 6 og § 15 til hesa høvuðskontu. Ræðisrætturin á játtanini varð í 2004 fluttur til Landsverk, sum saman við Løgmansskrivstovuni, Innlendismálaráðnum og Vinnumálaráðnum hevur gjørt heildarætlan fyri árini 2004-2007 viðvíkjandi umbygging í Tinganesi o.ø. Ætlanin er í 2007 at raðfesta verkætlanina at innrætta Stokkastovuna og Bakkapakkhúsið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	2.148	2.517	2.514	3.000	2.300	2.000
10. Umbygging						
Útreiðslur	**2.148**	**2.517**	**2.514**	**3.000**	**2.300**	**2.000**
11. Lønir v.m.	79	53	37	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	32	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-79	-53	-37	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	2.116	2.517	2.514	3.000	2.300	2.000

2.11.1.40. Stjórnarskipanarnevnd (Rakstrarjáttan)

Arbeiðið hjá nevndini er skipað við løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2003 um Stjórnarskipanarnevnd, sum broytt við løgtingslóg nr. 72 frá 23. mai 2005. Sambært hesum skal nevndin gera uppskot til grundleggjandi stjórnarlóg fyri Føroyar, og verður hetta arbeiðið liðugt 31. desember 2006. Tískil er eingin játtan til Stjórnarskipanarnevndina í 2007. Tó verður roknað við, at ávíst kunningararbeiðið o.a. fer at verða framt í 2007 og verður hetta fíggjað av rakstrinum í Løgmansskrivstovuni.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.312	491	782	1.350	-	-
Útreiðslur	1.312	491	782	1.350	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	1.312	491	782	1.350	-	-
Útreiðslur	**1.312**	**491**	**782**	**1.350**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	454	266	470	900	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	809	225	245	450	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	22	-	67	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	27	-	-	-	-	-

Landsstýrið

2.12.3. Landsstýrið

2.12.3.01. Løgmaður og landsstýrið (Rakstrarjáttan)

Játtanin er til at gjalda løgmanni og landsstýrismonnum løn, borðfæ og vistarhald o.a. sambært lóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	5.601	6.138	4.598	4.700	4.790	4.874
Útreiðslur	5.601	6.138	4.598	4.700	4.790	4.874
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	5.601	6.138	4.598	4.700	4.790	4.874
Útreiðslur	**5.601**	**6.138**	**4.598**	**4.700**	**4.790**	**4.874**
11. Lønir v.m.	4.648	5.416	3.857	3.930	4.005	4.073
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	952	721	742	770	785	801
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	9,0	7,0	7,0	7,0	7,0	7,0
Onnur	-	-	-	-	-	-
Fulltíðarstørv	9,0	7,0	7,0	7,0	7,0	7,0
Lønarpartur (mió. kr.)	4,6	5,4	3,9	3,9	4,0	4,1

Uttanríkismál

2.13.1. Sendistovur

2.13.1.01. Sendistovur (Rakstrarjáttan)

Sendistovurnar eru umboðsstovur landsstýrisins í øðrum londum og virka eftir Fyriskipan um Uttanríkistænastu Føroya frá 21. februar 2006.

Føroyar hava 3 sendistovur:

- sendistovan í Keypmannahavn
- sendistovan í Evropasamveldinum, ið samstarvar við donsku sendistovurnar í Evropasamveldinum og Brússel
- sendistovan í London, ið samstarvar við donsku sendistovuna í London

Setningur sendistovunnar er í høvuðsheitum:

- at veita landsstýrinum upplýsingar og leiðbeining um viðurskifti í øðrum londum
- at menna føroyskan útflutning og at ráðgeva í vinnuligum spurningum
- at vera føroyskum myndugleikum, virkjum o.ø. til hjálpar í viðurskiftum úteftir
- eftir tørvi og førimuni at veita útlendingum upplýsingar um Føroyar

Virksemið hjá Sendistovu Føroya í Evropasamveldinum
Frá 1. september 2006 er ein sendifulltrúi komin afturat sendimanninum í sendistovu Føroya í Evropasamveldinum. Kostnaðurin av hesum er 1,55 mió. kr. um árið. Harumframt hevur sendistovan havt 1 skrivara í fulla tíð frá 1. februar 2006.

Formliga tilknýti Føroya til ES er í dag skipað við tveimum sáttmálum - fiskiveiðisáttmálanum frá 1977 og handilssáttmálanum frá 1991. Av tí at ein so týðandi partur av føroyska útflutninginum fer á ES/EBS-marknaðin er rættiliga nógv virksemi hjá sendistovuni tengt at handilssáttmálanum, til dømis uppgávur í samband við økta marknaðaratgongd, tollspurningar, heilsufrøðilig viðurskifti, tøkniligir handilsspurningar v.m.

Nú landsstýrið hevur sett EFTA limaskap ovast á breddan arbeiðir sendistova Føroya í Evropasamveldinum í tættum samstarvið við Løgmansskrivstovuna um at fyrireika hetta mál.

Annars eru týðandi uppgávur at fylgja við í tí, ið fer fram í ES-ráðnum, ES-tinginum og ES-nevndini, og sum er viðkomandi fyri Føroyar, bæði tá talan er um politisk rák, handilsspurningar, fiskivinnuspurningar, umhvørvi, mentan og gransking.

Virksemið hjá Sendistovu Føroya í Keypmannahavn
Sendistovan varð stovnað í 1979 og hava uppgávurnar verið skiftandi. Fyrstu árini var talan um vinnuliga ráðgeving og hjálp til føroyskar fyritøkur, meðan kunning og umboðan er vorðin alt størri partur av virkseminum seinnu árini.

Seinasta hálva árið hevur miðvíst verið roynt at skipa sendistovuna soleiðis, at hon gerst natúrligi miðdepilin í okkara fjøltáttaða politiska samskifti við danskar myndugleikar og ráðharrastovur. Talan kann t.d. verða um:

- mál, sum skulu yvirtakast
- mál, har støða Føroya skal boðast donskum myndugleikum, t.d. ávís uttanríkismál
- mál, har danskar ráðharrastovur ráðføra seg við sendistovuna
- regluligar fundir millum føroyskar og danskar myndugleikar
- serligar fundir (t.d. kunnandi vitjanir ella mál, ið stinga seg upp)

Sendistovan í Keypmannahavn búleikast undir góðum umstøðum í Norðurbryggjuni saman við íslendsku sendistovuni, grønlendsku sendistovuni og mentanarhúsinum Norðurbryggjan. Í samspæli við leiðsluna fyri Norðurbryggjuna virkar sendistovan fyri at breiða út kunnleikan um føroyska mentan. Føroyskar vinnufyritøkur nýta hølini hjá sendistovuni nakað, tá ið tær hava fundir og onnur tiltøk í Danmark. Roynt verður at víðka um henda partin av virkseminum.

Sendistovan røkir herumframt uppgávur í sambandi við føroyska umhvørvið í Keypmannahavn, samskifti við aðrar sendistovur í Keypmannahavn og vegleiðing til útlendingar, sum hava áhugamál í Føroyum o.a.

Virksemið hjá sendistovu Føroya í London
Sendistova Føroya í London fór undir sítt virksemi á heysti 2002. Málini hava verið:

- at skapa netverk og røkja sambandið við bretskar myndugleikar og umboð fyri stovnar og felagsskapir
- at geva føroyskum myndugleikum frágreiðingar
- at røkja sambond við altjóðafelagsskapir
- at ráðgeva føroyskar myndugleikar
- at ráðgeva vinnulívið í Føroyum eins og í Stóra Bretlandi
- at kunna um Føroyar eins og um Stóra Bretland
- at stuðla føroyingum í Stóra Bretlandi

Sendistova Føroya í Reykjavík
Í sambandi við, at Hoyvíkssáttmálin er komin í gildi, eru vit nú komin til at tað er av stórum týdningi, at føroysk sendistova verður sett á stovn í Íslandi, sum kann hjálpa føroyska vinnulívinum og føroysku almennu skipanini á staðnum. Tískil hevur Landsstýrið avgjørt at seta eitt sendiumboð við somu tygn, sum okkara sendimenn í Brússel og London, til Íslands. Sendiumboðið verður partur av donsku attachéskipanini og verður tilknýtt donsku sendistovuni í Reykjavík.

Mett verður, at kostnaðurin av at reka føroysku sendistovuna í Íslandi er 2,5 mió. kr. árliga. Byrjað verður nakað inn í árið, og verður tískil roknað við kostnaði í 2007 á 2 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	8.669	8.029	6.503	7.304	10.904	11.599
Útreiðslur	9.223	9.373	8.046	8.704	12.304	12.999
Inntøkur	554	1.344	1.543	1.400	1.400	1.400
21. Sendistova Føroya í Evropasamveldinum						
Nettoútreiðsla	1.907	1.752	1.720	2.054	3.327	3.389
Útreiðslur	**2.029**	**1.752**	**1.720**	**2.054**	**3.327**	**3.389**
11. Lønir v.m.	424	498	480	750	1.263	1.284
14. Keyp av vørum og tænastum	194	73	132	150	153	156
15. Keyp av útbúnaði, netto	138	-	17	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	206	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	1.067	1.181	1.091	1.154	1.911	1.949
Inntøkur	**122**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*100*	-	-	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*22*	-	-	-	-	-
22. Sendistova Føroya í Keypmannahavn						
Nettoútreiðsla	2.948	2.723	2.302	2.630	2.906	2.987
Útreiðslur	**3.136**	**4.000**	**3.824**	**4.030**	**4.306**	**4.387**
11. Lønir v.m.	655	1.025	954	1.310	1.532	1.558
14. Keyp av vørum og tænastum	300	635	523	350	357	364
15. Keyp av útbúnaði, netto	214	110	236	100	102	104
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	318	2.158	2.051	2.200	2.244	2.289
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	1.649	70	54	70	71	72
31. Bygging og løguframleiðsla	-	-	5	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	-	1	0	-	-	-
Inntøkur	**188**	**1.277**	**1.522**	**1.400**	**1.400**	**1.400**
21. Søla av vøru og tænastum	*154*	*1.227*	*1.487*	*1.400*	*1.400*	*1.400*
63. Vanligar flytingarinntøkur	*34*	-	*34*	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	*50*	-	-	-	-
23. Sendistova Føroya í London						
Nettoútreiðsla	3.641	3.373	2.426	2.520	2.569	2.619
Útreiðslur	**3.874**	**3.440**	**2.447**	**2.520**	**2.569**	**2.619**
11. Lønir v.m.	809	581	588	620	631	642
14. Keyp av vørum og tænastum	370	193	161	150	153	156
15. Keyp av útbúnaði, netto	264	-	12	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	393	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	2.037	2.667	1.686	1.750	1.785	1.821
Inntøkur	**233**	**67**	**21**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*191*	*17*	*21*	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*42*	-	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	*50*	-	-	-	-

24. Sendistova Føroya í Reykjavík

Nettoútreiðsla	-	-	-	-	2.000	2.500
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**-**	**2.000**	**2.500**
11. Lønir v.m.	-	-	-	-	550	700
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	-	125	150
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	-	-	1.325	1.650

29. Sendistovur felags umsiting

Nettoútreiðsla	173	181	56	100	102	104
Útreiðslur	**184**	**181**	**56**	**100**	**102**	**104**
11. Lønir v.m.	39	-	0	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	18	139	55	100	102	104
15. Keyp av útbúnaði, netto	13	40	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	19	1	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	97	-	-	-	-	-
Inntøkur	**11**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*9*	-	-	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*2*	-	-	-	-	-

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
A.: Høvuðsendamál (1.000 kr.)						
1. Keypmannahavn	1.740	2.723	2.302	2.630	2.906	2.987
2. Brússel	1.677	1.752	1.720	2.054	3.327	3.389
3. Norðurbryggjan	1.064	-	-	-	-	-
4. London	4.147	3.373	2.426	2.520	2.569	2.619
5. Reykjavík	-	-	-	-	2.000	2.500
6. Annað	47	180	55	100	102	104

Starvsfólkayvirlit: 21 Sendistova Føroya í Evropasamveldinum

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	1,0	1,0	1,0	2,0	2,0
Onnur	-	-	-	1,0	1,0	1,0
Fulltíðarstørv	-	1,0	1,0	2,0	3,0	3,0
Lønarpartur (mió. kr.)	0,4	0,5	0,5	0,8	1,3	1,3

Starvsfólkayvirlit: 22 Sendistova Føroya í Keypmannahavn

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007** **F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	1,0	1,0	1,0
Onnur	-	3,3	3,3	2,3	2,3	2,3
Fulltíðarstørv	-	3,3	3,3	3,3	3,3	3,3
Lønarpartur (mió. kr.)	0,7	1,0	1,0	1,3	1,5	1,6

Starvsfólkayvirlit: 23 Sendistova Føroya í London

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007** **F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	-	0,5	1,0	1,0	1,0	1,0
Fulltíðarstørv	-	1,5	2,0	2,0	2,0	2,0
Lønarpartur (mió. kr.)	0,8	0,6	0,6	0,6	0,6	0,6

Starvsfólkayvirlit: 24 Sendistova Føroya í Reykjavík

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007** **F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	1,0	1,0
Onnur	-	-	-	-	-	-
Fulltíðarstørv	-	-	-	-	1,0	1,0
Lønarpartur (mió. kr.)	-	-	-	-	0,6	0,7

2.13.1.04. Norðurbryggjan í Keypmannahavn (Onnur játtan)

Nevndin fyri grunnin viðvíkjandi Norðurbryggjuni hevur aftur í ár biðið um, at londini í útnorðuri og Danmark lata stuðul til verkætlanina Norðurbryggjan. Umboðini fyri Ísland, Grønland og Danmark hava verið jalig at ganga hesum ynski á møti til tess at útinna endamál grunsins. Ætlanin er at stuðla grunninum við 300 túsund krónum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	1.965	815	300	300	300	300
01. Stuðul						
Útreiðslur	**1.965**	**815**	**300**	**300**	**300**	**300**
14. Keyp av vørum og tænastum	142	101	-	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.379	-	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	14	-	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	430	715	300	300	300	300

2.13.2. Altjóða samstarv

2.13.2.04. Altjóða samstarv (Onnur játtan)

01. The Northern Periphery (NPP) snýr seg um økispolitiskt samstarv, skipað millum Føroyar, Grønland, Ísland, Skotland, Noreg, Svøríki og Finnland.

Verandi NPP samstarvsskrá verður 1. januar 2007 avloyst av nýggjari samstarvsskrá, ið fer at galda 2007-2013. Royndirnar av verandi samstarvi eru góðar, men áhugin at verða við í hesum verkætlanarsamstarvi varð nógv størri enn væntað. Úrslitið varð at tey, ið søktu fingu játtað nógv minni pr. verkætlan enn upprunaliga ætlað. Samlaða játtanin til NPP 1 var 370 tús. evrur; men sum sagt var hetta ov lítið. Tey, ið tekniskt vara av hesum samstarvi, føroysku nevndarlimirnir í NORA, hava gjørt greitt at skal so nógv nytta sum til ber fáast burtur hesum samstarvi, so skal føroyski parturin ikki vera minni enn 1 mió. kr. um árið.

02. Limagjald til altjóða felagsskapir. Av hesi kontu verður, sum er, goldið limagjald til IMO.

03. NORA
Tá viðtøkurnar fyri NORA á sinni vóru gjørdar, var sett í tær, at national fígging í stóran mun skuldi innganga í samlaðu fíggingina av virkseminum. Hesum smoygdi londini sær undan, við at samtykkja at upp til 1,5 mió. kr um árið skuldu takast av avlopinum hjá Útnorðurgrunninum. Hetta riggaði inntil rentan var fallin so nógv, at einki avlop var at lata av. Hetta merkti, at NORA misti uml. 1,5 mió. kr um árið. Málið hevur verið umrøtt millum londini í nøkur ár, men ikki fyrr enn í ár fekst semja millum londini í NORA. Semja varð um, at londini skulu gjalda til NORA frá januar 2007, lutfallið av nationalu fíggingini er avtalað at verða, at Føroyar og Grønland skulu gjalda 250 tús. kr. um árið, at Ísland skal gjalda 500 tús. kr. um árið og at Noreg skal gjalda 700 tús. kr. um árið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	337	663	610	700	1.300	1.300
01. The Northern Periphery						
Útreiðslur	**337**	**638**	**582**	**650**	**1.000**	**1.000**
14. Keyp av vørum og tænastum	0	0	0	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-5	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	337	643	582	650	1.000	1.000
02. Limagjald til altjóða felagsskapir						
Útreiðslur	**-**	**25**	**28**	**50**	**50**	**50**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	25	28	-	-	-
51. Tilskot til útlandið o.a.	-	-	-	50	50	50
03. NORA						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**-**	**250**	**250**
54. Stuðul til annað virksemi	-	-	-	-	250	250

2.13.3. Menningarhjálp

2.13.3.02. Neyðhjálp (Onnur játtan)

Økini neyðhjálp og menningarhjálp vórðu í 2006 skildar sundur í tvær játtanir. Um eitt haldgott langsiktað arbeiði innan menningarsamstarv skal gerast, er neyðugt at ongin ivi er um, at pengarnir á tí játtanini eru markaðir til tað arbeiði, og ikki eru í vanda hvørja ferð ein vanlukka hendir úti í heimi, sum Føroyar ynskja at stuðla.

Hinvegin er tað rætt at áseta eina fasta upphædd til neyðhjálp hvørt ár, soleiðis at møguleiki er fyri at flyta pening beint av hesi játtan og harvið handla skjótt tá vanlukkur henda. Hetta er eisini vanlig mannagongd aðrastaðni. Játtanin til neyðhjálp kann somuleiðis nýtast til at stuðla verkætlanum hjá ymsum føroyskum felagsskapum, ið virka úti í heimi innan neyðhjálp, t.d. Rumeniahjálpin, Reyði Krossur o.o.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	300	300	5.869	300	300	300
01. Neyðhjálp						
Útreiðslur	**300**	**300**	**5.869**	**300**	**300**	**300**
11. Lønir v.m.	-	-	263	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	1	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	105	-	-	-
51. Tilskot til útlandið o.a.	300	300	5.500	300	300	300

2.13.3.04. Menningarhjálp (Onnur játtan)

Síðan landsstýrið hevur valt at raðfesta altjóða menningarsamstarv hevur verið arbeitt við at byggja økið upp. Landsstýrið samstarvar í løtuni m.a. við Mercy Corps, CARE Peru og Iceida. Eisini arbeiðir Landsstýrið við at seta seg inn í arbeiðið, sum fer fram í ST-høpi, millum annað netverkið Small Islands Development States (SIDS) um verkætlanir í oyggjamenningarsamfeløgum. Samstundis verður arbeitt við at byggja upp norðurlendskt netverk m.a. á fiskivinnuøkinum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	0	-	502	3.500	3.500	3.500
01. Menningarhjálp						
Útreiðslur	**0**	**-**	**502**	**3.500**	**3.500**	**3.500**
14. Keyp av vørum og tænastum	0	-	502	700	700	700
51. Tilskot til útlandið o.a.	-	-	-	2.800	2.800	2.800

Lógarmál

2.14.1. Ymsar útreiðslur

2.14.1.02. Studningur til politiskt virksemi og upplýsing (Onnur játtan)

Sambært Ll. nr. 92 frá 4. juni 1996 um stuðul til politiska upplýsing er endamálið við játtanini at styrkja politiska arbeiðið og politisku upplýsingina. Upphæddin verður býtt millum flokkar og uttanflokkatingmenn eftir atkvøðutali seinasta løgtingsval. Peningurin kann m.a. verða nýttur til at reka politiskar flokkar, skeið- og fundarvirksemi og blaðútgávu í hesum sambandi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	2.700	2.982	3.000	3.000	3.000	3.000
01. Studningur til politiskt virksemi og upplýsing						
Útreiðslur	**2.700**	**2.982**	**3.000**	**3.000**	**3.000**	**3.000**
52. Tilskot til einstaklingar	2.700	2.982	3.000	3.000	3.000	3.000

§ 3 Fíggjarmál

Felagsútreiðslur

3.11.1. Fyrisiting

3.11.1.03. Fíggjarmálaráðið (Rakstrarjáttan)

Almenna uppgávan hjá Fíggjarmálaráðnum er at:

- Ráðgeva landsstýrismanninum í fíggjarmálum á fíggjarpolitiska, búskaparpolitiska, skatta- og avgjaldspolitiska, peninga- og kredittmarknaðarpolitiska og lønarpolitiska økinum soleiðis, at hann fær eitt haldgott avgerðargrundarlag.
- Loysa tvørgangandi og samskipandi uppgávur á fíggjar- og búskaparpolitiska økinum.
- Fyriskipa landsins búskaparstýring og skapa grundarlag fyri, at landsfyrisitingin greiðir sínar uppgávur væl búskaparliga.
- Fylgja gongdini í føroyska búskapinum og meta um úrslit av førda búskaparpolitikkinum.

Fíggjarmálaráðið hevur hesi mál um hendi:

- Uppskot um fíggjarlóg og eykajáttanarlóg.
- Umsiting í sambandi við játtanarlógir og játtanarskipan, játtanarrætt og fíggjarætlanar-tøkniligar (budgettekniskar) spurningar.
- Eftirlit við, at játtanarskipanin verður fylgd.
- Lógarfyrireikandi arbeiði á fíggjarpolitiska, búskaparpolitiska og skatta- og avgjaldspolitiska økinum (saman við T&S).
- Búskaparfrágreiðingar.
- Lógarumsiting, sum viðvíkur peninga- og kredittmarknaði.
- Kanningar viðvíkjandi ymsum pørtum hjá tí almenna fyri at tryggja, at landskassans fíggjarorka verður skynsamiliga nýtt. Lóggávuverkið á ávísum útreiðsluøki kann verða kannað og somuleiðis bygnaðurin á økinum. Setast kunnu arbeiðsbólkar, sum vanliga verða mannaðir við fólkum úr Fíggjarmálaráðnum, avvarðandi aðalráð og møguliga við ráðgevum uttanífrá.

Umframt hesi mál hevur lønardeildin undir Fíggjarmálaráðnum hesi mál um hendi:

- Sáttmálasamráðingar.
- Sáttmálaumsiting.
- Gera almennar reglur og vegleiðingar um lønarmál.
- Ráðgeva og kunna aðalráð og stovnar um lønarviðurskifti og starvsfólkarætt.
- Tænastumannalóggávu.
- Menningaruppgávur, m.a. menna nýggjar lønarskipanir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	7.392	7.315	6.832	7.054	7.717	7.852
Útreiðslur	7.527	7.483	7.007	7.064	7.727	7.862
Inntøkur	136	168	175	10	10	10
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	7.392	7.315	6.832	7.054	7.717	7.852
Útreiðslur	**7.527**	**7.483**	**7.007**	**7.064**	**7.727**	**7.862**
11. Lønir v.m.	5.933	6.039	5.929	5.977	6.493	6.603
14. Keyp av vørum og tænastum	1.327	1.188	972	911	1.055	1.077
15. Keyp av útbúnaði, netto	175	244	96	155	158	161
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	4	1	-	21	21	21
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	11	10	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	89	1	-	-	-	-
Inntøkur	**136**	**168**	**175**	**10**	**10**	**10**
21. Søla av vøru og tænastum	*7*	*98*	*-*	*10*	*10*	*10*
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*-*	*-*	*0*	*-*	*-*	*-*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*129*	*71*	*175*	*-*	*-*	*-*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	2,0	2,0	3,0	3,0	3,0	3,0
Onnur	13,8	13,8	11,8	11,8	11,8	11,8
Fulltíðarstørv	15,8	15,8	14,8	14,8	14,8	14,8
Lønarpartur (mió. kr.)	5,9	6,0	5,9	6,0	6,5	6,6

3.11.1.13. Viðlíkahald (Rakstrarjáttan)

Játtanin er til at viðlíkahalda bygningar og ognir, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum varðar av.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	197	227	377	377	377	385
Útreiðslur	197	227	377	377	377	385
20. Viðlíkahald						
Nettoútreiðsla	197	227	377	377	377	385
Útreiðslur	**197**	**227**	**377**	**377**	**377**	**385**
14. Keyp av vørum og tænastum	6	2	1	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	29	-	281	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	162	225	59	377	377	385
31. Bygging og løguframleiðsla	-	-	35	-	-	-

3.11.1.19. Flyting av fíggjar-og búskaparstovnum landsins (Løgujáttan)

Sett er av 1 mió. kr. til flyting og innrætting í sambandi við, at Hagstova Føroya flytur í annan bygning og, at lønardepil verður upprættaður undir Føroya Gjaldstovu.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	-	1.000	-
10. Flyting av fíggjar- og búskaparstovnum landsins						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**-**	**1.000**	**-**
31. Bygging og løguframleiðsla	-	-	-	-	1.000	-

3.11.1.23. Landsins ognir (Rakstrarjáttan)

Oljutangarnir við tilhoyrandi lendi verða væntandi seldir í 2006. Higartil hava ognirnar verið leigaðar út. Orsakað av søluni fellur leiguinntøkan fyri oljutangar við tilhoyrandi lendi burtur.

Landið varðar av posthúsbygninginum á Argjum. Partar av bygninginum verða í 2007 leigaðir út, og fær landið tískil leiguinntøkur á 1,8 mió. kr.

Herumframt eru smærri inntøkur av at leiga út hús og traðir, sum landið eigur.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	-1.477	-1.583	-1.560	-240	-2.071	-240
Útreiðslur	32	-113	29	28	28	28
Inntøkur	1.510	1.470	1.589	268	2.099	268
20. Oljugoymslur o.a.						
Nettoútreiðsla	-1.200	-1.200	-1.200	-	-	-
Inntøkur	**1.200**	**1.200**	**1.200**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*1.200*	*1.200*	*1.200*	-	-	-
21. Húsaleiga og íbúðargjald						
Nettoútreiðsla	-91	-44	-174	-52	-1.883	-52
Útreiðslur	**16**	**20**	**12**	**10**	**10**	**10**
14. Keyp av vørum og tænastum	16	20	12	10	10	10
Inntøkur	**107**	**64**	**186**	**62**	**1.893**	**62**
21. Søla av vøru og tænastum	*107*	*64*	*186*	*62*	*1.893*	*62*
22. Leiga av økjum, uppisitaraavgjald o.a.						
Nettoútreiðsla	-186	-339	-186	-188	-188	-188
Útreiðslur	**17**	**-133**	**17**	**18**	**18**	**18**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-150	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	17	17	17	18	18	18
Inntøkur	**203**	**205**	**203**	**206**	**206**	**206**
21. Søla av vøru og tænastum	*203*	*202*	*203*	*206*	*206*	*206*
42. Søla av løgu o.ø.	-	*3*	-	-	-	-

3.11.1.35. Bygningur til almennar stovnar í Klaksvík (Løgujáttan)

Ongin játtan er til endamálið í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	1.978	1.537	1.591	-	-	-
Inntøkujáttan	-	-	2.315	-	-	-
10. Bygningur til almennar stovnar í Klaksvík						
Útreiðslur	**1.978**	**1.537**	**1.591**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	2	240	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	184	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	40	547	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	1.978	1.494	620	-	-	-
Inntøkur	**-**	**-**	**2.315**	**-**	**-**	**-**
42. Søla av løgu o.ø.	-	-	*2.315*	-	-	-

3.11.1.36. Sáttmálaviðurskifti (Rakstrarjáttan)

Játtanin á hesi høvuðskontu kemur í høvuðsheitum at verða nýtt til útreiðslur í sambandi við lønarsáttmálar, sum fakfeløg hava við tað almenna. Hetta eru útreiðslur, ið ikki beinleiðis viðvíkja rakstrinum hjá Fíggjarmálaráðnum, men allari landsumsitingini.

Arbeitt hevur verið við lógaruppskoti um skipanir til at loysa ósemjur á arbeiðsmarknaðinum, sum fata um fastan gerðarrætt og semingsstovn fyri allan arbeiðsmarknaðin. Fasti gerðarrættur er á vári 2006 farin til verka, meðan skipanin við semingsstovni fyri allan arbeiðsmarknaðin neyvan verður skipað fyrr enn í 2007. Løn til semingsmenn verður tí helst at rinda av hesi kontu eisini í 2007, nú flestu sáttmálar ganga út tann 1. oktober 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	816	645	683	700	700	713
Útreiðslur	816	645	683	700	700	713
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	816	645	683	700	700	713
Útreiðslur	**816**	**645**	**683**	**700**	**700**	**713**
11. Lønir v.m.	356	181	120	300	300	305
14. Keyp av vørum og tænastum	435	464	563	400	400	408
54. Stuðul til annað virksemi	25	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-

3.11.1.46. Søla av partabrøvum í P/F Elektron (Onnur játtan)

Fíggjarmálaráðið fór í 2006 undir at selja partabrøvini, sum landið eigur í P/F Elektron. Hendan sølan er komin í drag, og verður tí neyvan gjøgnumført fyrr enn í 2007.

Høvuðsorsøkin til at landið ætlar at selja síni partabrøv í Elektron er, at felagið er farið út í kapping á KT-marknaðinum. Fíggjarmálaráðið metir tað vera skeivt, at landið skal luttaka í kapping móti privatum KT-fyritøkum. Eisini er henda søla í tráð við einskiljingarætlanir landsstýrisins.

Landið eigur partabrøv áljóðandi 1,9 mió. kr. svarandi til 28% av samlaða partapeninginum í felagnum, og verður mett, at partabrøvini kunnu seljast fyri 5 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	-	-	-	5.000	5.000	-
01. Søla av partabrøvum í P/F Elektron						
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**5.000**	**5.000**	**-**
85. Søla av virðisbrøvum	-	-	-	*5.000*	*5.000*	-

Uttanríkismál

3.13.2. Altjóða samstarv

3.13.2.03. Endurgjald av skatti og avgjøldum (Onnur játtan)

Játtanin er til partvíst endurgjald fyri skatt og avgjøld, ið Norrøna Atlantssamstarvið (NORA) og starvsfólk tess rinda í Føroyum. NORA er samstarv ímillum Ísland, Grønland, Føroyar og Vestur- og Norðurnoreg undir Ráðharraráðnum í Norðurlandaráðnum. Høvuðsskrivstovan er í Føroyum, men skrivstovur eru eisini í hinum samstarvslondunum.
Norðurlandaráðharraráðið veitir játtanina, ið NORA hevur at arbeiða við.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	200	200	200	200	200	200
01. Norrøna Atlantssamstarvið (NORA)						
Útreiðslur	**200**	**200**	**200**	**200**	**200**	**200**
51. Tilskot til útlandið o.a.	200	200	200	200	200	200

Fíggjarmál o.a.

3.15.1. Fíggjarfyrisiting v.m.

3.15.1.04. Toll- og skattstova Føroya (Rakstrarjáttan)

Høvuðsuppgávan hjá Toll- og Skattstovu Føroya er at umsita toll-, avgjalds-, mvg- og inntøkuskattalógina. Aðrar uppgávur eru at umsita frítíðarløn og trygdargrunn løntakaranna, krevja inn gjald til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og gjalda út úr grunninum, krevja inn gjald til Arbeiðsloysisskipanina og Barsilsskipanina, at umsita FAS-skipanina og at krevja inn almenna skuld. Harumframt kemur umsiting av stuðulslóggávum. Stovnurin røkir eisini lógararbeiði í beinleiðis samstarvi við aðalráðið.

Harumframt arbeiðir Toll- og Skattstova Føroya miðvíst við at menna bygnaðin innan almenna umsiting, og m.a. fer Toll- og Skattstova Føroya í samarbeiði við aðalráðið í 2007 undir at skipa fyri mál- og avriksstýring á stovninum.

Til tess at lýsa virkisgrundarlagið undir stovninum er yvirlit gjørt yvir, hvørjar løgtingslógir og kunngerðir, ið Toll- og Skattstova Føroya umsitur. Hesar eru:
Ásetingarlógin, Avskrivingarlógin, Skattalógin, Rentutryggingarlógin, Umskipanarlógin, Kapitalvinningsskattalógin, Kolvetnisskattalógin, Kolvetnisskattafyrisitingarlógin, Lóg um Toll- og Skattafyrisiting, Lógin um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m, Lógin um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, Kunngerð um barsilsgjald, Kunngerð um frítíðarløn, Lóg um toll, Lóg um meirvirðisgjald, Lóg um skattafría samanlegging, Lóg um ferðaavgjald, Tonsaskattalógin, Lóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi, Lóg um umhvørvisgjald á smyrjiolju, Lóg um avgjald á brenniolju, Lóg um lønhæddargjald, Lóg um burturluting, Lóg um eydnuspæl o.a., Lóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum, Lóg um stuðul til ferðaútreiðslur, Lóg um stuðul til dupult húsarhald, Lóg um gjøld o.t. fyri innkrevjing av falnari skuld til landskassan, Midlertidig bestemmelse nr. 26 frá 24. september 1945 for Færøerne om Inddrivelse af personlig landsskatt, Lóg um panting fyri skatt, Lóg um avgjøld í sambandi við panting, Lóg um at veita trygd og at bjóða á tvingsilssølu og Lóg um skráseting av útflutningi av vørum.

Tær lógir, sum Toll- og Skattstova Føroya lutvíst hevur skyldu at røkja, eru hesar:
Lóg um innflutning og sølu av rúsdrekka, Lóg um sjúkur, sum fiskur, skeljadýr og krabbadýr hava, Lóg um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, Lóg um frítíð við løn, Bókhaldsskyldulógin, Lóg um arbeiðsloysisskipan, Lóg um barsilsskipan. Sjúkufyribyrging av dýrum, og Bekæmpelse af smitsomme plantesygdomme og skadedyr (kunngerð).

Millumlandasáttmálar:
Tvískattasáttmálin við Norðurlond, Grønland, Sveis, Eysturríki og India. Norðurlendsk Bistandsavtala á skattaøkinum. Fríhandilsavtalur: Føroyar-ES, Føroyar-Noreg, Føroyar-Ísland og Føroyar-Sveis (íroknað Liktinstein). GATT-sáttmálin (WTO). Bekendtgørelse af aftale med Finland, Island, Norge, Sverige og Danmark om gensidig bistand i toldsager.

Umsitingin av Trygdargrunninum er frá 2007 at roknað flutt til høvuðskontuna hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Lønarjáttanin í 2007 er hækkað vegna økt virksemi síðstu tvey árini av lógarkravdum tolleftirliti uttanfyri vanliga arbeiðstíð. Eftirlitsinntøkur av hesum virksemi eru hækkaðar samsvarandi. Hetta sæst í roknskapartølunum fyri 2005, og er somuleiðis metingin fyri 2006. Eisini er vegna styrkt eftirlit við innflutningi av ólógligum rúsevnum fingin ein narkohundur til vega afturat, og hevur hetta við sær løn til hundaførara.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.		2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan		59.864	58.988	60.089	60.107	61.575	63.722
Útreiðslur		70.792	70.572	72.155	69.427	72.050	73.341
Inntøkur		10.929	11.584	12.066	9.320	10.475	9.619
20.	**Vanligt virksemi**						
	Nettoútreiðsla	57.157	56.181	48.207	50.917	51.370	53.415
	Útreiðslur	**67.875**	**67.537**	**60.053**	**58.017**	**59.470**	**60.515**
	11. Lønir v.m.	47.119	47.990	48.387	47.405	49.310	50.152
	14. Keyp av vørum og tænastum	12.567	12.450	7.348	5.284	4.990	5.090
	15. Keyp av útbúnaði, netto	5.892	4.992	2.200	2.700	2.650	2.703
	16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2.174	2.034	2.063	2.528	2.450	2.499
	19. Ymsar rakstrarútreiðslur	65	58	47	100	70	71
	51. Tilskot til útlandið o.a.	-	1	-	-	-	-
	71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	58	13	6	-	-	-
	Inntøkur	**10.718**	**11.356**	**11.846**	**7.100**	**8.100**	**7.100**
	21. Søla av vøru og tænastum	*2.470*	*2.784*	*2.806*	*100*	*100*	*100*
	62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*8.248*	*8.358*	*8.967*	*7.000*	*8.000*	*7.000*
	76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	*215*	*73*	-	-	-
24.	**EDV-skipanir hjá Toll- og skattstovu Føroya**						
	Nettoútreiðsla	-	-	8.988	6.500	7.225	7.273
	Útreiðslur	**-**	**-**	**8.988**	**8.500**	**9.400**	**9.588**
	14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	5.719	5.500	6.000	6.120
	15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	3.269	3.000	3.400	3.468
	Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**2.000**	**2.175**	**2.315**
	21. Søla av vøru og tænastum	-	-	-	*2.000*	*2.175*	*2.315*

26. Felagsfyrisiting hjá Fíggjarmálaráðnum

Nettoútreiðsla	2.706	2.807	2.894	2.690	2.980	3.034
Útreiðslur	**2.917**	**3.035**	**3.114**	**2.910**	**3.180**	**3.238**
11. Lønir v.m.	1.898	2.015	2.040	1.820	2.100	2.136
14. Keyp av vørum og tænastum	889	913	979	930	950	969
15. Keyp av útbúnaði, netto	19	19	24	30	30	31
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	112	88	70	130	100	102
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	0	0	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-
Inntøkur	**211**	**228**	**220**	**220**	**200**	**204**
21. Søla av vøru og tænastum	*211*	*228*	*220*	*220*	*200*	*204*

Undirkonta 24: Høvuðs KT-skipanirnar hjá Toll- og Skattstovuni eru frá 1984. Nógv orka fer tí til at viðlíkahalda hesar skipanir eins og tær eru ótíðarhóskandi og tungar at arbeiða við. Neyðugt er at gera eina langtíðarætlan innan KT-økið hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Tørvurin á at fáa til vega tøk hagtøl økist alsamt. Verandi KT-skipanirnar gera, at tað er tungt og tíðarkrevjandi at fáa upplýsingar úr KT-skipanunum. Toll- og Skattstovan metir tí, at tað er neyðugt at fáa til vega eina skipan, sum smidliga og skjótt kann fáa neyðugu hagtølini til vega. Ein slík skipan gevur møguleika fyri at hava dagførd hagtøl fyri virkisøki stovnsins. Toll- og Skattstovan arbeiðir við einari ætlan at menna eina skipan, har virki kunnu skráseta MVG-uppgerðir sjálvvirkandi.

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007** **F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	10,0	6,0	6,0	9,0	9,0	9,0
Onnur	143,0	141,0	133,0	126,0	121,0	121,0
Fulltíðarstørv	153,0	147,0	139,0	135,0	130,0	130,0
Lønarpartur (mió. kr.)	47,1	48,0	48,4	47,4	49,3	50,2

3.15.1.05. Toll- og skattstova Føroya (Løgujáttan)

Høvuðskontan er niðurløgd.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	2.100	-	-	-	-	-
10. Toll- og skattstova Føroya						
Inntøkur	**2.100**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*2.100*	-	-	-	-	-

3.15.1.07. Føroya gjaldstova (Rakstrarjáttan)

Játtanin verður nýtt at reka landsstovnin Føroya gjaldstovu, sum er skipaður undir Fíggjarmálaráðnum. Gjaldstovan førir roknskap yvir játtanirnar á fíggjarlógini og førir m.a. eisini roknskap yvir ogn og skuld landskassans. Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og hevur um hendi ein part av almennu lønaravgreiðslunum.

Ábyrgdarøkið kann verða liðað sundur í hesar høvuðsuppgávur:

- Landsins roknskaparhald og gera landsroknskap
- Menning, viðlíkahald og at reka Búskaparskipan landsins
- Gjaldstovan førir bókhald fyri fleiri høvuðskontur á fíggjarlógini
- Undirvísing í at nýta Búskaparskipan landsins
- Gjaldstovan hevur um hendi allar inn- og útgjaldingar landskassans vegna og skal ætla um gjaldførið í fíggjarárinum.
- Menning, rakstur og viðlíkahald av Felags lønarskipan.

Stovnurin er ikki skipaður við lóg, men partar av virkseminum eru ásettir við lóg.

Í kunngerð nr. 114 frá 22. august í 1996 hevur landsstýrið ásett øll tey týdningarmestu viðurskiftini í sambandi við roknskaparverk landsins, t.d. hvønn roknskaparhaldið fatar um, hvørjar uppgávur roknskaparhald landsins skal loysa, hvussu tað verður fyriskipað, og hvørji krøv verða sett til roknskaparførslu.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	18.501	18.384	19.987	20.694	21.077	21.470
Útreiðslur	18.761	18.528	20.404	20.939	21.322	21.715
Inntøkur	260	144	418	245	245	245
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	9.885	10.945	11.068	12.116	12.329	12.545
Útreiðslur	**10.033**	**11.005**	**11.397**	**12.161**	**12.374**	**12.590**
11. Lønir v.m.	7.955	8.577	9.313	10.085	10.256	10.430
14. Keyp av vørum og tænastum	1.927	1.877	1.775	1.730	1.765	1.800
15. Keyp av útbúnaði, netto	63	407	122	233	238	243
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	44	46	53	113	115	117
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	11	7	12	-	-	-
53. Stuðul til vinnu	-	-	0	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	1	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	32	91	121	-	-	-
Inntøkur	**149**	**61**	**329**	**45**	**45**	**45**
21. Søla av vøru og tænastum	*121*	*61*	*262*	*45*	*45*	*45*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*28*	-	*66*	-	-	-
24. Búskaparskipan landsins						
Nettoútreiðsla	7.431	6.208	7.530	7.398	7.546	7.697
Útreiðslur	**7.431**	**6.208**	**7.530**	**7.398**	**7.546**	**7.697**
14. Keyp av vørum og tænastum	4.726	4.332	4.778	3.523	3.593	3.665
15. Keyp av útbúnaði, netto	2.591	1.858	2.751	3.875	3.953	4.032
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	114	18	0	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	1	-	-	-	-	-
26. Net hjá Fíggjarmálaráðnum						
Nettoútreiðsla	1.198	1.236	1.393	1.180	1.202	1.224
Útreiðslur	**1.200**	**1.236**	**1.393**	**1.180**	**1.202**	**1.224**
11. Lønir v.m.	778	814	837	800	814	828
14. Keyp av vørum og tænastum	272	270	414	380	388	396
15. Keyp av útbúnaði, netto	147	128	135	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	0	21	4	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	2	2	2	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-
Inntøkur	**1**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*1*	-	-	-	-	-

40. Inntøkufíggjað virksemi

Nettoútreiðsla	-13	-5	-3	0	0	4
Útreiðslur	**97**	**78**	**86**	**200**	**200**	**204**
11. Lønir v.m.	60	31	11	100	100	102
14. Keyp av vørum og tænastum	1	4	18	100	100	102
15. Keyp av útbúnaði, netto	36	43	56	-	-	-
Inntøkur	**110**	**83**	**89**	**200**	**200**	**200**
21. Søla av vøru og tænastum	*110*	*83*	*89*	*200*	*200*	*200*

Undirkonta 20. Vanligt virksemi:

Landsstýrið hevur tikið avgerð um, at umsiting av lønum og tænastumannapensjónum hjá landinum verður samskipað við at savna ein part av vitanini á lønarøkinum í eina Felags lønarfyrisiting.

Orsøkin til hetta er, at skapt verður ein sterkari umsiting av lønum. Støðan er, at umsitingin liggur spjadd, og er tað í flestu førum torført at skapa eitt umhvørvi á høgum umsitingarligum stigi, har vitan alsamt verður sett við. Her kann verða viðmerkt, at lønarparturin á fíggjarlógini er góðar 1,8 mia. kr. ella umleið helmingurin av útreiðslusíðuni á fíggjarlógini.

Talan verður ikki um at flyta alt, sum hevur við lønir at gera, men tey øki, sum krevja eina serliga vitan á lønarfyrisitingarøkinum. Her er talan um:

- Sáttmálaspurningar, sum beinleiðis eru knýttir til lønir t.d. setanir og frítíð. Við at savna serfrøði um sáttmálar, so fær Fíggjarmálaráðið uppá sikt eitt heilt annað grundarlag at menna nýggjar lønarmyndlar.
- At geva fólki høgan førleika at brúka Felags lønarskipanina, t.e. at kenna skipanina og møguleikar við skipanini, seta sáttmálar upp í skipanini, gera úttrekk, umsita markamót, menna og nároyna nýggjar funkur o.t.
- At viðlíkahalda eftirlønarmál, gera útrokningar og greiða eftirlønarskylduna millum danskar myndugleikar og landsstýrið.

Talan eri ikki um at flyta tyngri starvsfólkamál. Lagt kann vera afturat, at umframt hetta, so er eisini talan um at skráseta lønir. Gjaldstovan nýtir okkurt um 75% av arbeiðsorkuni á lønarøkinum til beinleiðis skráseting.

Mett verður, at okkurt um 13 fólk, t.e. 8 starvsfólk umframt tey 5, sum arbeiða við lønarumsiting í Gjaldstovuni, verða savnaði í eini fyrisitingarligari eind, so til ber at skapa eitt umhvørvi, sum kann tryggja, at omanfyrinevndu uppgávur verða loystar fullgott.

Ætlanin er ikki at játta peningin við nýjáttan, men at flyta frá stovnunum til Føroya Gjaldstovu so hvørt, sum flytingarnar fara fram.

Undirkonta 24 . Búskaparskipan landsins:

Búskaparskipan landsins er m.a.:

- Høvuðsbók
- Debitorskipan
- Kreditorskipan (ljóslesing, arbeiðsgongdir o.t.)
- Útgjaldingarskipan
- Inngjaldingarskipan
- Støðisogn
- Lønarskipan o.a.
- Leiðslukunningarskipan
- Búskettskipan
- Skipan fyri søguligar dátur
- Vegskattaskipan
- Lánsskipan
- Navna- og virksiskrá

Talið av brúkarum í Búskaparskipan landsins nærkast 1000. Krøvini til rakstrarumhvørvið - bæði við atliti til skipanir, talið av brúkarum og EDV-trygd - hava merkt, at hetta er munandi útbygt síðstu árini.

Nakrar loysnir, sum gjaldstovan kemur at arbeiða við og menna í 2007:

- Web-løn, 3. táttur 3: Ein hendingagrundað loysn, sum koyrir á netinum
- Leiðslukunning lønir, 3. táttur: Ein skipan, har avgerðartakarar kunnu fáa kunning um lønir
- Ein felags portal til allar skipanirnar hjá gjaldstovuni
- Verkgongdir

Útreiðslurnar til Búskaparskipan landsins eru m.a.:

- Gjald fyri rættindi (lisensir)
- Rakstur t.d. dátugrunnarøkt, kervisrøkt, og hýsing av skipanum og samskifti
- Viðlíkahald av verandi loysnum t.d. dagføringar, tillagingar, rættingar, listar og smærri broytingar
- Dagføring og útskifting av tólbúnaði
- EDV-trygd
- Menning av nýggjum loysnum t.d. leiðslukunning, talgilding, tíðarskráseting

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Onnur	27,0	28,0	30,0	31,0	31,0	31,0
Fulltíðarstørv	29,0	30,0	32,0	33,0	33,0	33,0
Lønarpartur (mió. kr.)	8,0	8,6	9,3	10,1	10,3	10,4

3.15.1.10. Nýggj fíggjarstýring (Rakstrarjáttan)

Fíggjarmálaráðið er farið undir eina 3 ára ætlan at talgilda ymsar mannagongdir innan búskaparøkið við tí fyri eyga at útvega betri avgerðargrundarlag og at rationalisera, so umsitingin gerst bíligari og effektivari.

Í 2006 er peningur í høvuðsheitum nýttur til verkætlanina mál- og avriksstýring.

Undirkonta 32
Landsstýrið hevur tikið avgerð um at seta í verk mál- og avriksstýring fyri stovnar og játtanir undir landinum. Talan er um at gera leiðbeiningar á hesum øki og vera við til at ráðgeva stovnum, hvussu mál- og avriksstýring verður sett í verk. Ein ráðgevingarbólkur fer at samskipa verksetingina av mál- og avriksstýring. Í staðin fyri at seta fólk at fremja hesa tænastu, so verður tænastan keypt frá privatum veitarum.

Við mál- og avriksstýring skulu aðalráð saman við stovnum seta yvirskipað mál fyri tær uppgávur, sum stovnur er settur at loysa. Eitt yvirskipað mál kann liðast í fleiri lutmál, sum mugu verða avrikað fyri at røkka yvirskipaða málinum. Samlað verður hetta kallað mál- og avriksstýring.

Amboðið, ið ætlanin er at brúka til mál- og avriksstýring, er avriks- og leiðarasáttmálar, ið er ein skrivlig avtala millum aðalráð og stovn um, at hesin skal røkka og avrika ávís mál í einum fíggjarári.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	699	804	681	800	800	816
Útreiðslur	699	804	681	800	800	816
30. Fíggjarlógarverkætlan						
Nettoútreiðsla	699	293	323	-	-	-
Útreiðslur	**699**	**293**	**323**	**-**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	0	-	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	33	246	59	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	667	47	264	-	-	-
31. Talgilding o.t.						
Nettoútreiðsla	-	511	358	-	-	-
Útreiðslur	**-**	**511**	**358**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	150	16	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	211	342	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	150	-	-	-	-
32. Mál- og avriksstýring						
Nettoútreiðsla	-	-	-	800	800	816
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**800**	**800**	**816**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	800	800	816

3.15.1.13. Búskaparráðið (Rakstrarjáttan)

Ætlanin við Búskaparráðnum er, at tað skal gera regluligar frágreiðingar frá føroyskum búskaparfrøðingum um gongdina í føroyska búskapinum, um tey búskaparligu útlitini, og um hvørji tiltøk eiga at verða sett í verk.

Lógargrundarlagið fyri Búskaparráðnum er løgtingslóg nr. 120 frá 12. juli 1995 um Búskaparráð, við seinni broytingum. Ráðið er óheft av landsstýrinum. Sjey limir eru í ráðnum, og mælir Fróðskaparsetur Føroya til, hvørjir limirnir skulu vera. Av teimum skulu tríggir vera búskaparfrøðingar, og hinir fýra limirnir skulu hava serkunnleika á umráðandi búskaparøkjum. Teir skulu vita væl um t.d. fiskivinnu, peningastovnsvirksemi, handilsvinnu og arbeiðsmarknaðarviðurskifti.

Hagstova Føroya fekk fram til 2006 gjald fyri at røkja skrivarastarv fyri Búskaparráðið, men heldur hendan skipanin ikki fram í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	630	666	660	730	740	753
Útreiðslur	630	666	660	730	740	753
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	630	666	660	730	740	753
Útreiðslur	**630**	**666**	**660**	**730**	**740**	**753**
11. Lønir v.m.	182	175	183	185	600	610
14. Keyp av vørum og tænastum	16	6	8	39	140	143
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	2	20	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	431	483	449	506	-	-

3.15.1.19. Umsiting av gjaldførislánum (Rakstrarjáttan)

Við løgtingslóg nr. 76 frá 5. november 1998 um umsiting av gjaldførislánum samtykti Løgtingið, at innafturgoldnu gjaldførislánini, sum vóru veitt í tíðarskeiðnum 1984 til 2000 kunnu verða lánt út aftur sum síðustillað 2. veðrættarlán við 2. veðrættarlán úr Realinum.

Landskassin rindar Realinum 0,6% av útlánsfænum á 59.556 tús. kr. fyri at umsita gjaldførislánini.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	357	357	357	357	357	357
Útreiðslur	357	357	357	357	357	357
20. Føroya Realkreditstovnur (Realurin)						
Nettoútreiðsla	357	357	357	357	357	357
Útreiðslur	**357**	**357**	**357**	**357**	**357**	**357**
14. Keyp av vørum og tænastum	357	357	357	357	357	357

3.15.1.23. Umsiting av ogn og skuld landsins (Rakstrarjáttan)

Landsbankin røkir lán landskassans. Samsýningin fyri hetta er 1/4 promillu av ríkisláninum og ½ promillu av øðrum lánum. Áður var henda samsýning tikin við sum útreiðsla á høvuðskontu 20.50.1.01. Rentur at gjalda. Í sambandi við, at ríkislánini eru niðurgoldin og lánsbrævaskuld landsins er voksin, lækkar játtanin til Landsbankan til 1.414 tús. kr.

Av hesi kontu fer eisini samsýning til serstaka ráðgeving í sambandi við lánsbrævaútgávu. Hendan samsýning verður væntandi 218 tús. kr. í 2007.

Roknað verður sostatt við íalt 1.632 tús. kr. í 2007.

Afturat samsýning fyri røkt av lánum landsins fær Landsbankin eisini eina upphædd fyri at røkja gjaldføri landsins. Henda upphædd sæst á høvuðskontu 20.50.2.01. Rentuinntøkur av innistandandi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.792	1.900	2.557	1.900	1.632	1.665
Útreiðslur	1.792	1.900	2.557	1.900	1.632	1.665
20. Landsbanki Føroya						
Nettoútreiðsla	1.792	1.900	2.557	1.900	1.632	1.665
Útreiðslur	**1.792**	**1.900**	**2.557**	**1.900**	**1.632**	**1.665**
14. Keyp av vørum og tænastum	1.792	1.900	2.557	1.900	1.632	1.665

3.15.2. Hagfrøði

3.15.2.01. Hagstova Føroya (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlag stovnsins er løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya. Sambært hesi lóg er Hagstovan ein sjálvstøðugur stovnur við einum stjóra, og er høvuðsmyndugleiki fyri hagfrøðiligum virksemi í Føroyum.

Hagstovan hevði fram til 2006 um hendi raksturin viðvíkjandi skrivarauppgávuni hjá Búskaparráðnum, og flutti Búskaparráðið tí Hagstovuni árliga eina upphædd sum gjald fyri skrivara, skrivstovuhald og tilfarsnýtslu. Hendan uppgávan verður frá 2007 ikki longur atknýtt Hagstovuni, og tí minka inntøkur og útreiðslur við áljóðandi 506 tkr.

Við øktari játtan á 1,6 mió. kr. í 2007 verður dentur lagdur á at betra góðskuna í tjóðarroknskapar- og gjaldsjavnahagtølunum, umframt at Hagstovan fer undir at fremja tjóðarroknskapin í føstum prísum. At tjóðarroknskapurin verður tøkur í føstum prísum fer at geva upplýsingar um búskapargongd og búskaparvøkstur, sum er sambærligur við hagtøl í øðrum londum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	6.621	6.619	6.686	6.676	8.302	8.448
Útreiðslur	7.313	7.755	7.681	7.250	8.370	8.516
Inntøkur	692	1.136	996	574	68	68
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	6.621	6.619	6.686	6.676	8.302	8.448
Útreiðslur	**7.313**	**7.755**	**7.681**	**7.250**	**8.370**	**8.516**
11. Lønir v.m.	5.997	5.953	6.188	6.178	7.277	7.401
14. Keyp av vørum og tænastum	1.019	1.268	975	816	832	849
15. Keyp av útbúnaði, netto	248	483	405	200	204	208
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	29	31	31	56	57	58
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	0	0	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	21	20	83	-	-	-
Inntøkur	**692**	**1.136**	**996**	**574**	**68**	**68**
21. Søla av vøru og tænastum	*139*	*92*	*47*	*68*	*68*	*68*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	-	*570*	*500*	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*553*	*473*	*449*	*506*	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	16,0	16,0	16,0	15,0	18,5	18,5
Fulltíðarstørv	17,0	17,0	17,0	16,0	19,5	19,5
Lønarpartur (mió. kr.)	6,0	6,0	6,2	6,2	7,3	7,4

Almenn starvsfólk v.m.

3.18.1. Tænastumannaeftirlønir

3.18.1.01. Tænastumannaeftirlønir (Lógarbundin játtan)

Lógargrundarlagið undir játtanini er løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir við seinni broytingum. Fólk, sum fáa eftirløn eftir hesi løgtingslóg, eru: tænastumenn, sum eru farnir frá fyri aldur, sjúku ella av øðrum óvæntaðum ávum, sum teir hava ikki vald á, og sum kunnu ikki verða kannaðar teimum. Eftirsitandi hjúnafelagi eftir tænastumann ella eftirløntan tænastumann. Eftirsitandi børn hjá tænastumanni fáa barnaeftirløn til tey eru 21 ár. Eftirløntir tænastumenn fáa barnaískoyti, eiga teir børn undir 21 ár.

Eftirløn verður roknað eftir avtalu, sum er gjørd millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið eftir lógini, sum er nevnd omanfyri.

Talið av eftirlønarmóttakarum er vaksandi. Mett verður, at útgjaldið fer at verða 17,5 mió. kr. í 2007 og 19 mió. kr. í 2008.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	12.677	14.800	15.570	17.050	17.550	18.550
Inntøkujáttan	-	-	-	50	50	50
01. Tænastumenn						
Útreiðslur	**12.677**	**14.800**	**15.570**	**17.050**	**17.550**	**18.550**
52. Tilskot til einstaklingar	12.675	14.800	15.570	17.050	17.550	18.550
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	1	-	-	-	-	-
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**50**	**50**	**50**
65. Flytingar úr Danmark	-	-	-	*50*	*50*	*50*

3.18.2. Aðrar eftirlønir

3.18.2.01. Eftirlønir (Lógarbundin játtan)

Eftirlønir, sum sambært samtykt Landsstýrisins og fíggjarnevnd Løgtingsins verða veittar teimum, sum vóru í starvi hjá tí almenna 1. apríl 1949, og sum eftir 30 ára aldur hava starvast í minsta lagi 15 ár hjá tí almenna og fara úr starvi fyri aldur ella sjúku, ella eftirsitandi hjúnafelaga teirra. Eftirlønin verður roknað sum 2/3 av tænastumannaeftirløn. Viðmerkjast kann, at fólk, sum fáa eftirløn eftir hesi reglu, og sum starvast á stovnum við egnari lønarútgjalding, fáa eftirlønina goldna frá stovninum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	557	534	546	600	570	570
01. Eftirlønir						
Útreiðslur	**557**	**534**	**546**	**600**	**570**	**570**
52. Tilskot til einstaklingar	557	534	546	600	570	570
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-

3.18.2.04. Danskar eftirlønir (Lógarbundin játtan)

Endurgjald til ríkiskassan sambært avtalu dagf. 6. februar 1981 við ískoyti dagf. 10. mai 1990 um eftirlønarbýti hjá ávikavist landsstýrinum og ríkiskassanum. Eftir hesi avtalu rindar ríkiskassin eftirløn til tænastumenn og onnur, ið hava tænastumannalíknandi eftirlønarskipan, sum heimastýrið hevur yvirtikið eftir hesi skipan. Landsstýrið skal síðani rinda ríkiskassanum aftur tað, sum er vunnið í eftirlønarrætti eftir yvirtøkuna.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	815	870	1.062	1.300	1.300	1.450
01. Danskar eftirlønir						
Útreiðslur	**815**	**870**	**1.062**	**1.300**	**1.300**	**1.450**
51. Tilskot til útlandið o.a.	815	870	1.062	1.300	1.300	1.450

3.18.2.07. Eftirløn landsstýrismanna (Lógarbundin játtan)

Eftirløn verður goldin landsstýrismonnum, ið hava rætt til eftirløn sambært løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., seinast broytt við Ll.nr. 65 frá 18. mai 2006.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	690	781	722	900	910	910
01. Landsstýrismenn						
Útreiðslur	**690**	**781**	**722**	**900**	**910**	**910**
52. Tilskot til einstaklingar	689	781	722	900	910	910
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-

3.18.3. Aðrar starvsfólkaútreiðslur

3.18.3.04. Lønarforskot (Onnur játtan)

Talan er um lønarforskot, sum tænastumenn hava rætt til sambært § 41 í tænastumannalógini, og sum verður veitt sum lán.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	35	-	0	50	50	50
Inntøkujáttan	72	44	21	50	50	50
01. Forskot						
Útreiðslur	**35**	**-**	**0**	**50**	**50**	**50**
82. Útlán v.m.	35	-	0	50	50	50
Inntøkur	**72**	**44**	**21**	**50**	**50**	**50**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*72*	*44*	*21*	*50*	*50*	*50*

Almannamál

3.21.2. Útgjaldsskipanir

3.21.2.01. Stuðul til flutning og dupult húsarhald (Lógarbundin játtan)

Sambært løgtingslóg nr. 93 um stuðul til ferðaútreiðslur og løgtingslóg nr. 95 um stuðul til dupult húsarhald, báðar frá 6. juni 1997 við seinni broytingum, verður stuðul veittur fólki, sum í sambandi við arbeiði hava útreiðslur til ferðing ella uppihald. Stuðulin verður ásettur samb. kunngerð nr. 88 frá 7. september 2006 um stuðul til ferðaútreiðslur og útreiðslur til dupult húsarhald.

Metta nýtslan í 2006 er 12 mió. kr. Roknað verður við, at nýtslan í 2007 verður 12,5 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	10.939	11.232	11.634	12.000	12.500	12.500
01. Stuðul						
Útreiðslur	**10.939**	**11.232**	**11.634**	**12.000**	**12.500**	**12.500**
52. Tilskot til einstaklingar	10.939	11.232	11.634	12.000	12.500	12.500

3.21.7. Sosialar skipanir

3.21.7.10. Útgjald úr Trygdargrunninum (Lógarbundin játtan)

Trygdargrunnurin virkar sambært løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. við seinni broytingum. Grunnurin hevur til endamáls at tryggja løntakarunum lønarkrøv í sambandi við, at arbeiðsgevari kemur í fíggjartrot, arbeiðsgevari doyr, ella fyritøka hansara heldur uppat vegna vantandi fíggjarligan førleika.

Mett verður, at útgjaldið úr Trygdargrunninum í mesta lagi verður 0,5 mió. kr. í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	22	172	178	500	500	500
Inntøkujáttan	2.059	-2	4	-	-	-
01. Útgjald úr Trygdargrunninum						
Útreiðslur	**22**	**172**	**178**	**500**	**500**	**500**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	2	-2	-	-	-
17. Avskrivingar o.a.	21	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	1	-	0	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	-	500	500	500
53. Stuðul til vinnu	-	168	180	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	-	2	0	-	-	-
Inntøkur	**2.059**	**-2**	**4**	**-**	**-**	**-**
61. Skattur og avgjøld	*0*	-	-	-	-	-
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	-	*-1*	-	-	-	-
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*2.059*	*0*	*4*	-	-	-

3.21.7.11. Umsiting av Trygdargrunninum (Rakstrarjáttan)

Frá 2007 at galda verður játtanin til umsiting av Trygdargrunninum flutt á høvuðskontuna hjá Toll- og skattstovu Føroya.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	216	200	175	225	-	-
Útreiðslur	216	200	175	225	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	216	200	175	225	-	-
Útreiðslur	**216**	**200**	**175**	**225**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	86	99	77	225	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	129	101	99	-	-	-

Íbúðarmál

3.22.4. Útgjaldsskipanir

3.22.4.01. Stuðul til rentuútreiðslur (Lógarbundin játtan)

Sambært løgtingslóg nr. 148 frá 30. desember 1996 um stuðul til rentuútreiðslur av lánum, verður stuðul latin svarandi til 40% av rentuútreiðslunum av lánum til egnan bústað, útbúgving og gjalda aftur virkin (effektiv) veðhald. Av hesum stuðuli lata kommunurnar 13 av 40%.

Fíggjarmálaráðið og Toll- og Skattstova Føroya hava gjørt avtalu við Danmarks Rederiforening um, at Udligningsfonden endurrindar part av rentustuðlinum fyri teir føroyingar, sum sigla undir D.I.S. 2005 var fyrsta árið, at Udligningsfonden endurrindaði fyri rentustuðul.

Nettonýtslan í 2006 er pr. 1. desember mett til 58 mió. kr., sum er 11,5 mió. kr. hægri enn á fíggjarlógini fyri 2006. Hækkingin skyldast hægri rentustigi, øktari lánsmongd og seinni niðurgjalding av skuld. Roknað verður einari nettonýtslu uppá 66,7 mió. kr. í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 *Æ*
Útreiðslujáttan	86.494	83.538	84.203	68.800	100.000	103.000
Inntøkujáttan	28.069	27.152	27.775	22.300	33.300	34.300
01. Rentustuðul						
Útreiðslur	**86.494**	**83.538**	**84.203**	**68.800**	**100.000**	**103.000**
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	3	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	86.494	83.538	84.200	68.800	100.000	103.000
Inntøkur	**28.069**	**27.152**	**27.775**	**22.300**	**33.300**	**34.300**
77. Flyting frá kommunum	*28.069*	*27.152*	*27.775*	*22.300*	*33.300*	*34.300*

Sjóvinna

3.35.1. Ymsar útreiðslur

3.35.1.05. FAS-endurgjald (Onnur játtan)

FAS-endurgjald verður latið sambært § 63 a í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum. Løntakarar í FAS-skipanini eru skattskyldugir í Føroyum, og hava tænastu umborð á skipi, sum er skrásett, ella er javnmett við skrásett skip, í Føroysku Altjóða Skipaskránni FAS. Arbeiðsgevarar, sum koma undir skipanina, skulu hava ein prosentpart av teimum útgoldnu lønunum endurgoldnan. Parturin er í løtuni 28%, sum er ásett í kunngerð nr. 6 frá 15. februar 1996 um ásetan av afturberingarprosentinum til reiðaravirkir, sum hava skip, ið eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni FAS. Endurgjaldið verður sambært § 83 a í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt ásett til at vera í sama lutfalli, sum skatturin annars, t.e. umleið 55% til landið og 45% til kommunurnar.

Mett verður, at útreiðslurnar hjá landinum í 2007 verða góðar 44 mió. kr. aftaná endurgjald frá kommununum. Hetta er væl meira enn upphæddin á fíggjarlógini fyri 2006, og stendst hetta serliga av tveimum orsøkum: Fyri tað fyrsta var lógin um FAS-endurgjald broytt í Ll. nr. 136 frá 12. desember 2006 (aftaná at fíggjarlógin 2006 var løgd fram), og førdi henda lógarbroyting til, at landið fær allar inntøkur, men tó eisini allar útreiðslur í samband við endurgjald fyri útlendingar. Hetta vaks um bruttoskattainntøkurnar hjá landinum, men eisini um landsins part av endurgjaldinum til reiðaríir í skipanini. Fyri tað næsta er FAS-skipanin vaksin fitt seinasta árið, og meðan A-inntøkurnar í FAS-skipanini í januar-august 2005 vóru 100 mió. kr., vóru tær 130 mió. kr. í sama tíðarskeiði í 2006. Hetta ger, at landsins FAS-inntøkur, men eisini útreiðslur til FAS-endurgjald, vaksa nógv.

Í fíggjarlógini fyri 2007 eru gjørdar tvær nýggjar undirkontur, nevniliga eina fyri FAS-endurgjald fyri føroyingar og eina fyri endurgjald fyri útlendingar. Hetta, saman við nýggjari undirkontu fyri FAS-skattainntøkur frá útlendingum á høvuðskontu 20.52.1.01. Vanligur landsskattur, ger tað væl lættari at síggja gongdina á og samanhang millum FAS-skattainntøkur á grein 20 og FAS-endurgjald á grein 3. Gjøgnumskygni í skattaskipanini vil tí bøtast munandi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	37.636	36.375	44.364	43.800	59.900	59.900
Inntøkujáttan	16.941	16.029	19.967	19.600	15.700	15.700
01. FAS-endurgjald						
Útreiðslur	**37.636**	**36.375**	**44.364**	**43.800**	**-**	**-**
53. Stuðul til vinnu	37.636	36.375	44.364	43.800	-	-
Inntøkur	**16.941**	**16.029**	**19.967**	**19.600**	**-**	**-**
77. Flyting frá kommunum	*16.941*	*16.029*	*19.967*	*19.600*	-	-

02. FAS-endurgjald, føroyingar						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**-**	**31.700**	**31.700**
53. Stuðul til vinnu	-	-	-	-	31.700	31.700
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**-**	**15.700**	**15.700**
77. Flyting frá kommunum	-	-	-	-	*15.700*	*15.700*
03. FAS-endurgjald, útlendingar						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**-**	**28.200**	**28.200**
53. Stuðul til vinnu	-	-	-	-	28.200	28.200

§ 5 Fiskivinna

Felagsútreiðslur

5.11.1. Fyrisiting

5.11.1.05. Fiskimálaráðið (Rakstrarjáttan)

Høvuðskontan fyri Fiskimálaráðið fatar um Aðalskrivstovuna og Fiskivinnustovuna. Harumframt fatar høvuðskontan um edv-verkætlanir.

Fiskimálaráðið er stjórnardeild landsstýrisins innan ávís málsøki. Uppgávur ráðsins mótvegis landsstýrismanninum í fiskivinnumálum í hesum sambandi eru m.a.:

- Fyrireiking og eftirlit við lógum, kunngerðum og reglugerðum
- Ráðgeving og málsviðgerð innan fiskivinnu- og sjóvinnumál
- Samskipan av tvørgangandi málum í Fiskimálaráðnum

Fiskimálaráðið er í síni heild fyriskipað soleiðis:

- Fiskimálaráðið, harundir aðalskrivstovan og fiskivinnustovan
- Fiskiveiðieftirlitið, herundir eisini veðurtænasta, eygleiðaraskipan og tyrlusáttmálin við Atlantic Airways
- Lønjavningarstovan
- Fiskirannsóknarstovan
- Skipaeftirlitið, herundir eisini sjóvinnufyrisiting
- Skipaskrásetingin
- Trygdarmiðstøðin
- Tilbúgving, herundir tilbúgvingarsamskipan, Brunaumsjón landsins, Sjóbjarging, Neyð- og trygdartænasta og bjargingarfeløg

Fiskimálaráðið umsitur málsøki í fiskivinnu- og sjóvinnulóggávuni. Herumframt er tilbúgvingareind skipað.

Fiskimálaráðið fyrireikar og hevur eftirlit við lógum, kunngerðum og reglugerðum, so sum reglur um fiskidagaskipan, kvotur og veiðirættindi á heima-, nær- og fjarleiðum. Reglur um útlendska fiskiveiði á føroysku landleiðunum. Veiði- og fiskiloyvisskipanin á føroysku landleiðunum og aðrastaðni enn á landleiðunum. Sínámillum fiskiveiðiavtalur og millumlandasamstarv stýra fiskiveiði aðrastaðni enn á landleiðunum.

Heimildin at umsita málsøkið millumtjóða samráðingar og avtalur um fiskivinnu varð 1. september 2006 flutt frá Løgmanni til Landsstýrismannin í fiskivinnumálum. Í hesum sambandi er starvsfólk flutt úr Løgmansskrivstovuni til Fiskimálaráðið.

Ráðið umsitur sjóvinnumál við tí høvuðsmálsetningi at veita holla ráðgeving í sjóvinnumálum til tess at tryggja, at millumtjóðasáttmálar, egintjóða lóggáva í hesum felagsmálum og sermálum verður framd, og at eftirlit er við hesum reglum, til tess at verja

mannalív og ognir á sjónum, verja havumhvørvið og at haldgóð trygd er fyri, at tey sum starvast í hesi vinnu hava dyggan førleika til hetta arbeiðið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	12.185	13.596	13.342	13.264	14.018	14.376
Útreiðslur	13.370	14.738	15.713	13.764	14.518	14.876
Inntøkur	1.185	1.142	2.371	500	500	500
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	11.434	12.932	12.756	12.464	13.418	13.670
Útreiðslur	**12.424**	**13.862**	**15.126**	**12.964**	**13.918**	**14.170**
11. Lønir v.m.	6.845	8.664	8.025	8.777	9.412	9.573
14. Keyp av vørum og tænastum	3.964	3.630	4.479	2.527	2.846	2.903
15. Keyp av útbúnaði, netto	442	365	498	460	460	470
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.157	1.148	1.303	1.200	1.200	1.224
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	15	6	2	-	-	-
53. Stuðul til vinnu	-	-	820	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	50	0	-	-	-
Inntøkur	**990**	**931**	**2.371**	**500**	**500**	**500**
21. Søla av vøru og tænastum	*1*	*1*	*2*	*500*	*500*	*500*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*989*	*930*	*1.549*	-	-	-
85. Søla av virðisbrøvum	-	-	*820*	-	-	-
23. EDV-verkætlan						
Nettoútreiðsla	738	664	586	800	600	706
Útreiðslur	**933**	**875**	**586**	**800**	**600**	**706**
14. Keyp av vørum og tænastum	727	530	206	400	300	306
15. Keyp av útbúnaði, netto	206	346	281	400	300	400
53. Stuðul til vinnu	-	-	100	-	-	-
Inntøkur	**195**	**211**	**-**	**-**	**-**	**-**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*195*	*211*	-	-	-	-
24. Brunaumsjón landsins						
Nettoútreiðsla	14	-	-	-	-	-
Útreiðslur	**14**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	14	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	3,0	5,0	5,0	5,0	3,0	3,0
Onnur	18,0	19,0	17,0	18,0	20,0	20,0
Fulltíðarstørv	21,0	24,0	22,0	23,0	23,0	23,0
Lønarpartur (mió. kr.)	6,8	8,7	8,0	8,8	9,4	9,6

5.11.1.15. Viðlíkahald (Rakstrarjáttan)

Játtanin er til at røkja og tillaga bygningarnar, sum Fiskimálaráðið nýtir

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.		2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan		1.025	797	583	600	600	612
Útreiðslur		1.025	797	583	600	600	612
20.	**Viðlíkahald**						
	Nettoútreiðsla	1.025	797	583	600	600	612
	Útreiðslur	**1.025**	**797**	**583**	**600**	**600**	**612**
14.	Keyp av vørum og tænastum	46	115	405	150	150	153
15.	Keyp av útbúnaði, netto	198	26	99	250	250	255
16.	Leiga, viðlíkahald og skattur	164	616	79	200	200	204
31.	Bygging og løguframleiðsla	504	40	-	-	-	-
71.	Innanh. flyt. millum almennar stovn.	114	-	-	-	-	-

5.11.1.34. Granskingarætlanir (Rakstrarjáttan)

Fiskimálaráðið hevur lagt stóran dent á at styrkja og menna gransking og menning í føroysku fiskivinnuni. Tað eru 3 granskingarkjarnar stovnssettir á trimum ymiskum fakøkjum: veiðitøkni, framleiðslutøkni og biotøkni. Henda skipan skal menna føroyska fiskivinnugransking ástøðiliga og granskingarumhvørvið sum heild. Málið er at bjóða fiskivinnuni og fiskiídnaðinum munadygga gransking.

Játtanin á hesi høvuðskontu fer til tær 3 kjarnurnar við hvør sínum leiðara, og samskiparan innan fiskivinnugransking.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.960	3.324	3.327	3.450	3.450	3.512
Útreiðslur	1.960	3.324	3.327	3.450	3.450	3.512
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	1.960	3.324	3.327	3.450	3.450	3.512
Útreiðslur	**1.960**	**3.324**	**3.327**	**3.450**	**3.450**	**3.512**
11. Lønir v.m.	1.237	2.309	2.488	2.600	2.600	2.645
14. Keyp av vørum og tænastum	405	234	187	850	850	867
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	2	59	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	13	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	306	780	593	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	2,0	4,0	4,0	4,0	4,0	4,0
Onnur	-	-	-	-	-	-
Fulltíðarstørv	2,0	4,0	4,0	4,0	4,0	4,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,2	2,3	2,5	2,6	2,6	2,6

5.11.1.45. Søla av bygningi hjá Fiskimálaráðnum (Løgujáttan)

Fiskimálaráðið seldi í 2006 bygningin í Jónas Broncksgøtu, har sum Skipaeftirlitið helt til, áðrenn málsøkið varð yvirtikið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	-	-	-	2.000	-	-
10. Søla av bygningi hjá Fiskimálaráðnum						
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**2.000**	**-**	**-**
42. Søla av løgu o.ø.	-	-	-	*2.000*	-	-

Tilbúgving

5.31.1. Tilbúgving

5.31.1.01. Tilbúgvingarsamskipanin (Rakstrarjáttan)

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur gjørt av at savna játtanir, sum viðvíkja trygd og tilbúgving. Talan er um játtanir, sum áður hava verið hjá ráðnum ella hjá Fiskiveiðieftirlitinum. Samstundis hevur landsstýrismaðurin gjørt av at samskipa virksemið hjá teimum rakstrareindunum, sum ídag húsast á Tinghúsvegi 64, tvs. Brunaumsjón landsins, MRCC (Sjóbjargingarstøðin), Neyð- og trygdartænastan (Tórshavn Radio) og Tilbúgvingin, í ein tilbúgvingarstovn. Hetta er gjørt fyri at styrkja tilbúgvingarpartin, nú málsøkið tilbúgving eftir ætlan verður yvirtikið 1. januar 2007.

Vanligt virksemi
Málsøkið fevnir eftir yvirtøkuna um at skipa og samskipa tilbúgvingarpartin, sum hoyrir til málsøkið, umframt at menna samstarvið millum myndugleikar, stovnar, sjálvboðin, fyritøkur og onnur, sum eiga sín lut í einari væl virkandi tilbúgving. Eisini røkir stovnurin tilbúgivngarskyldur Føroya í altjóða samstarvinum.

Í fíggjarætlanini fyri 2007 er tilbúgvingin móti dálking á sjónum, umframt yvirtøkan av málsøkinum, raðfest. Viðvíkjandi tilbúgving móti olju- og kemikaliudálking á sjónum stendur landið á at kalla berum. Tí skal orka nú setast av at lýsa, greina og dimensjonera tilbúgvingina á sjónum og fram við strendurnar. Eisini verður yvirtøkan av málsøkinum raðfest, við tað at nýggj lóggáva skal setast í gildi við árslok, sum fer at áseta karmarnar fyri komandi tilbúgving í landinum.

Brunaumsjón Landsins
Brunaumsjón Landsins virkar eftir Løgtingslóg um eldsbruna o.a. nr. 78 frá 12. juni 1986, og kunngerðum sambært lógini. Virkisøkið fevnir í høvuðsheitum um almennu trygdina í landinum í samstarvi við kommunurnar.

Í stuttum kunnu uppgávurnar hjá brunaumsjónini sigast at fevna um:

- Góðkenningar og eftirlit við sløkkiliðum, venjingum og útbúgvingum
- Vegleiðing í innsatsleiðslu í sambandi við eldsbruna og óhapp við vandamiklum evnum
- Eftirkanningar í sambandi við skaðar
- Góðkenning og eftirlit við gistingarhúsum, samkomuhúsum, ansingarstovnum, størri vinnubygningum o.t.
- Vegleiðing til landsstovnar, kommunur, løgreglu, tryggingar, prosjekteringsfeløg o.o. í sambandi við brunatrygd í bygningum
- Góðkenning og eftirlit við eldfimum virkjum, oljugoymslum, servicestøðum, gassgoymslum og flutningi av vandamiklum evnum
- Útgreining av tilfari til nýtslu í sambandi við brunatryggar byggihættir, byggitilfar, eldfimar goymslur o.a.

Á brunaumsjónini starvast 3 fólk, ein deildarstjóri og 2 málsviðgerar. Arbeiðsorkan er avmarkað, og er tað tískil neyðugt at økja lønarjáttanina, so at eitt fólk afturat kann verða sett

í 2007. Ætlanin er at brúka øktu arbeiðsorkuna til at styrkja um eftirlitið við ansingarstovnum og at økja um fyribyrgjandi arbeiðið.

Neyð- og trygdartænasta (Tórshavn Radio)
Tórshavn Radio hevur lurtiskyldu á VHF og MF og vaktarhald á DSC sambært altjóða viðtøkum frá ITU og IMO. Tórshavn Radio sendir m.a. siglinga- og veðurávaringar til skipaferðslu í økinum, umframt at avgreiða radiosamtalur millum skip og land. Eisini verður samskifti um læknahjálp og samskifti í sambandi við leiting og bjarging avgreitt. Tórshavn Radio og MRCC eru samanløgd og virka undir sama leiðara.

MRCC Tórshavn (Sjóbjargingarstøðin)
MRCC hevur ábyrgdina av at samskipa alla leiting og bjarging á føroyskum sjóøki. Hetta verður gjørt sambært altjóða viðtøkum, og eru avtalur gjørdar við grannalondini um hetta arbeiðið. Eisini eru avtalur gjørdar við teir partar, sum vanliga taka lut í leiting og bjarging, eitt nú Atlantic Helicopters, FRK og Fiskiveiðieftirlitið. MRCC tekur ímóti fráboðanum um dálking á sjónum, og skal samskipa arbeiðið við at leggja oljusperringar o.l. Somuleiðis hevur MRCC skyldu at taka ímóti og bera víðari boð um yvirgang umborð á skipum sambært ISPS kotuni. MRCC samskipar sjúkraflutning við tyrlu bæði á sjógvi og landi, og útvegar eisini fiskiveiðiumboð til oljufeløg, sum gera seismiskar kanningar á føroyskum øki.

Í september 2006 fingu MRCC og Tórshavn Radio ISO 9001 góðkenning. Talan er um eina skipaða góðskustýring av manna- og virkisgongdum. Fyri at góðkenningin frameftir skal styðja upp undir javnt góða góðsku og støðuga menning av virkseminum er neyðugt at raðfesta íbygt krøv sambært skipanini.

Bjargingarfeløg
Studningur til tey tíggju bjargingarfeløgini í Føroyum hevur verið býttur millum feløgini við teirri treyt, at tey føra roknskap/uppgerð yvir virksemið. Sambært reglugerð verður stuðulin serliga latin til at keypa bjargingarútgerð.

Lagt verður upp til, at Løgtingið árini 2007-2015 játtar 1,5 mió. kr árliga sum stuðul til keyp av bjargingarbátum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	14.474	12.342	13.683	14.284	18.030	18.319
Útreiðslur	14.490	12.504	13.877	14.564	18.310	18.599
Inntøkur	16	162	195	280	280	280
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	2.124	1.766	1.597	2.702	3.476	3.543
Útreiðslur	**2.129**	**1.766**	**1.597**	**2.732**	**3.506**	**3.573**
11. Lønir v.m.	605	944	651	1.392	1.416	1.441
14. Keyp av vørum og tænastum	906	733	707	1.200	1.950	1.989
15. Keyp av útbúnaði, netto	251	79	227	100	100	102
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	304	11	12	40	40	41
54. Stuðul til annað virksemi	63	-	-	-	-	-
Inntøkur	**5**	**-**	**-**	**30**	**30**	**30**
21. Søla av vøru og tænastum	*5*	-	-	*30*	*30*	*30*
21. Brunaumsjón Landsins						
Nettoútreiðsla	1.269	1.410	1.534	1.485	2.007	2.043
Útreiðslur	**1.269**	**1.410**	**1.534**	**1.485**	**2.007**	**2.043**
11. Lønir v.m.	1.003	1.010	941	1.250	1.722	1.752
14. Keyp av vørum og tænastum	123	366	384	175	225	229
15. Keyp av útbúnaði, netto	144	32	113	60	60	62
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	1	96	-	-	-
22. Neyð- og trygdartænasta (Tórshavn Radio)						
Nettoútreiðsla	6.199	4.192	4.642	4.378	4.894	4.987
Útreiðslur	**6.199**	**4.267**	**4.665**	**4.628**	**5.144**	**5.237**
11. Lønir v.m.	-	2.701	3.421	3.278	3.334	3.391
14. Keyp av vørum og tænastum	6.199	1.105	428	1.000	1.460	1.489
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	166	95	350	350	357
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	296	722	-	-	-
Inntøkur	**-**	**75**	**23**	**250**	**250**	**250**
21. Søla av vøru og tænastum	-	*75*	*23*	*250*	*250*	*250*
23. Sjóbjargingarstøðin (MRCC)						
Nettoútreiðsla	3.882	3.973	4.910	4.719	5.153	5.246
Útreiðslur	**3.893**	**4.060**	**5.081**	**4.719**	**5.153**	**5.246**
11. Lønir v.m.	3.051	3.127	3.651	3.730	3.794	3.859
14. Keyp av vørum og tænastum	677	800	1.290	881	1.251	1.276
15. Keyp av útbúnaði, netto	163	132	139	108	108	111
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1	1	1	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-
Inntøkur	**11**	**86**	**171**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*11*	*86*	*171*	-	-	-

24. Stuðul til Bjargingarfeløg

Nettoútreiðsla	1.000	1.000	1.000	1.000	2.500	2.500
Útreiðslur	**1.000**	**1.000**	**1.000**	**1.000**	**2.500**	**2.500**
54. Stuðul til annað virksemi	1.000	1.000	1.000	1.000	2.500	2.500

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	1,0	1,0	1,0
Onnur	4,0	2,5	1,5	1,8	1,8	1,8
Fulltíðarstørv	4,0	2,5	1,5	2,8	2,8	2,8
Lønarpartur (mió. kr.)	0,6	0,9	0,7	1,4	1,4	1,4

Starvsfólkayvirlit: 21 Brunaumsjón Landsins

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	2,0	2,0	2,0	2,0	3,0	3,0
Fulltíðarstørv	3,0	3,0	3,0	3,0	4,0	4,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,0	1,0	0,9	1,3	1,7	1,8

Starvsfólkayvirlit: 22 Neyð- og trygdartænasta (Tórshavn Radio)

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	-	8,0	8,0	8,0	8,0	8,0
Fulltíðarstørv	-	8,0	8,0	8,0	8,0	8,0
Lønarpartur (mió. kr.)	-	2,7	3,4	3,3	3,3	3,4

Starvsfólkayvirlit: 23 Sjóbjargingarstøðin (MRCC)

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	8,0	8,0	8,0	9,0	9,0	9,0
Fulltíðarstørv	8,0	8,0	8,0	9,0	9,0	9,0
Lønarpartur (mió. kr.)	3,1	3,1	3,7	3,7	3,8	3,9

5.31.1.04. Tilbúgvingarætlan (Løgujáttan)

Fyri at hava eftirlit við hvørji skip eru í Føroyskum sjóøki verður AIS-skipan sett upp. Somuleiðis er neyðugt at byggja VHF-sendinetið út soleiðis at VHF verður at hoyra í flestu støðum kring oyggjarnar. Samlaði íløgutørvurin uppá 9 mió. kann greinast soleiðis:

- Útbygging av VHF-sendinetinum 5 mió.
- AIS-skipan 4 mió.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	218	-	-	12.100	9.000	3.000
10. Tilbúgvingarætlan						
Útreiðslur	**218**	**-**	**-**	**12.100**	**9.000**	**3.000**
15. Keyp av útbúnaði, netto	209	-	-	12.100	9.000	3.000
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	9	-	-	-	-	-

Fiskivinna

5.34.1. Ymsar útreiðslur

5.34.1.01. Fiskivinnuráð og nevndir (Rakstrarjáttan)

Játtanin verður nýtt til fastar nevndir og nevndir settar til ávís onnur endamál. Nevnd til endurskoðan av lógini um vinnuligan fiskiskap er tikin av. Harumframt verður játtanin nýtt til sakkøna hjálp til ráð og nevndir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	417	331	922	1.000	450	458
Útreiðslur	417	331	922	1.000	450	458
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	417	331	922	1.000	450	458
Útreiðslur	**417**	**331**	**922**	**1.000**	**450**	**458**
11. Lønir v.m.	110	202	512	1.000	450	458
14. Keyp av vørum og tænastum	306	129	410	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	0	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-

5.34.1.04. Upplýsing um grind (Rakstrarjáttan)

Játtanin verður nýtt til at gera upplýsandi tilfar um grind, at gjalda fyri at møta á fundum í NAMMCO og á øðrum hvalafundum og luttøku annars í arbeiðinum hjá NAMMCO. Játtanin verður eisini brúkt til frameftir at gera betri grindarakstur.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	359	282	253	325	325	331
Útreiðslur	359	282	253	325	325	331
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	359	282	253	325	325	331
Útreiðslur	**359**	**282**	**253**	**325**	**325**	**331**
11. Lønir v.m.	0	-	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	358	280	226	325	325	331
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	28	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	2	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	-1	-	-	-

5.34.1.05. Hvalagransking og hvalateljing v.m. (Rakstrarjáttan)

Játtanin hevur til endamáls at gjalda fyri hvalagranskingar og hvalateljingar. Í 2007 verður ein Trans-Norðuratlantisk hvalateljing (**T**rans **N**orth **A**tlantic **S**ighting **S**urvey - **TNASS)** millum Føroyar, Noreg, Ísland, Grønland, Kanada og Russland. Hetta er framhald av kanningum í 1987, 1989, 1995 og 2001. Føroyar hava gjøgnum samstarvið í NAMMCO bundið seg til at luttaka í hesum kanningum, sum geva týðandi upplýsingar um stødd og útbreiðslu av hvalastovnum í øllum Norðuratlantshavi. Føroyar skulu skipa fyri eini rannsókn við skipi í ein mánað, har hvalateljingar skulu gerast.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.004	808	848	870	2.420	918
Útreiðslur	1.004	808	848	870	2.420	918
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	1.004	808	848	870	2.420	918
Útreiðslur	**1.004**	**808**	**848**	**870**	**2.420**	**918**
11. Lønir v.m.	665	702	749	800	800	814
14. Keyp av vørum og tænastum	328	86	95	50	1.600	83
15. Keyp av útbúnaði, netto	10	20	4	20	20	21
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	0	1	0	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Fulltíðarstørv	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Lønarpartur (mió. kr.)	0,7	0,7	0,7	0,8	0,8	0,8

5.34.1.07. Limagjald í altjóða felagsskapum (Onnur játtan)

Játtanin fer til at gjalda limagjald Føroya í altjóðafelagsskapunum: ICES, NEAFC, NAFO, NAMMCO og NASCO.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	1.297	686	1.341	1.200	1.200	1.200
01. Limagjald						
Útreiðslur	**1.297**	**686**	**1.341**	**1.200**	**1.200**	**1.200**
14. Keyp av vørum og tænastum	1	1	1	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-4	13	-11	-	-	-
51. Tilskot til útlandið o.a.	1.300	673	1.351	1.200	1.200	1.200

5.34.1.10. Lønjavningarstovan (Rakstrarjáttan)

Lønjavningarstovan er fyrisitingarliga skipað í Fiskimálaráðnum og virkar undir ásetingum í løgtingslóg nr. 73 frá 23. mai í 1997 um Lønjavningargrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 7. desember í 1998.

Lønjavningarstovan fyrisitur skipanir viðvíkjandi minstuløn, dagstudningi og minstaforvinningi o.ø. og aðrar skipanir tengdar at fíggjarviðurskiftum fiskimanna:

- inntøkutrygd fiskimanna,
- sjúkratrygd,
- flutningsstuðul,
- skráseting av føroyskum avreiðingartølum og føroyskar mynstringar.
- Forskotsgrunn Fiskiflotans

Lønjavningarstovan umsitur harumframt Hjálpargrunn til óarbeiðsførar fiskimenn. Stuðul verður latin Hjálpargrunninum fyri óarbeiðsførar fiskimenn, sum er grunnur hjá Føroya Fiskimannafelag. Grunnurin hevur til endamáls at veita stuðul til sjómenn, ið eru vorðnir óarbeiðsførir av sjúku ella skaða á sjónum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	2.841	2.748	2.748	2.752	2.792	2.840
Útreiðslur	3.156	2.948	2.948	2.952	2.992	3.040
Inntøkur	314	200	200	200	200	200
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	2.226	2.448	2.448	2.452	2.492	2.540
Útreiðslur	**2.540**	**2.648**	**2.648**	**2.652**	**2.692**	**2.740**
11. Lønir v.m.	1.868	1.946	1.837	2.342	2.382	2.423
14. Keyp av vørum og tænastum	71	258	220	200	200	204
15. Keyp av útbúnaði, netto	231	41	168	110	110	113
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	27	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	371	376	422	-	-	-
Inntøkur	**314**	**200**	**200**	**200**	**200**	**200**
21. Søla av vøru og tænastum	*200*	*200*	*200*	*200*	*200*	*200*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*114*	-	-	-	-	-
21. EDV-verkætlan						
Nettoútreiðsla	316	-	-	-	-	-
Útreiðslur	**316**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	5	-	-	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	2	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	309	-	-	-	-	-
22. Hjálpargrunnur fyri óarbeiðsførar fiskimenn						
Nettoútreiðsla	300	300	300	300	300	300
Útreiðslur	**300**	**300**	**300**	**300**	**300**	**300**
54. Stuðul til annað virksemi	300	300	300	300	300	300

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	8,0	7,0	7,0	7,0	6,0	6,0
Fulltíðarstørv	9,0	8,0	8,0	8,0	7,0	7,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,9	1,9	1,8	2,3	2,4	2,4

5.34.2. Tænasta og eftirlit

5.34.2.01. Fiskiveiðieftirlitið (Rakstrarjáttan)

Fiskiveiðieftirlitið virkar sambært løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars í 1994 um vinnuligan fiskiskap og er fyrisitingarliga skipað í Fiskimálaráðnum og fremur eftirlit, sum fyrisett í hesi lóg. Ásett er, at Fiskiveiðieftirlitið hevur dagliga eftirlitið við føroyskum fiskiførum, sum royna undir Føroyum ella aðrastaðni, og við útlendskum fiskiførum, ið royna undir Føroyum.

Fiskiveiðieftirlitið hevur dagliga eftirlitið við:

- veittum fiskiloyvum
- fiskidagaskipanini á heimaleiðum
- latnum og leigaðum fiskidøgum og kvotum
- kvotum hjá føroyskum skipum á fjarleiðum
- kvotum hjá føroyskum og útlendskum skipum undir Føroyum
- veiðidagbókaskipanini
- innvigingarskipanini
- at avreiðingarnar á virkjum í Føroyum og uttanlands samsvara við veiðidagbøkurnar

Fiskiveiðieftirlitið hevur eisini dagligu umsitingina við eygleiðaraskipanini á heima-, nær- og fjarleiðum eftir lógini um vinnuligan fiskiskap og eftir millumlanda- og altjóða avtalum, umframt fylgisveinaeftirlit við føroyskum og útlendskum skipum. Fiskiveiðieftirlitið undir Føroyum verður útint saman við donsku sjóverjuni eftir samstarvsavtalu, sum landsstýrið og ríkismyndugleikin hava góðkent.

Fiskiveiðieftirlitið hevur víðar heimildir eftir lógini um vinnuligan fiskiskap, umframt heimild at krevja avgreiðslugjøld, sum landsstýrið hevur ásett. Fiskiveiðieftirlitið hevur 2 vaktarskip og ein lítlan vaktarbát. Vaktarskipini hava eftirlit undir Føroyum, í NAFO og NEAFC økjunum. Brimil verður brúktur til sigling við næmingum partar av árinum.

Játtanin er í 2007 hækkað við 374 tús. kr. Raðfestar eru 1 mió. kr. til at sandblása Tjaldrið og Brimil umframt at eitt eftirlitsfólk skal setast afturat. Játtanin til keyp av útbúnaði lækkar 900 tús. kr. og játtanin til eygleiðaraskipanina er lækkað við 400 tús. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	40.811	36.230	37.854	39.615	39.989	39.772
Útreiðslur	41.486	38.871	41.513	42.115	42.489	42.272
Inntøkur	676	2.641	3.660	2.500	2.500	2.500
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	40.493	35.801	36.062	37.625	38.399	38.145
Útreiðslur	**41.169**	**38.442**	**39.722**	**40.125**	**40.899**	**40.645**
11. Lønir v.m.	20.910	22.394	21.542	23.742	24.416	24.832
14. Keyp av vørum og tænastum	17.259	13.652	15.840	13.443	14.443	13.732
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.842	1.196	1.162	2.400	1.500	1.530
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	539	480	475	540	540	551
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-1	-4	-1	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	619	724	704	-	-	-
Inntøkur	**676**	**2.641**	**3.660**	**2.500**	**2.500**	**2.500**
21. Søla av vøru og tænastum	*676*	*2.641*	*3.660*	*2.500*	*2.500*	*2.500*
21. Veðurtænasta						
Nettoútreiðsla	317	430	435	430	430	439
Útreiðslur	**317**	**430**	**435**	**430**	**430**	**439**
14. Keyp av vørum og tænastum	317	430	435	430	430	439
24. Eygleiðaraskipan						
Nettoútreiðsla	-	-	1.357	1.560	1.160	1.188
Útreiðslur	**-**	**-**	**1.357**	**1.560**	**1.160**	**1.188**
11. Lønir v.m.	-	-	1.311	1.360	1.085	1.109
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	46	200	75	79

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.) Endaligt	**41.169**	**38.442**	**39.722**	**40.125**	**40.899**	**40.645**
1. Leiðsla og hjálparfunktiónir (EDV, løgfrøði, reingerð o.a.	2.805	2.771	2.781	2.809	2.863	2.845
2. Fiskiveiðieftirlit	30.959	28.545	29.791	30.093	30.674	30.483
3. Bjargingartænastan	4.199	3.959	3.972	4.013	4.090	4.065
4. Hjálparveitingar	3.206	3.167	3.178	3.210	3.272	3.252

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	61,0	60,0	60,0	60,0	61,0	61,0
Fulltíðarstørv	62,0	61,0	61,0	61,0	62,0	62,0
Lønarpartur (mió. kr.)	20,9	22,4	21,5	23,7	24,4	24,8

Starvsfólkayvirlit: 24 Eygleiðaraskipan

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	-	-	4,0	4,0	3,0	3,0
Fulltíðarstørv	-	-	4,0	4,0	3,0	3,0
Lønarpartur (mió. kr.)	-	-	1,3	1,4	1,1	1,1

5.34.2.02. Nýtt vaktarskip (Løgujáttan)

Ætlanin er at fáa nýtt vaktarskip fyri Tjaldrið. Fyrireikingarnar eru lidnar, og klárt er at bjóða út. Ongin peningur er avsettur í 2007, men fyrireikingararbeiðið heldur tó fram. Tjaldrið er gamalt og treingir til stórar ábøtur, um tað skal haldast í vinnu. Arbeitt verður fram ímóti at byrja at byggja nýtt skip fyri Tjaldrið í 2008.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	224	-4	203	-	-	15.000
10. Vaktarskip						
Útreiðslur	**224**	**-4**	**203**	**-**	**-**	**15.000**
11. Lønir v.m.	-	-	32	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	224	0	158	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	12	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-5	-	-	-	-
32. Útvegan av løgu o.ø.	-	-	-	-	-	15.000

5.34.2.05. Fiskiveiðieftirlit (Rakstrarjáttan)

Sáttmáli er gjørdur við Atlantic Airways at veita tyrlutænastu, ið fatar um:

1. Leiting og bjarging (Search & Rescue) í føroyskum sjógvi. Fiskiveiðieftirlitið stendur fyri arbeiðinum.
2. Eftirlitsflúgving í føroyskum sjógvi fyri Fiskiveiðieftirlitið.
3. Leiting og bjarging á landi fyri Fiskiveiðieftirlitið.
4. Sjúkraflutningur fyri Sjúkrahúsverkið.
5. Bráðfeingis sjúkrahjálp og stuðul í sambandi við óhapp, tá ið neyðugt er skjótt at fáa hjálp á land.

Atlantic Airways hevur tilbúgving alt samdøgrið við tveimum tyrlum. Fiskiveiðieftirlitið samskipar virksemið, men onnur ráð og stovnar nýta eisini tyrlurnar eftir nærri avtalu, t.d. sjúkraflutningur.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	14.000	14.000	14.000	14.000	14.000	14.000
Útreiðslur	14.000	14.000	14.000	14.000	14.000	14.000
20. Tyrlutænasta						
Nettoútreiðsla	14.000	14.000	14.000	14.000	14.000	14.000
Útreiðslur	**14.000**	**14.000**	**14.000**	**14.000**	**14.000**	**14.000**
14. Keyp av vørum og tænastum	14.000	14.000	14.000	14.000	14.000	14.000

5.34.3. Gransking og menning

5.34.3.01. Fiskirannsóknarstovan (Rakstrarjáttan)

Fiskirannsóknarstovan er vísindaligur stovnur í Fiskimálaráðnum. Stovnurin skal kanna og fylgja gongdini í fiskastovnum og øðrum livandi tilfeingi í føroyskum havøki, umframt har Føroyar hava áhugamál. Stovnurin skal kanna náttúruviðurskifti, fiskiskap og annað, sum kann ávirka tilfeingið. Grundað á kanningarúrslit og eygleiðing av gongdini skal stovnurin lata landsstýrinum upplýsingar viðvíkjandi støðuni í fiskastovnunum og vísindaliga grundaðar tilráðingar og metingar samsvarandi endamálinum í lógini um vinnuligan fiskiskap (løgtingslóg nr. 28. frá 10. mars 1994 við seinni broytingum). Stovnurin skal ráðgeva landsstýri, vinnulívi, áhugafeløgum og føroyingum yvirhøvur í spurningum um burðardygga gagnnýtslu av livandi tilfeinginum í sjónum og um árinið á stovnarnar frá tí fysiska og lívfrøðiliga umhvørvinum.

Á hvørjum ári skal Fiskirannsóknarstovan innan 15. juni lata landsstýrismanninum frágreiðing um støðuna í teimum fiskastovnum, sum verða gagnnýttir á føroysku landleiðunum, millum annað serliga teimum, sum eru undir fiskidagaskipanini.

Undirkonta 5.34.3.01.20. Vanligt virksemi. Broytingar í havumhvørvinum við Føroyar ávirka nógv vistfrøðina og livilíkindini hjá fiskastovnunum undir Føroyum. Fiskirannsóknarstovan hevur síðstu árini lagt og fer framyvir, um fíggjarligu karmarnir loyva hesum, at leggja størri orku í at talfesta hesar broytingar og hesa ávirkan, sum verður tikin við í metingarnar av fiskastovnunum.

Ásannað er, at neyðugt er við kunning um havtilfeingi og -umhvørvi okkara. Fiskirannsóknarstovan miðar alsamt eftir við tiltøkum og í vanliga virksemi sínum í størri mun at fáa tað nógva tilfar, sum á hvørjum ári verður savnað inn, út til fiskimenn og almenning sum heild.

Í 2007 er játtanin hækkað við 530 tkr. til frøðing at kanna vistfrøðina hjá ferðandi stovnum, sum vit eiga í felag við grannalond.

Undirkonta 5.34.3.01.22. Ferðing og atburður hjá toski er ein verkætlan, har hugt verður at, hví toskastovnurin á landgrunninum er so nógv broyttur. Í verkætlanini verður kannað, um toskastovnurin á landgrunninum er ein stovnur fyri seg, ella um toskur undir serligum umstøðum kemur í føroyskan sjógv og eisini fer úr føroyskum sjógvi, og um atburður hjá toski av fiskireiðskapi verður ávirkaður av broytingum í føðitilgongdini. Ein stórur partur av játtanini fer til at merkja tosk á landgrunninum.

Undirkonta 5.34.3.01.23. Fuglakanningarstøð er til eftirlitskanningar viðvíkjandi sjófuglameinginum í Føroyum, serliga lomviga og lunda, og at kanna sambandið millum sjófugl og fisk. Fuglakanningarstøðin er mannað við einum fuglafrøðingi í føstum starvi.

Undirkonta 5.34.3.01.24. Varðveitan av fjølbroyttum flota er játtan, sum er heimilað í løgtingslóg nr. 72 frá 20. mai 1996, har stuðul kann verða givin at varðveita fjølbroyttan fiskiflota. Ein fastur táttur hevur verið rækjufiskiskapurin á NAFO-leiðunum. Á hvørjum ári fram til 2003 hava royndir verið gjørdar, sum hava havt til endamáls at tryggja Føroyum vísindaligt grundarlag undir framhaldandi fiskiskapi. Eisini kann játtanin nýtast til at gjalda eygleiðaraskipanir uttan fyri føroysku landleiðirnar. Samtykt varð at flyta hesa játtan í 2006 frá egnari høvuðskonto (5.34.4.13) til Fiskirannsóknarstovuna við serstakari undirkontu. Játtanin skal eisini kunna nýtast at gera kanningar í økjum uttanfyri 200 fjórðingar, har føroysk skip hava áhugamál t.d. í altjóða sjógvi norðanfyri Føroyar, har fiskiskapur av kongafiski hevur tikið seg upp síðani 2005.

Undirkonta 5.34.3.01.40. Inntøkufíggjað virksemi fevnir um verkætlanir, sum verða fíggjaðar av øðrum enn játtan frá Landskassanum. Talan er í flestu førum um verkætlanir, sum verða umbidnar av fyritøkum o.ø. ella sum liður í at menna førleikan í hesum sambandi. Í øðrum førum er stovnurin partur av verkætlanum saman við øðrum stovnum v.m.

Hesar verkætlanir hava síðstu árini eisini verið við til, at stovnurin í størri mun hevur rokkið sínum setningi, ásannandi at fíggjarlógarjáttanin er avmarkað. M.a. hava umhvørviskanningar verið fíggjaðar av fyritøkum, Norðurlandaráðnum v.m., umframt at Ph.D.-lestur í fleiri førum er knýttur at hesum verkætlanum.

Undirkonta 5.34.3.01.45. Verkætlanir v.m. fevna um verkætlanir, sum verða fíggjaðar av Fiskivinnuroyndum v.m. Fiskirannsóknarstovan fremur fleiri týðandi royndir í samstarvi við vinnu, einstaklingar v.m. í Føroyum og útlandinum.

Royndirnar hava stóran týdning fyri m.a. fiskivinnuna, men høvdu ikki verið framdar av einstøkum reiðaríum hvør sær. Fiskirannsóknarstovan samskipar hesar royndir og tryggjar eitt vísindaligt støði, samstarv við viðkomandi partar, umframt at úrslitini av royndunum koma allari vinnuni til góðar.

Í 2006 hevur verið arbeitt við hesum royndum í samstarvi við viðkomandi fyritøkur:

- vistfrøðiligur-búskaparligur myndil
- gullaksur
- kanning av koralløkjum
- innspræning av protein-isolati í fisk
- menning av stórmeskaðum flótitroli (Ph.D)
- listur á havtaskugørnum
- merking av havtasku
- útbreiðsla/atferð hjá laksi
- prikkafiskur
- rúsureiðsskapur
- gagnnýtsla av livur
- árinskanningar av skeljadregging
- støddarskiljing av rækjum

Einstakar av hesum royndum halda fram eftir 2006.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	10.781	11.471	9.861	11.076	11.763	12.017
Útreiðslur	18.681	18.455	18.350	16.467	17.154	17.408
Inntøkur	7.900	6.984	8.489	5.391	5.391	5.391
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	8.706	9.365	8.196	9.265	9.952	10.150
Útreiðslur	**9.926**	**10.745**	**9.978**	**10.631**	**11.318**	**11.516**
11. Lønir v.m.	7.976	8.835	8.350	9.182	9.869	10.037
14. Keyp av vørum og tænastum	1.446	1.549	1.391	1.193	1.193	1.217
15. Keyp av útbúnaði, netto	259	218	147	199	199	203
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	67	83	44	57	57	59
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-2	-1	1	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	179	61	45	-	-	-
Inntøkur	**1.220**	**1.380**	**1.782**	**1.366**	**1.366**	**1.366**
21. Søla av vøru og tænastum	*1.106*	*1.320*	*1.300*	*1.366*	*1.366*	*1.366*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	-	-	*482*	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	-	*60*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*114*	-	-	-	-	-

22. Ferðing og atburður hjá toski

	Nettoútreiðsla	655	638	662	663	663	676
	Útreiðslur	**655**	**638**	**662**	**663**	**663**	**676**
11.	Lønir v.m.	377	399	423	435	435	443
14.	Keyp av vørum og tænastum	173	172	180	228	228	233
16.	Leiga, viðlíkahald og skattur	0	-	0	-	-	-
19.	Ymsar rakstrarútreiðslur	105	67	59	-	-	-
71.	Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-

23. Fuglakanningarstøð

	Nettoútreiðsla	545	544	562	548	548	558
	Útreiðslur	**591**	**609**	**562**	**548**	**548**	**558**
11.	Lønir v.m.	529	530	501	476	476	485
14.	Keyp av vørum og tænastum	49	68	29	72	72	73
15.	Keyp av útbúnaði, netto	11	11	33	-	-	-
16.	Leiga, viðlíkahald og skattur	2	0	0	-	-	-
	Inntøkur	**46**	**65**	**-**	**-**	**-**	**-**
63.	*Vanligar flytingarinntøkur*	*-14*	-	-	-	-	-
76.	*Innanh. flyt. millum almennar stovn.*	*60*	*65*	-	-	-	-

24. Varðveitan av fjølbroyttum flota

	Nettoútreiðsla	875	-	250	600	600	600
	Útreiðslur	**875**	**-**	**250**	**600**	**600**	**600**
11.	Lønir v.m.	0	-	-	-	-	-
53.	Stuðul til vinnu	875	-	250	600	600	600

40. Inntøkufíggjað virksemi

	Nettoútreiðsla	0	341	5	0	0	21
	Útreiðslur	**3.253**	**2.858**	**2.465**	**2.500**	**2.500**	**2.521**
11.	Lønir v.m.	1.347	1.559	1.015	1.460	1.460	1.460
14.	Keyp av vørum og tænastum	1.447	1.257	1.086	1.040	1.040	1.061
15.	Keyp av útbúnaði, netto	404	33	62	-	-	-
16.	Leiga, viðlíkahald og skattur	62	9	0	-	-	-
19.	Ymsar rakstrarútreiðslur	-6	-	302	-	-	-
71.	Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-
	Inntøkur	**3.253**	**2.517**	**2.461**	**2.500**	**2.500**	**2.500**
21.	*Søla av vøru og tænastum*	*1.315*	*1.037*	*901*	*1.600*	*1.600*	*1.600*
29.	*Ymsar rakstrarinntøkur*	*69*	-	-	-	-	-
63.	*Vanligar flytingarinntøkur*	*1.554*	*1.289*	*1.559*	*900*	*900*	*900*
67.	*Rentuinntøkur og vinningsbýti*	*1*	*2*	*0*	-	-	-
76.	*Innanh. flyt. millum almennar stovn.*	*314*	*189*	-	-	-	-

45. Verkætlanir

Nettoútreiðsla	0	583	187	0	0	12
Útreiðslur	**3.381**	**3.605**	**4.433**	**1.525**	**1.525**	**1.537**
11. Lønir v.m.	1.954	1.918	2.170	775	775	775
14. Keyp av vørum og tænastum	1.183	1.490	1.767	600	600	612
15. Keyp av útbúnaði, netto	118	193	188	100	100	100
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	125	3	295	50	50	50
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	1	1	13	-	-	-
Inntøkur	**3.381**	**3.023**	**4.246**	**1.525**	**1.525**	**1.525**
21. Søla av vøru og tænastum	-	-	-	*275*	*275*	*275*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	-	-	*72*	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	-	*100*	*1.829*	*675*	*675*	*675*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*3.381*	*2.923*	*2.345*	*575*	*575*	*575*

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
A:: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**9.926**	**10.745**	**9.978**	**10.631**	**11.318**	**11.516**
1. Leiðsla og hjálparfunktiónir	1.702	1.842	1.710	1.822	1.940	1.974
2. Fiskideildin (Innsavnan, viðgerð, sigling)	4.091	4.428	4.112	4.381	4.664	4.745
3. Umhvørvisdeildin (Innsavnan, viðgerð)	1.494	1.618	1.502	1.601	1.704	1.734
4. Samskifti (Fyrispurningar, fundir, skriving av greinum og	1.876	2.031	1.886	2.009	2.139	2.177
5. Annað (Útbúgving og annað)	763	826	768	818	871	886

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	25,5	25,5	22,5	24,0	25,0	25,0
Fulltíðarstørv	26,5	26,5	23,5	25,0	26,0	26,0
Lønarpartur (mió. kr.)	8,0	8,8	8,3	9,2	9,9	10,0

5.34.3.04. Magnus Heinason (Rakstrarjáttan)

Játtanin er til at reka fiskirannsóknarskipið Magnus Heinason. Fiskirannsóknarstovan nýtir skipið til vísindaligar hav- og fiskirannsóknir undir Føroyum og á leiðum, ið eru týdningarmiklar fyri føroyskan fiskiskap og føroyskan sjógv.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	8.777	9.681	10.191	9.416	9.527	9.755
Útreiðslur	11.940	12.235	12.848	12.216	12.327	12.555
Inntøkur	3.163	2.554	2.656	2.800	2.800	2.800
20. Magnus Heinason						
Nettoútreiðsla	8.777	9.681	10.191	9.416	9.527	9.755
Útreiðslur	**11.940**	**12.235**	**12.848**	**12.216**	**12.327**	**12.555**
11. Lønir v.m.	6.664	6.387	6.406	6.491	6.602	6.715
14. Keyp av vørum og tænastum	4.599	5.268	5.691	3.815	3.815	3.891
15. Keyp av útbúnaði, netto	243	108	105	800	800	816
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	430	473	645	1.110	1.110	1.133
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	4	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-
Inntøkur	**3.163**	**2.554**	**2.656**	**2.800**	**2.800**	**2.800**
21. Søla av vøru og tænastum	*3.163*	*2.554*	*2.656*	*2.800*	*2.800*	*2.800*

Starvsfólkayvirlit: 20 Magnus Heinason

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	16,0	16,0	16,0	15,0	15,0	15,0
Fulltíðarstørv	16,0	16,0	16,0	15,0	15,0	15,0
Lønarpartur (mió. kr.)	6,7	6,4	6,4	6,5	6,6	6,7

5.34.3.05. Útgerð til Magnus Heinason (Løgujáttan)

Magnus Heinason er eftir hondini eitt gamalt skip og hevur átrokandi tørv á viðlíkahaldi. Fleiri lutir á skipinum eru nógv slitnir og kunnu væntast at ganga fyri nær tað skal vera. Síðstu árini hevur skipið eisini alsamt oftari havt brek í motori, útgerð v.m.

Í hesum sambandi er mett um tørvin at halda viðlíka og skifta út, m.a. hevur stovnurin latið eina ráðgevingarfyritøku gjørt eina kostnaðarmeting. Víst verður á fleiri viðurskifti, har neyðugt er við ábøtum, um skipið skal hava møguleika at halda fram við regluligum virksemi. Samanumtikið metir frágreiðingin, at tørvur er á góðum 8 mió. kr. í 2007, uml. 1 mió. kr. í 2008 og uml. 2 mió. kr. frá 2009 til 2013. Til at gera tað mest neyðuga og átrokandi eru 3 mió. kr. settar av í 2007. Somuleiðis verður neyðugt at seta pening av í 2008. Ætlandi skulu forprojekteringar til nýtt rannsóknarskip byrja í 2008.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	-	3.000	6.000
10. Útgerð til Magnus Heinason						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**-**	**3.000**	**6.000**
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	-	-	3.000	6.000

5.34.3.07. Fiskivinnuroyndir (Rakstrarjáttan)

Fiskimálaráðið umsitur fiskivinnuroyndir, sum hava til endamáls (stevnu) at fremja royndir og kanningar, bæði vinnuligar og vísindaligar, ið menna føroyska fiskivinnu, fiskiskap, fiskavirking og fiskasølu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum. Fiskimálaráðið hevur tikið undir við stýrinum at raðfesta økini (2006-2008):

1. Fiskiskapur við ábyrgd
2. Royndarveiða, framleiðsla og søla
3. Virðisøking av fiski
4. Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
5. Heilsa, trygd og umhvørvi

Týðandi tættir í fiskivinnuroyndum er áhaldandi at betra vitanina í fiskivinnuni, at stuðla undir nýhugsan, og at stuðla loysnum, ið verða hildnar at vera slóðbrótandi fyri vinnu- og livikor í fiskivinnuni. Harafturat at stuðla ætlanum um burðardygga veiði í tilfeingi, ið er ikki roynt áður, at stuðla royndum við nýggjum veiðihættum og stuðla nýhugsan í sambandi við at virka meiri burtur úr rávøru, fiskavøru og fiskaúrdráttum sum heild, eisini við atliti at gagnnýta til fulnar tilfeingið og at fáa alt til høldar. Royndir kunnu eisini leggja lunnar undir granskingarætlan, ið soleiðis skapar møguleika fyri at viðgera meiri innsavnaða vitan.

Umsóknir til játtanina Fiskivinnuroyndir verða viðgjørdar av einum stýrisbólki, sum hevur greiðar mannagongdir at virka eftir. Eftir tilmæli frá stýrisbólkinum veitir Fiskimálaráðið endaliga tilsøgn um stuðul. Seinastu árini er parturin, sum er beinleiðis veittur til verkætlanir hjá Fiskirannsóknarstovuni minkaður nógv, og í 2007 eru 575 tkr. játtaðar Fiskirannsóknarstovuni til framhaldandi royndir. Víst verður eisini til viðmerkingarnar hjá Fiskirannsóknarstovuni til undirkontu 5.34.3.01.45. Verkætlanir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	7.422	4.494	5.165	5.000	5.000	5.047
Útreiðslur	7.422	4.494	5.165	5.000	5.000	5.047
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	7.422	4.494	5.165	5.000	5.000	5.047
Útreiðslur	**7.422**	**4.494**	**5.165**	**5.000**	**5.000**	**5.047**
11. Lønir v.m.	2	0	-	1.800	1.800	1.831
14. Keyp av vørum og tænastum	7	3	6	800	800	816
53. Stuðul til vinnu	2.711	2.073	3.022	1.825	1.825	1.825
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	4.702	2.418	2.137	575	575	575

5.34.4. Studningur til vinnur

5.34.4.01. Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (Lógarbundin játtan)

Inntøkutrygd verður goldin við heimild í løgtingslóg nr. 112 frá 29. desember í 1998 um minstuløn og dagstudning og løgtingslóg nr. 166 frá 29. desember í 1997 um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn.

Mett verður, at nýtslan verður einar 25 mió. kr. í 2007. Hetta er serliga grundað á metingar og framskrivingar fyri 2006.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	25.426	37.990	27.178	29.000	25.000	29.000
01. Inntøkutrygd						
Útreiðslur	**25.426**	**37.990**	**27.178**	**29.000**	**25.000**	**29.000**
14. Keyp av vørum og tænastum	10	13	11	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	1	1	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	25.416	37.976	27.166	29.000	25.000	29.000

5.34.4.04. Sjúkratrygd (Lógarbundin játtan)

Sjúkratrygd verður goldin við heimild í løgtingslóg nr. 30 frá 19. mai í 2004 um sjúkratrygd til fiskimenn. Endamálið er at tryggja inntøkur fiskimanna í sambandi við sjúku ella skaða, og heimild er at gjalda monnum, sum eru undir skipanini við minstuløn, sjúkratrygd.

Mett verður, at nýtslan verður einar 8 mió. kr. í 2007. Hetta er serliga grundað á metingar og framskrivingar fyri 2006.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	6.481	7.008	7.999	8.000	8.000	8.000
01. Sjúkratrygd						
Útreiðslur	**6.481**	**7.008**	**7.999**	**8.000**	**8.000**	**8.000**
11. Lønir v.m.	-	-	0	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	0	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	6.480	7.008	7.999	8.000	8.000	8.000
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	1	-	-	-	-	-

5.34.4.05. Heilsukanningar av sjófólki (Lógarbundin játtan)

Kunngerð nr. 110 frá 2. juli 2001 um læknakanning við heimild í løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um sjómenn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember 2001 ásetir, at landskassin skal rinda fyri læknakanningar umframt útreiðslur til heimferð av skipi í sambandi við at hjúnafelagi ella barn er deytt ella illa sjúkt. Játtanin til heilsukanning av sjófólki verður umsitin av Skipaeftirlitinum, og lá fram til 2007 á rakstrarjáttanini hjá Skipaeftirlitinum, men er nú løgd á egna høvuðskontu.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	-	900	900
01. Heilsukanningar av sjófólki						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**-**	**900**	**900**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	-	900	900

5.34.4.14. Gjald til rækjuflotan (Lógarbundin játtan)

Løgtingslóg nr. 73 frá 24. mai 2005 um gjald til rækjuflotan heimilaði landsstýrismanninum eftir umsókn at veita gjald til eigara av rækjuskipi, sum var í vinnu undir føroyskum flaggi. Lógin hevði virkna frá 1. januar 2005 til 31. desember 2006.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	8.456	3.500	-	-
01. Gjald til rækjuflotan						
Útreiðslur	**-**	**-**	**8.456**	**3.500**	**-**	**-**
53. Stuðul til vinnu	-	-	8.456	3.500	-	-

5.34.4.16. Fiskivinnumenning á landi (Onnur játtan)

Játtanin á hesum rakstrarstaði verður nýtt sambært løgtingslóg nr. 84 frá 28. mai í 1996 um stuðul at menna fiskivinnu á landi, við seinni broytingum. Stuðul kann verða veittur fiskavirkjum til at:

- virka vørur úr innfluttum fiski
- vørumenning o.a.
- stuðul til menning av innaneftirliti

Eisini verður játtanin nýtt til at gjalda fyri heilsuprógv hjá starvsfólkum á fiskavirkjum og verksmiðjuskipum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	1.017	478	681	1.000	1.000	1.000
01. Stuðul						
Útreiðslur	**1.017**	**478**	**681**	**1.000**	**1.000**	**1.000**
14. Keyp av vørum og tænastum	1.017	78	80	-	-	-
53. Stuðul til vinnu	-	400	601	1.000	1.000	1.000

5.34.4.22. Flutningsstuðul (Lógarbundin játtan)

Flutningstuðul verður goldin eftir heimild í løgtingslóg nr. 14 frá 3. mars í 1999 um stuðul til fiskaflutnings. Stuðulsupphæddirnar eru ásettar í kunngerð. Lønjavningarstovan umsitur skipanina við flutningsstuðli.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	1.950	1.381	2.335	2.000	2.000	2.000
01. Stuðul						
Útreiðslur	**1.950**	**1.381**	**2.335**	**2.000**	**2.000**	**2.000**
52. Tilskot til einstaklingar	1	-	-	-	-	-
53. Stuðul til vinnu	1.948	1.381	2.335	2.000	2.000	2.000

5.34.4.37. Telefonstuðul til langfarafiskimenn (Lógarbundin játtan)

Sambært løgtingslóg nr. 96 frá 6. juni í 1997 um stuðul til telefonútreiðslur hjá langfarasjómonnum, sum broytt við løgtingslóg nr. 70 frá 18. august í 1998, varð stuðul veittur sjómonnum, ið vóru mynstraðir 30 dagar ella meir, og høvdu fastan bústað í Føroyum. Stuðulin var 17,50 kr. um dagin. Lógin varð avtikin 1. november 2005.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	3.464	3.498	2.501	2.000	-	-
01. Telefonstuðul						
Útreiðslur	**3.464**	**3.498**	**2.501**	**2.000**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	1	2	1	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	3.462	3.496	2.500	2.000	-	-

5.34.5. Lán, effektiv veðhald o.t.

5.34.5.01. Útlán (Onnur játtan)

Á hesi høvuðskontu eru afturgjøld og lánseftirgevingar, ið veitt eru fiskivinnuni. Standardkonta 53 verður nýtt at bóka eftirgeving. Standardkonta 82 verður nýtt til at bóka gjaldførislán, ið verða veitt við heimild í løgtingslóg nr. 102 frá 19. august í 1988 um at endurnýggja fiskiskipaflotan, við seinni broytingum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	35.427	11.348	19.584	6.500	6.500	6.500
Inntøkujáttan	38.145	12.254	25.247	7.000	9.100	9.100
01. Stuðulslán, lóg nr. 35 frá 1. juni 1978						
Útreiðslur	**215**	**-32**	**15**	**-**	**-**	**-**
53. Stuðul til vinnu	255	-32	4	-	-	-
82. Útlán v.m.	-39	-	11	-	-	-
Inntøkur	**772**	**129**	**61**	**-**	**-**	**-**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*772*	*129*	*61*	-	-	-
03. Serlán, lóg nr. 41 frá 20. mai 1988						
Útreiðslur	**-750**	**0**	**0**	**-**	**-**	**-**
53. Stuðul til vinnu	-	290	-	-	-	-
82. Útlán v.m.	-750	-290	0	-	-	-
Inntøkur	**-**	**-**	**10**	**-**	**-**	**-**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	-	-	*10*	-	-	-
04. Kurslán, lóg nr. 24 frá 1. juni 1978						
Útreiðslur	**571**	**-**	**0**	**-**	**-**	**-**
53. Stuðul til vinnu	603	-	-	-	-	-
82. Útlán v.m.	-32	-	0	-	-	-
Inntøkur	**634**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*634*	-	-	-	-	-
05. Likviditetslán, lóg nr. 35 frá 1984						
Útreiðslur	**24.224**	**-**	**8.500**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	1	-	-	-	-	-
53. Stuðul til vinnu	6.800	-	-	-	-	-
82. Útlán v.m.	17.423	-	8.500	-	-	-
Inntøkur	**23.675**	**2.465**	**14.100**	**300**	**2.600**	**2.600**
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*-5*	*25*	*2.384*	-	-	-
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*23.679*	*2.440*	*11.715*	*300*	*2.600*	*2.600*

06. Serlán, lóg nr. 8 frá 16. jan. 1980

	Útreiðslur	**-1.780**	**-**	**0**	**-**	**-**	**-**
53.	Stuðul til vinnu	-1.697	-	-	-	-	-
82.	Útlán v.m.	-84	-	0	-	-	-
	Inntøkur	**0**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
67.	*Rentuinntøkur og vinningsbýti*	*-27*	-	-	-	-	-
86.	*Afturgjaldan av útlánum v.m.*	*27*	-	-	-	-	-

40. Studningslán, lóg nr. 48 frá 30. mai 1964

	Útreiðslur	**1**	**1**	**1**	**-**	**-**	**-**
53.	Stuðul til vinnu	1	1	1	-	-	-
	Inntøkur	**1**	**1**	**1**	**-**	**-**	**-**
86.	*Afturgjaldan av útlánum v.m.*	*1*	*1*	*1*	-	-	-

41. Studningslán til útróðrarst., lóg nr. 42 frá 6. mai 1976

	Útreiðslur	**256**	**168**	**150**	**-**	**-**	**-**
53.	Stuðul til vinnu	212	168	150	-	-	-
82.	Útlán v.m.	44	-	-	-	-	-
	Inntøkur	**256**	**168**	**150**	**-**	**-**	**-**
86.	*Afturgjaldan av útlánum v.m.*	*256*	*168*	*150*	-	-	-

42. Studningslán (umskiping) lóg nr. 34 og 140 frá 1993

	Útreiðslur	**3.550**	**7.306**	**631**	**4.000**	**4.000**	**4.000**
53.	Stuðul til vinnu	3.550	3.211	631	2.000	2.000	2.000
82.	Útlán v.m.	-	4.096	-	2.000	2.000	2.000
	Inntøkur	**3.644**	**3.250**	**631**	**4.000**	**4.000**	**4.000**
86.	*Afturgjaldan av útlánum v.m.*	*3.644*	*3.250*	*631*	*4.000*	*4.000*	*4.000*

43. Studningslán, lóg nr. 26 frá 14. mars 1997

	Útreiðslur	**9.063**	**3.905**	**7.435**	**2.500**	**2.500**	**2.500**
53.	Stuðul til vinnu	9.063	3.322	7.435	2.500	2.500	2.500
82.	Útlán v.m.	-	584	-	-	-	-
	Inntøkur	**9.063**	**3.905**	**7.435**	**2.500**	**2.500**	**2.500**
86.	*Afturgjaldan av útlánum v.m.*	*9.063*	*3.905*	*7.435*	*2.500*	*2.500*	*2.500*

60. Ymsi lán

	Útreiðslur	**77**	**-**	**2.853**	**-**	**-**	**-**
53.	Stuðul til vinnu	79	-	2.853	-	-	-
82.	Útlán v.m.	-2	-	-	-	-	-
	Inntøkur	**100**	**2.336**	**2.860**	**200**	**-**	**-**
67.	*Rentuinntøkur og vinningsbýti*	*-19*	-	-	-	-	-
86.	*Afturgjaldan av útlánum v.m.*	*119*	*2.336*	*2.860*	*200*	-	-

5.34.5.07. Effektivar veðhaldsútreiðslur (Onnur játtan)

Útreiðslujáttanin fatar um tær veðhaldsskyldur, sum landskassin hevur í fiskiskipum. Inntøkujáttanin er afturgjald til landskassan fyri goldnar borganir. Landskassin hevur bert smávegis veðhaldsskyldur eftir í skipaflotanum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	629	23	4.709	-	-	-
Inntøkujáttan	8.260	5.157	5.348	4.500	1.000	1.000
01. Veðhald						
Útreiðslur	**629**	**23**	**4.709**	**-**	**-**	**-**
53. Stuðul til vinnu	558	23	4.698	-	-	-
82. Útlán v.m.	71	-	11	-	-	-
Inntøkur	**8.260**	**5.157**	**5.348**	**4.500**	**1.000**	**1.000**
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	-	-	*11*	-	-	-
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*8.260*	*5.157*	*5.337*	*4.500*	*1.000*	*1.000*

Sjóvinna

5.35.1. Ymsar útreiðslur

5.35.1.01. Sjóvinnufyrisitingin (Skipaskrásetingin) (Rakstrarjáttan)

Høvuðssetningurin hjá Skipaskrásetingini er at umsita føroyska lóggávu um skipaskráseting, sum er sermál, og at veita Landsstýri, Løgtingið og borgarum stuðul og ráðgeving í sjóvinnumálum.

Skipaskrásetingin umsitur løgtingslógina um skipaskráseting og løgtingslógina um Føroya altjóða skipaskrá (FAS). Umsitingarligu uppgávurnar eru at skráseta nýggj skip og skip flutt úr øðrum skrásetingum, skráseta bátar í Streymoyar sýslu, pantirættindi o.a. og at hava neyvt eftirlit við, um eigarar/feløg lúka øll skrásetingarkrøv. Skrásetingin skal eisini umsita reglurnar um leiguskráseting (bareboat-skráseting).

Sjóvinnufyrisitingin varð endaliga flutt til Skipaeftirlitið í 2005, og vórðu tá slakar 700 tkr. fluttar av játtanini hjá Skipaskrásetingini til Skipaeftirlitið. Virksemið á Skipaskrásetingini varð umskipað í 2005, og er leiðandi løgfrøðingurin á stjórnarskrivstovuni nú skrásetari. Tvey skrivstovufólk eru dagliga knýtt at Skipaskrásetingini.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.966	1.077	84	242	253	267
Útreiðslur	2.653	1.825	989	742	753	767
Inntøkur	687	748	905	500	500	500
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	1.966	1.077	84	242	253	267
Útreiðslur	**2.653**	**1.825**	**989**	**742**	**753**	**767**
11. Lønir v.m.	1.236	952	464	600	611	622
14. Keyp av vørum og tænastum	1.262	856	103	100	100	102
15. Keyp av útbúnaði, netto	154	16	0	42	42	43
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	0	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	0	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	422	-	-	-
Inntøkur	**687**	**748**	**905**	**500**	**500**	**500**
21. Søla av vøru og tænastum	*385*	*385*	*352*	-	-	-
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*302*	*363*	*553*	-	-	-
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	-	-	-	*500*	*500*	*500*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*0*	-	*0*	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	4,5	3,5	2,5	1,6	1,6	1,6
Fulltíðarstørv	4,5	3,5	2,5	1,6	1,6	1,6
Lønarpartur (mió. kr.)	1,2	1,0	0,5	0,6	0,6	0,6

5.35.1.02. Skipaeftirlitið (Rakstrarjáttan)

Skipaeeftirlitið og trygd á sjónum varð yvirtikið sum føroykt málsøki hin 1. januar 2002. Í hesum sambandi varð Skipaeftirlitið skipað sum deild í Fiskimálaráðnum. Í mai mánaði 2003 vórðu Skipaeftirlitið og Sjóvinnufyrisitingin formliga løgd saman og hava virkað sum ein deild síðani. Ikki fyrr enn í 2005 er játtanin til sjóvinnufyrisitingina flutt til Skipaeftirlitið.

Skipaeftirlitið arbeiðir eftir altjóða krøvum og reglugerðum, og er tí neyðugt at fylgja væl við, fyri at tryggja áhaldandi at dagføra lógir og reglugerðir, soleiðis at skip okkara sleppa undan trupulleikum í fremandum havnum. Økið er fakliga týdningarmikið og setir stór krøv til serkunnleika og eftirútbúgving, fyri at førleikin hjá starvsfólkunum skal verða eins góður sum førleikin hjá starvsfólkunum á tílíkum stovnum í londunum rundan um okkum. Harumframt hevur Skipaeftirlitið, sambært lógini um trygd á sjónum, víðar heimildir sum eftirlitsmyndugleiki.

Høvuðsupgávurnar hjá Skipaeftirlitinum eru hesar:

- Lógarfyrireiking- og smíð: Lóg um trygd á sjónum og kunngerðir.
- Áseta gjøllari reglur við heimild í lóg um trygd á sjónum, ið verða gjørdar í fráboðanum frá Skipaeftirlitinum (regluverkið).
- Umsita samskiftið við IMO og aðrar avvarðandi altjóðafelagsskapir og stovnar, hvussu viðurskifti Føroya við IMO so verða skipað.
- Umsita og útinna lóggávuna nevnd omanfyri, undir hesum skriva út skipssertifikat, og neyðugt samstarv við vinnuna í hesum sambandi.
- Eftirlit við at lata byggja og umbyggja skip.
- Sýna skip, undir hesum kanna vanlukkur á sjónum o.a.
- Hava eftirlit við klassafeløgum, sum hava myndugleikagóðkenning at sýna og útgeva sertifikat myndugleikanna vegna.
- At veita ráðgeving í tvørgangandi málum í Fiskimálaráðnum og til landsstýrismannin.
- At samstarva um tvørgangandi uppgávur í Fiskimálaráðnum.
- Útgáva av sjóvinnubrøvum og manningarskjølum.
- Umsiting av læknakanningum fyri sjófólk og mynstringarmyndugleiki.

Átøk verða støðugt gjørd fyri at betra um tryggleikan á sjónum. Føroyar hava vánalig hagtøl at vísa á í altjóða høpi viðvíkjandi trygd á sjónum, og liggja enn á gráa lista hjá Paris Memorandum of Understanding. Málið er, at Føroyar skulu á hvíta lista. Tá ið hetta mál er nátt, kann væntast, at kappingarførið hjá føroysku farmaskipavinnuni og FAS skipanini gerst munandi betri.

Í løtuni starvast 12 fólk á Skipaeftirlitinum. Tey eru deildarstjóri, 5 skipaeftirlitsmenn, 2 løgfrøðingar, 1 fulltrúi og 3 skrivstovufólk. Til tess at røkja allar uppgávurnar, soleiðis at eftirlitið við trygd á sjónum verður gjørt á nøktandi hátt, er neyðugt at seta eitt skipaeftirlitsfólk og ein fulltrúa afturat í 2007.

900 tús. kr. eru í 2007 fluttar av játtanini hjá Skipaeftirlitinum til egna høvuðskontu 5.34.4.05. Heilsukanning av sjófólki (lógarbundin játtan).

Fiskimálaráðið hevur sett sær fyri at seta á stovn FAS umsiting. 800 tús. kr. eru settar av til endamálið í 2007. Játtanin verður umsitin av Skipaeftirlitinum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	6.773	7.025	8.095	8.601	9.291	9.266
Útreiðslur	6.834	7.032	8.305	8.951	9.641	9.616
Inntøkur	61	8	210	350	350	350
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	6.773	7.025	8.095	8.601	8.491	8.448
Útreiðslur	**6.834**	**7.032**	**8.305**	**8.951**	**8.841**	**8.798**
11. Lønir v.m.	4.007	3.384	4.503	5.269	5.959	6.057
14. Keyp av vørum og tænastum	1.899	2.728	2.891	2.738	1.938	1.777
15. Keyp av útbúnaði, netto	745	580	565	584	584	596
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	184	301	347	360	360	368
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	40	-	-	-	-
Inntøkur	**61**	**8**	**210**	**350**	**350**	**350**
21. Søla av vøru og tænastum	*61*	*8*	*210*	*350*	*350*	*350*
21. FAS						
Nettoútreiðsla	-	-	-	-	800	818
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**-**	**800**	**818**
11. Lønir v.m.	-	-	-	-	550	563
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	-	250	255

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	12,0	10,0	9,8	10,8	12,8	12,8
Fulltíðarstørv	13,0	11,0	10,8	11,8	13,8	13,8
Lønarpartur (mió. kr.)	4,0	3,4	4,5	5,3	6,0	6,1

5.35.1.03. Trygdarmiðstøðin (Rakstrarjáttan)

Trygdarmiðstøðin virkar við tí endamáli at veita øllum sjómonnum eina grundleggjandi vitan um trygd á sjónum. Fyri at røkka hesum máli veitir støðin bæði ástøðiliga og verkliga undirvísing í at nýta bjargingarútgerð, sløkkiútgerð (grundskeið), bátavenjingar, fyrstuhjálp o.a., fyribyrgja vandastøðu og hvat verður gjørt tá ið manning kemur í hesa støðu. Seinastu tíðina er skeiðsvirksemið hjá Trygdarmiðstøðini vaksið. Tískil er raðfest at seta ein undirvísara afturat í 2007, soleiðis at stovnurin nú hevur 5 starvsfólk.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	2.169	2.128	2.087	2.101	2.492	2.551
Útreiðslur	2.897	2.913	2.763	2.821	3.212	3.271
Inntøkur	729	784	676	720	720	720
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	2.169	2.128	2.087	2.101	2.492	2.551
Útreiðslur	**2.897**	**2.913**	**2.763**	**2.821**	**3.212**	**3.271**
11. Lønir v.m.	1.501	1.620	1.728	1.765	2.156	2.193
14. Keyp av vørum og tænastum	716	903	831	491	491	501
15. Keyp av útbúnaði, netto	463	118	30	365	365	373
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	218	172	172	200	200	204
17. Avskrivingar o.a.	-	100	2	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	0	-	-	-
Inntøkur	**729**	**784**	**676**	**720**	**720**	**720**
21. Søla av vøru og tænastum	*729*	*574*	*676*	*720*	*720*	*720*
63. Vanligar flytingarinntøkur	-	*210*	-	-	-	-
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	-	-	*0*	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	6,3	4,0	4,0	4,0	5,0	5,0
Fulltíðarstørv	6,3	4,0	4,0	4,0	5,0	5,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,5	1,6	1,7	1,8	2,2	2,2

5.35.1.10. Trygdarmiðstøðin (Løgujáttan)

Forprojektering av nýggjum hølum til Trygdarmiðstøðina er byrjað. Væntandi kann arbeiði byrja í 2007 og gerast liðugt í 2008. Samlaði kostnaðurin er mettur til 15 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	379	-	2.000	13.000
10. Trygdarmiðstøðin						
Útreiðslur	**-**	**-**	**379**	**-**	**2.000**	**13.000**
31. Bygging og løguframleiðsla	-	-	379	-	2.000	13.000

§ 6 Vinnumál

Felagsútreiðslur

6.11.1. Fyrisiting

6.11.1.06. Vinnumálaráðið (Rakstrarjáttan)

Vinnumálaráðið er stjórnardeild landsstýrisins á ávísum málsøkjum. Uppgávur ráðsins hjá landsstýrismanninum í vinnumálum í hesum sambandi eru m.a. at:

- Ráðgeva
- Málsviðgera
- Fyrireika lógaruppskot, kunngerðir og reglugerðir
- Samskipa
- Fremja stovnseftirlit

Vinnumálaráðið er skipað soleiðis:

Ráðsskrivstovan:
Skrivstovan fyrisitur tvørgangandi mál í Vinnumálaráðnum, sum eru: umsiting, samskipan, fíggjar-, lønar- og starvsfólkamál hjá ráðnum og stovnum undir ráðnum.

Menningardeildin:
Deildin fyrisitur almenna vinnumenning-, lóggávu og vinnuligt undirstøðukervi. Herímillum menningarmál, ársroknskaparmál, partafelagsmál, grannskoðanarmál, fjarskiftismál, Kt-vinnu, postmál, kappingarmál, vega- , og havnamál, og ferðslu-, og flogferðslumál.

Vinnudeildin:
Deildin fyrisitur vinnumál, sum eru: Alimál, búnaðarmál, handilsmál, ferðavinnumál, rúsdrekkamál, arbeiðsmarknaðarmál, arbeiðsumhvørvismál, olju-, orku-, og jarðfrøðismál, vanlukkutryggingarmál, kavaramál og javnstøðumál.

Arbeitt verður við lógaruppskoti um at skipa semingsstovn fyri allan arbeiðsmarknaðin, og eru 500 tús. játtaðar til at gera lóggávuarbeiðið liðugt, soleiðis at semingsstovnur kann verða skipaður fyri allan arbeiðsmarknaðin í 2007.

Veterinerdeildin:
Deildin fyrisitur matvørumál, plantumál, djórasjúku- og djóraverndarmál.

Tað er av stórum týdningi at styrkja veterineru umsitingina í Vinnumálaráðnum, og verður tí meiri peningur nýttur til tað endamálið. Krøv ásett í rættarreglum, og sáttmálum økjast alsamt til matvøru- og veterinera økið, m.a. til framleiðslu og flutning av matvørum og fenaði.

Føroyar hevur sum kunnugt ein handilssáttmála við ES. Sum ískoyti til handilssáttmálan er ein veteriner (heilsufrøðilig) avtala gjørd, sum er grundarlagið fyri øllum vøruflutningi

millum Føroyar og ES, innan matvøru- og veterinera økið. Ein støðufrágreiðing frá ES staðfestir, at umfatandi rættarreglur ikki eru orðaðar, sum avtalað við ES, og kann tað merkja at Føroyar missa støðu sum samhandilsland, og í staðin gerast triðja land, verða rættarreglurnar ikki settar í gildi og dagførdar so hvørt.

KT- fyrisiting:

KT-fyrisitingin er ein deild í Vinnumálaráðnum, sum tekur sær av kunningartøkniligari samskipan innan landsfyrisitingina sum heild. Fyrisitingin hevur egna játtan á fíggjarlógini. Sí høvuðskontu 6.38.3.19. KT-fyrisiting (Rakstrarjáttan).

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	9.278	10.103	9.212	9.009	10.269	9.942
Útreiðslur	9.891	10.121	9.212	9.009	10.269	9.942
Inntøkur	613	18	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	9.278	10.103	9.212	9.009	10.269	9.942
Útreiðslur	**9.891**	**10.121**	**9.212**	**9.009**	**10.269**	**9.942**
11. Lønir v.m.	6.619	7.261	7.083	7.278	8.418	8.054
14. Keyp av vørum og tænastum	2.550	2.440	1.892	1.500	1.620	1.657
15. Keyp av útbúnaði, netto	649	388	197	180	180	180
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	70	8	26	51	51	51
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	25	14	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	3	-	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	-	0	0	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-
Inntøkur	**613**	**18**	**-**	**-**	**-**	**-**
29. Ymsar rakstrarinntøkur	-	*18*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*613*	-	-	-	-	-

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**9.891**	**10.121**	**9.212**	**9.009**	**10.269**	**9.942**
1. Ráðsskrivstovan og felagsútreiðslur	4.600	4.430	4.350	4.049	4.100	4.272
2. Samskiftisdeildin	1.290	1.270	1.650	1.610	1.719	1.720
3. Vinnudeildin	1.712	2.300	2.200	2.300	2.800	2.300
4. Veterinerdeildin	1.225	1.023	1.012	1.050	1.650	1.650
5. Ali- og búnaðardeildin	1.064	1.098	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	5,0	5,0	4,0	4,0	4,0	4,0
Onnur	13,0	13,0	12,0	12,0	12,0	12,0
Fulltíðarstørv	18,0	18,0	16,0	16,0	16,0	16,0
Lønarpartur (mió. kr.)	6,6	7,3	7,1	7,3	8,4	8,1

6.11.1.16. Viðlíkahald (Rakstrarjáttan)

Játtanin verður nýtt til at røkja hús o.t. hjá Vinnumálaráðnum og stovnum tess.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	966	232	650	400	400	400
Útreiðslur	966	232	650	400	400	400
20. Viðlíkahald						
Nettoútreiðsla	966	232	650	400	400	400
Útreiðslur	**966**	**232**	**650**	**400**	**400**	**400**
14. Keyp av vørum og tænastum	296	193	240	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	670	39	410	400	400	400

Virksemisyvirlit: 20 Viðlíkahald

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**966**	**232**	**650**	**400**	**400**	**400**
1. Heilsufrøðiliga Starvsstovan	150	-	148	-	-	50
2. Bryggjubakki - Menningarstovan	-	-	-	50	50	-
3. Akstovan	616	-	-	-	50	-
4. Landsvegahald	-	232	490	350	300	200
5. Onnur endamál	200	-	12	-	-	150

6.11.1.22. Javnstøðunevndin (Rakstrarjáttan)

Lógin um javnstøðu millum kvinnur og menn kom í gildi í 1994. Sambært lógini skal ein javnstøðunevnd verða vald. Nevndin hevur 5 limir. Javnstøðunevndin hevur m.a. uppgávuna at hava eftirlit við, at javnstøðulógin verður hildin, at vera ráðgevi hjá myndugleikum,

stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum og at gera tilmæli í javnstøðumálum.

Javnstøðunevndin verður vald fjórða hvørt ár, ella eftir at løgtingsval hevur verið. Javnstøðunevndin hevur útvegað sær fyrisitingarliga hjálp at greiða tær uppgávur, sum lógin áleggur henni.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	254	292	129	291	366	371
Útreiðslur	259	292	129	291	366	371
Inntøkur	5	-	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	254	292	129	291	366	371
Útreiðslur	**259**	**292**	**129**	**291**	**366**	**371**
11. Lønir v.m.	151	177	66	234	284	288
14. Keyp av vørum og tænastum	108	115	62	57	82	83
Inntøkur	**5**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*5*	-	-	-	-	-

6.11.1.47. Søla av landsins ognum (Løgujáttan)

Ætlanin er at selja oljutangarnar, sum landið eigur í Sørvági og í Søldarfirði. Játtan var til endamálið í 2006, men gjørdist fyrireikingararbeiðið at fremja søluna ikki liðugt. Inntøkujáttanin uppá 10,0 mió kr. er ein leyslig meting.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	-	-	-	10.000	10.000	-
01. Søla av landsins ognum						
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**10.000**	**10.000**	**-**
42. Søla av løgu o.ø.	-	-	-	*10.000*	*10.000*	-

6.11.1.48. Kvinnuluttøka í politikki (Rakstrarjáttan)

Løgtingið samtykti 20. oktober 2005 at seta eina nevnd, hvørs endamál er at økja um leiklutin hjá kvinnum í føroyskum politikki, soleiðis at talið av kvinnum økist á Løgtingið og í kommunustýrum. Tað eru játtaðar 325 tús. kr. til endamálið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	-	-	-	150	325	325
Útreiðslur	-	-	-	150	325	325
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	-	-	-	150	325	325
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**150**	**325**	**325**
11. Lønir v.m.	-	-	-	120	240	240
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	30	85	85

Almannamál

6.21.1. Fyrisiting

6.21.1.13. Vanlukkutryggingarráðið (Rakstrarjáttan)

Vanlukkutryggingarráðið, ið m.a. er mannað við dómaranum í Føroyum og landslæknanum, umsitur vanlukkutryggingarskipanina.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	300	350	454	364	364	364
Útreiðslur	644	676	668	689	689	689
Inntøkur	343	325	214	325	325	325
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	300	350	454	364	364	364
Útreiðslur	**644**	**676**	**668**	**689**	**689**	**689**
11. Lønir v.m.	385	373	386	456	456	456
14. Keyp av vørum og tænastum	259	303	282	233	233	233
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-
Inntøkur	**343**	**325**	**214**	**325**	**325**	**325**
21. Søla av vøru og tænastum	*343*	*325*	*214*	*325*	*325*	*325*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	0,8	0,8	0,8	0,8	0,8	0,8
Fulltíðarstørv	0,8	0,8	0,8	0,8	0,8	0,8
Lønarpartur (mió. kr.)	0,4	0,4	0,4	0,5	0,5	0,5

Ráevnisvinna

6.32.1. Fyrisiting

6.32.1.03. Jarðfeingi (Rakstrarjáttan)

Oljufyrisitingin og Jarðfrøðisavnið vóru formliga løgd saman í ein stovn í februar 2006 - Jarðfeingi.

Kolvetnismál og orka
Endamálið við Jarðfeingi er at fyrisita, granska, ráðgeva og breiða út kunnleika um kolvetni, orku og jarðfrøðilig náttúruvirði. Stovnurin fyrisitur lóggávuna innan leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, og lóggávuna innan framleiðslu, flutning og veiting av orku. Jarðfeingi granskar í jarðfrøði og náttúrufrøði á landi, á havbotninum og í undirgrundini. Stovnurin samskipar alt arbeiðið, ið hevur beinleiðis við málsøkið at gera.

Stovnurin umsitur kolvetnismál sambært løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi, løgtingslóg nr. 5 frá 8. februar 2000 um fyrsta útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, og løgtingslóg nr. 27 frá 17. mai 2004 um annað útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, og kunngerð nr. 75 frá 5. oktober 1963 um loyvi givið SEV til nýtslu av vatnorku v.m.

Sambært kunngerð nr. 34 frá 8. mars 2001 um at endurrinda útreiðslur í sambandi við kolvetnisvirksemi skulu loyvishavar, ið hava fingið loyvi at leita eftir og framleiða kolvetni, endurrinda útreiðslur, myndugleikin hevur í sambandi við at viðgera mál um loyvi og góðkenning o.a., og av eftirlitinum við, at lógin, reglur og treytir settar sambært lógini verða hildnar.

Tvey útbjóðingarumfør eru hildin, eitt í ár 2000 og eitt í 2005. Fýra leitibrunnar eru boraðir, og skulu tríggir borast afturat sambært loyvunum. Av hesum verður ein boraður í 2006, ein í 2007 og ein í 2008 ella 2009. Umhugsað er at fara undir triðja útbjóðingarumfar í 2007.

Arbeitt hevur verið við at orða ein orkupolitikk saman við Vinnumálaráðnum, og verður álitið latið landsstýrismanninum í 2006. Ein partur av hesum er at kanna hvussu vetni kann verða nýtt sum orkukelda í Føroyum, og verða 300 tús. kr. nýttar til tað endamálið í 2007.

Jarðfrøði
Jarðfeingi kortleggur, savnar og varðveitir jarðfrøðiligt tilfar, umframt at granska, ráðgeva og kunna um jarðfrøðilig evni og viðurskifti, og virka fyri at lóggáva og umsiting innan jarðfrøðilig náttúruvirði verður grundað á framkomna og dagførda jarðfrøðiliga vitan. Stovnurin virkar sum jarðfrøðiligt dátusavn, har kanningarúrslit frá øllum jarðfrøðiligum kanningum og oljuleitingum á Føroyaøkinum, frágreiðingar o.a verða varðveitt.

Stovnurin ráðgevur m.a. Landsverki og øðrum í sambandi við tunnilsverkætlanir o.t., samstarvar við Fróðskaparsetur Føroya o.o. um undirvísing og við Føroya Náttúrugripasavn um jarðfrøðiligar framsýningar.

Landgrunsverkætlan
Játtanin á undirkontuni verður nýtt til jarðfrøðiligar kanningar við atliti at møguligum krøvum um havbotnsrættindi uttan fyri 200 fjórðingamarkið.

Danmark, Føroyar og Grønland staðfestu í 2004 ST-havrættarsáttmálan frá 1982, og fóru í 2003 undir at fáa til vega neyðugu prógvgrundirnar fyri at gera møgulig landgrunskrøv galdandi uttan fyri 200 fjórðinga mørkini.

Landskassin fíggjar helvtina av útreiðslunum, sum hava við føroysku landgrunskrøvini at gera. Tilsamans verður roknað við, at føroyski parturin av útreiðslunum verður einar 20-25 mió. kr. yvir eitt 5-6 ára skeið.

Útreiðslurnar hækka munandi í 2007, tí umfatandi seismiskar kanningar skulu gerast bæði norðanfyri og sunnanfyri Føroyar, umframt at dýbdarboringar skulu gerast á økinum sunnanfyri Føroyar (Hatton - Rockall). Harafturat kemur, at meginparturin av jarðfrøðiligu kanningunum, sum skuldu gerast í 2006, vórðu útsettar til 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.		2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan		16.681	23.421	17.462	19.533	30.232	20.095
Útreiðslur		19.688	25.019	20.172	20.490	31.432	21.295
Inntøkur		3.007	1.598	2.710	957	1.200	1.200
20.	**Vanligt virksemi**						
	Nettoútreiðsla	14.089	13.284	12.328	13.133	13.432	13.695
	Útreiðslur	**17.095**	**14.882**	**13.993**	**14.090**	**14.632**	**14.895**
	11. Lønir v.m.	9.493	8.841	8.534	10.100	10.272	10.447
	14. Keyp av vørum og tænastum	5.819	4.449	3.258	2.445	2.670	2.758
	15. Keyp av útbúnaði, netto	593	347	1.068	445	590	590
	16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.126	1.158	1.076	1.100	1.100	1.100
	19. Ymsar rakstrarútreiðslur	2	1	1	-	-	-
	54. Stuðul til annað virksemi	33	25	25	-	-	-
	71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	30	61	30	-	-	-
	Inntøkur	**3.007**	**1.598**	**1.665**	**957**	**1.200**	**1.200**
	21. Søla av vøru og tænastum	*1.636*	*431*	*531*	*807*	*950*	*950*
	25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*1.199*	*633*	*178*	*150*	*250*	*250*
	63. Vanligar flytingarinntøkur	*152*	*486*	*910*	-	-	-
	76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*20*	*48*	*47*	-	-	-

21. Landgrunsverkætlan

Nettoútreiðsla	2.593	10.137	5.134	6.400	16.800	6.400
Útreiðslur	**2.593**	**10.137**	**6.179**	**6.400**	**16.800**	**6.400**
11. Lønir v.m.	671	1.708	1.236	2.200	2.700	2.000
14. Keyp av vørum og tænastum	1.692	8.414	4.905	4.200	12.600	4.400
15. Keyp av útbúnaði, netto	105	19	35	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-4	-3	-	1.500	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	124	-	7	-	-	-
Inntøkur	**-**	**-**	**1.045**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vørum og tænastum	-	-	*75*	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	-	-	*970*	-	-	-

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**-**	**-**	**13.993**	**14.090**	**14.633**	**14.895**
1. Leiðsla, skrivstova og felagsútreiðslur	-	-	4.200	4.200	4.200	4.200
2. Kolvetni	-	-	3.293	3.390	3.400	3.500
3. Orka	-	-	2.000	2.000	2.000	2.100
4. Jarðfrøði	-	-	4.500	4.500	5.033	5.095

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	4,5	4,0	5,0	5,0	5,0	5,0
Onnur	18,5	17,0	15,0	16,0	16,0	16,0
Fulltíðarstørv	23,0	21,0	20,0	21,0	21,0	21,0
Lønarpartur (mió. kr.)	9,5	8,8	8,5	10,1	10,3	10,4

Starvsfólkayvirlit: 21 Landgrunsverkætlan

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	0,5	2,0	2,0	2,5	3,0	2,0
Fulltíðarstørv	1,5	3,0	3,0	3,5	4,0	3,0
Lønarpartur (mió. kr.)	0,7	1,7	1,2	2,2	2,7	2,0

6.32.1.04. Søla av seismiskum kanningarúrslitum (Onnur játtan)

Við heimild í løgtingslóg nr. 179 frá 21. oktober 1993 um forkanningar o.a. av undirgrund Føroya varð avtala gjørd millum Føroya Landsstýri og Western Geophysical Corporation í 1994, um at WGC skuldi fáa loyvi at gera seismiskar kanningar á føroyskum landgrunnsøki, og at landskassin skuldi fáa ávísan part av søluinntøkum felagsins fyri sølu av seismiskum kanningarúrslitum.

Gjøldini fyri forkanningarloyvi (seismikkloyvi) eru heimilað í løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi. Eitt gjald er ásett feløgum uppá 75 tús. kr. fyri loyvi at gera seismiskar kanningar.

Inntøkurnar frá sølu av seismiskum kanningarúrslitum verða mettar til eini 150 tús. kr. í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	289	0	-	-	-
Inntøkujáttan	-	5.135	89	150	150	150
01. Søla av kanningarúrslitum						
Útreiðslur	**-**	**289**	**0**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	0	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	289	1	-	-	-
Inntøkur	**-**	**5.135**	**89**	**150**	**150**	**150**
21. Søla av vøru og tænastum	-	*5.060*	-	*150*	*150*	*150*
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	-	*75*	*89*	-	-	-

Landbúnaður

6.33.1. Djóralæknatænastur

6.33.1.04. Djóralæknatænastur (Rakstrarjáttan)

Endamálið við játtanini er at veita samsýning til privat starvandi djóralæknar, sum veita tænastur fyri tað almenna at basa djórasjúkum o.ø., fyri vaktarhaldið soleiðis, at djóraeigarar kunnu fáa djóralæknahjálp alt samdøgrið, og til at endurrinda ferðaútreiðslur og bíðitíð, soleiðis at útreiðslurnar hjá djóraeigarum verða tær somu fyri djóralæknahjálp uttan mun til hvar í landinum, hjálpin er neyðug.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	934	984	1.100	1.100	1.100	1.100
Útreiðslur	934	984	1.100	1.100	1.100	1.100
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	934	984	1.100	1.100	1.100	1.100
Útreiðslur	**934**	**984**	**1.100**	**1.100**	**1.100**	**1.100**
14. Keyp av vørum og tænastum	1.042	984	1.100	1.100	1.100	1.100
15. Keyp av útbúnaði, netto	-108	-	-	-	-	-

6.33.1.07. Kanning av djórasjúkum í Føroyum (Rakstrarjáttan)

Kanningin av djórasjúkum í Føroyum er lokin. Uppgávan er løgd til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	898	-	-	-	-	-
Útreiðslur	898	-	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	898	-	-	-	-	-
Útreiðslur	**898**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	325	-	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	570	-	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2	-	-	-	-	-

6.33.2. Landbúnaðarstudningur

6.33.2.01. Almennar royndir og ráðgeving (Rakstrarjáttan)

B: Rakstrarjáttanir, nettostýrdar (1.000 kr)	**66.379**	**67.559**	**67.316**	**67.430**	**73.130**	**74.415**
Útreiðslur, brutto	135.612	124.219	160.631	99.750	105.790	109.075
Inntøkur	-69.233	-56.660	-93.315	-32.320	-32.660	-34.660

Starvsfólkayvirlit:

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Onnur	152,0	153,0	144,0	146,0	146,0	146,0
Fulltíðarstørv	154,0	155,0	146,0	148,0	148,0	148,0
Lønarpartur (mió. kr.)	-	-	-	-	-	-

Viðmerking til høvuðstøl fyri LV: "4. Íløgur í bygningar" í 2007 sýnir útreiðslur á høvuðskontum samanlagt, sum LV hevur ræðisrættin til í løtuni. Útreiðslurnar broytast sera nógv ymsu árini, alt eftir um LV fær ræðisrættin til byggiarbeiði (bygningar), sum verða gjørd á øðrum greinum á fíggjarlógini, t.d. innan heilsuverkið og skúlaverkið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.		2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan		66.378	67.559	60.768	67.430	73.130	74.415
Útreiðslur		135.612	124.219	154.083	99.750	105.790	109.075
Inntøkur		69.233	56.660	93.315	32.320	32.660	34.660
20.	**Landsverksskrivstovan**						
	Nettoútreiðsla	10.359	8.171	8.727	8.300	6.420	6.540
	Útreiðslur	**12.138**	**9.764**	**9.881**	**9.160**	**7.545**	**7.665**
	11. Lønir v.m.	7.760	7.183	7.567	7.491	5.720	5.817
	14. Keyp av vørum og tænastum	2.370	1.963	2.039	965	1.120	1.143
	15. Keyp av útbúnaði, netto	747	71	119	154	155	155
	16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.165	548	155	550	550	550
	19. Ymsar rakstrarútreiðslur	1	0	0	-	-	-
	57. Rentuútreiðslur o.a.	4	-	0	-	-	-
	71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	91	-	-	-	-	-
	Inntøkur	**1.780**	**1.593**	**1.154**	**860**	**1.125**	**1.125**
	21. Søla av vøru og tænastum	*568*	*152*	*82*	*100*	*125*	*125*
	29. Ymsar rakstrarinntøkur	*1.212*	*1.441*	*1.073*	*760*	*1.000*	*1.000*
22.	**Byggi- og bygningsumsiting landsins**						
	Nettoútreiðsla	-	-	-	-	1.980	2.014
	Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**-**	**1.980**	**2.014**
	11. Lønir v.m.	-	-	-	-	1.900	1.932
	14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	-	80	82

30. Landsvegahald

Nettoútreiðsla		49.690	56.316	44.717	52.000	57.600	58.586
Útreiðslur		**93.823**	**60.682**	**63.247**	**52.000**	**57.600**	**58.586**
11.	Lønir v.m.	28.076	28.209	21.685	31.500	31.000	31.350
14.	Keyp av vørum og tænastum	45.028	29.529	37.408	19.200	19.000	19.636
15.	Keyp av útbúnaði, netto	11.541	-95	1.921	-	400	400
16.	Leiga, viðlíkahald og skattur	2.290	2.790	2.215	1.300	1.500	1.500
19.	Ymsar rakstrarútreiðslur	2	0	-	-	-	-
32.	Útvegan av løgu o.ø.	-	205	8	-	-	-
53.	Stuðul til vinnu	-	-	-	-	5.700	5.700
57.	Rentuútreiðslur o.a.	6	4	0	-	-	-
71.	Innanh. flyt. millum almennar stovn.	6.880	40	9	-	-	-
Inntøkur		**44.133**	**4.366**	**18.530**	**-**	**-**	**-**
21.	*Søla av vøru og tænastum*	*29.817*	*885*	*14.763*	-	-	-
76.	*Innanh. flyt. millum almennar stovn.*	*12.200*	*3.481*	*3.768*	-	-	-
77.	*Flyting frá kommunum*	*2.089*	-	-	-	-	-
79.	*Innanvirkis bókingar*	*26*	-	-	-	-	-

35. Havnir

Nettoútreiðsla		5.992	5.963	6.259	5.630	5.650	5.760
Útreiðslur		**6.087**	**6.069**	**6.471**	**5.790**	**5.825**	**5.935**
11.	Lønir v.m.	2.092	1.962	2.207	2.190	2.225	2.263
14.	Keyp av vørum og tænastum	2.233	2.500	2.565	2.500	2.500	2.572
15.	Keyp av útbúnaði, netto	338	733	432	500	500	500
16.	Leiga, viðlíkahald og skattur	1.184	552	1.111	600	600	600
19.	Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	7	-	-	-
32.	Útvegan av løgu o.ø.	-	-	5	-	-	-
71.	Innanh. flyt. millum almennar stovn.	241	323	144	-	-	-
Inntøkur		**95**	**106**	**212**	**160**	**175**	**175**
21.	*Søla av vøru og tænastum*	*95*	*106*	*212*	*160*	*175*	*175*

38. Flogferðsla

Nettoútreiðsla		337	596	1.068	1.500	1.480	1.515
Útreiðslur		**637**	**896**	**1.368**	**1.800**	**1.840**	**1.875**
11.	Lønir v.m.	468	439	590	550	590	600
14.	Keyp av vørum og tænastum	118	359	721	1.170	1.170	1.195
15.	Keyp av útbúnaði, netto	2	0	4	20	20	20
16.	Leiga, viðlíkahald og skattur	44	81	28	60	60	60
19.	Ymsar rakstrarútreiðslur	1	3	-	-	-	-
32.	Útvegan av løgu o.ø.	-	-	1	-	-	-
71.	Innanh. flyt. millum almennar stovn.	4	14	24	-	-	-
Inntøkur		**300**	**300**	**300**	**300**	**360**	**360**
21.	*Søla av vøru og tænastum*	*300*	*300*	*300*	*300*	*360*	*360*

40. Inntøkufíggjað virksemi, hald av landsvegum

Nettoútreiðsla		0	-3.488	-3	0	0	0
Útreiðslur		**22.926**	**46.807**	**73.115**	**31.000**	**31.000**	**33.000**
11.	Lønir v.m.	9.322	11.116	16.174	8.000	8.000	9.000
14.	Keyp av vørum og tænastum	2.737	24.343	43.500	18.400	18.400	18.400
15.	Keyp av útbúnaði, netto	-	9.989	6.218	2.800	2.800	3.800
16.	Leiga, viðlíkahald og skattur	2.011	0	3.508	1.800	1.800	1.800
17.	Avskrivingar o.a.	-	20	-	-	-	-
31.	Bygging og løguframleiðsla	537	1	23	-	-	-
32.	Útvegan av løgu o.ø.	-	-	76	-	-	-
57.	Rentuútreiðslur o.a.	-	-	3	-	-	-
71.	Innanh. flyt. millum almennar stovn.	8.319	1.338	3.613	-	-	-
Inntøkur		**22.926**	**50.295**	**73.119**	**31.000**	**31.000**	**33.000**
21.	*Søla av vøru og tænastum*	*16.125*	*46.746*	*73.025*	*31.000*	*31.000*	*33.000*
67.	*Rentuinntøkur og vinningsbýti*	-	-	*0*	-	-	-
76.	*Innanh. flyt. millum almennar stovn.*	*6.802*	*3.549*	*94*	-	-	-

Undirkonta 20. Landsverksskrivstovan. Av hesi kontu fara útreiðslur til høvuðsleiðslu, skrivstovu, bókhald og aðrar innanhýsis tænastur, undir hesum fastar og broytiligar útreiðslur í sambandi við umsiting stovnsins.

Undirkonta 22. Byggi- og bygningsumsiting. Endamálið við kontuni er at umsita landsins bygningar, bæði byggi- og víðlíkahaldsuppgávur. Við at savna umsitingina hjá Landsverki, verða allar uppgávur loystar á einum staði, sum hava við byggimál landsins at gera. Við at savna vitanina til málsøkið hjá Landsverki, verður umsitingin munadyggari, betri skipað við langtíðarætlanum, og møguleikum fyri at optimera nýtsluna.

Høvuðsuppgávurnar verða m.a.

- Ný- og umbygging av bygningum landsins
- Viðlíkahald
- Leigumál og keyp
- Studningsmál
- Byggiráðgeving

Undirkonta 30. Landsvegahald. Sambært løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir "ger og heldur landið landsvegirnar". Landið er lutað sundur í 3 vegumsitingarligar eindir. Hesar eru a) Suðuroy, b) Sandoy/Vágar/Streymoy, og c) Eysturoy/Norðuroyggjar, og hevur hvør eind ein økisleiðara, sum hevur ábyrgd av hvør sínum øki.

Tey verkevni, sum koma undir haldið, eru býtt soleiðis: Vanligt hald er alt arbeiðið at reka og røkja landsveg, undir hesum eisini tunnlar og brýr. Seta upp skelti og strípa vegir, eftirlit við bygging fram við landsvegi og íbindingum, umframt ferðsluteljingar og gassmátingar í tunnlum. Vetrarhaldið tekur sær av fráboðanini um koyrilíkindini, kavarudding, ástroying fyri hálku og ymiskum ferðslukanningum. Asfaltering er asfaltering í sambandi við at halda landsvegir. Harumframt arbeiðir vegadeildin við langtíðarætlanum innan vegagerð.

300 tús. kr. eru settar av til at seta upp skelti í sambandi við ferðavinnu í Føroyum.

Játtanin er hækkað við 5,7 mió. kr. fyri at Landsverk skal átaka sær rakstrarkostnaðin av Vágatunlinum og Norðoyartunlinum.

Undirkonta 35. Havnir. Játtanin er ætlað til:

1. At halda ferjulegurnar/samferðsluhavnirnar, ið landið eigur á Gomlurætt, á Trongisvágsfirði, og á Syðradali (Kalsoy), og ferjulemmarnar á teim kommunalu ferjulegunum o.a.
2. At halda anodur sambært løgtingslóg nr. 24 frá 9. mai 1968.
3. At gera lendisskipanir á firðum og sundum og at útvega neyðuga vitan í hesum sambandi, t.d. veðurmátingar, aldu- og steymmátingar o.t.
4. At gera sjóuppmátingar í sambandi við at dagføra dýbdarkort og sjókort.
5. At tryggja, at sum mest fæst burtur úr havnaíløgunum kring oyggjarnar, og at umsita studningsjáttanir til kommunal havnaarbeiði.
6. At hava eftirlit o.t. við kommunalum vitum, siglingarljósum og avmerkingum.
7. At ráðleggja um lendisskipanir í sambandi við aling á sjónum.
8. At veita kommununum tænastur í sambandi við at reka og at halda havnir og lendingar.
9. At hava eftirlit við og góðkenna ISPS havnir (trygdargóðkenning).

Undirkonta 38. Flogferðsla. Játtanin verður nýtt at reka tyrlupallarnar kring oyggjarnar og halda parkeringsøkið við farstøðina í Vágum. Játtanin kann eisini nýtast til at kanna flogvallarviðurskifti í Føroyum.

Undirkonta 40. Inntøkufíggjað virksemi. Raksturin av inntøkufíggjaðum virksemi skal hvíla í sær sjálvum. LV knúsar skerv og ger asfalt og hevur sostatt skyldu at tæna bæði privatum og almennum fyritøkum á best hóskandi hátt. LV ger arbeiði fyri og veitir ráðgeving til aðrar landsstovnar, kommunur, feløg og einstaklingar.

Alt vøru- og tænastuvirksemi, t.d. á skerv- og asfaltverkum, sum LV fremur fyri onnur, verður skrásett undir inntøkufíggjaðum virksemi.

Amboð/smiðjur fatar um alt arbeiðið viðvíkjandi at reka og røkja amboð, sum LV hevur um hendi, umframt at keypa nýggj amboð. Skerv- og asfaltverk fevnir um alt arbeiðið at reka og røkja hesi verk og útreiðslur at keypa asfalt og at framleiða hetta, umframt álegging, bæði á egnum øki og fyri kommunur, feløg og einstaklingar.

6.38.1.07. Nýggir landsvegir (Løgujáttan)

Játtanin verður latin fyri at útbyggja og bøta um vegakervið kring landið við tí endamáli at fáa eina so munadygga og trygga ferðslu sum gjørligt. Ætlan landsstýrisins er, at arbeiðini sum meginregla verða boðin út. Útreiðslujáttanin til landsvegagerð er 130,2 mió. kr. í 2007, og verður játtanin nýtt til 21 endamál. Inntøkujáttanin er 100 tús. kr.

Øravík - Hov
Verkætlanin umfatar tunnilsgerð millum Øravík og Hov og hartil hoyrandi vegir báðu megin tunnilin. Tunnilin er 2,45 km til longdar, meðan vegirnir, ið skulu gerast eru 3,4 km til longdar. Endamálið er at stytta teinin millum bygdirnar, og at betra vegakervið við einum tíðarhóskandi vega- og tunnilssambandi í staðin fyri verandi veg, sum er smalur, ótíðarhóskandi og liggur ovarliga.

Eftir verklagslógini (løgtingslóg nr. 34 frá 20. apríl 2005), skal samlaði kostnaðurin í mesta lagi verða 150 mió. kr. Forkanningar, ætlanarskrá og prosjektering er ikki við í hesi kostnaðarmeting. Arbeiðið byrjaði í oktober 2005, og verður liðugt seint í 2007.

Við árslok 2005 vóru 16,3 mió. kr., íroknað forkanningar og prosjektering, nýttar til verkætlanina. Í 2006 eru 70. mió kr. játtaðar til verkætlanina, sum vóru nýttar til vegagerð og at gera tunnilin (bora, tryggja o.t.). Í 2007 eru 68,4 mió. kr. játtaðar til at gera tunnilin lidnan.

Oyrareingir - Signabø
Endamálið við verkætlanini er at dagføra vegateinin millum Oyrareingir og Signabø. Enn er sjálv brúgvin eftir at gera, og stykkið frá brúnni yvir í landsvegin Kollafjarðarmegin. Ætlandi fer brúgvin og írestandi strekkið, sum skal breiðkast og asfalterast, at kosta umleið 6,7 mió. kr. Í 2006 vóru 2,0 mió. kr. játtaðar, sum verða brúktar partvís til at prosjektera og at byrja brúgvaarbeiðið. Í 2007 eru 4,7 mió. kr. játtaðar til at gera brúnna lidna.

Skálabotnur - Strendur
Arbeiðið fevnir um at gera nýggjan veg frá Skálabotni og út á Strendur. Endamálið er at fáa ein dygdarveg, og at leiða ferðsluna út um bygt øki, har vegirnir eru smalir og ótíðarhóskandi, og als ikki kunnu nýtast til tunga flutningin hjá vinnuni.

Verklagslógin ásetur, at tað í mesta lagi kunnu brúkast 33,0 mió. kr. frá 1. januar 2006. Prosjektering, forkanningar og ætlanarskrá er ikki við í hesum tali. Verkætlanin er lutað sundur í fleiri partar, og fatar hesin parturin um vegagerð millum Skála og Strendur, sum er 5 km til longdar. Kostnaðurin er mettur til 60 mió. kr., og varð farið undir ætlanina í 2001.

Ultimo 2005 vóru 26,2 mió. kr. nýttar til verkætlanina. Í 2006 vóru umleið 20 mió. kr. nýttar. Í 2007 eru 6,5 mió. kr. játtaðar.

Trygging av Norðskálatunlinum
Verkætlanin umfatar at dagføra og umvæla Norðskálatunnilin, soleiðis at tunnilin lýkur dagsins krøv til dygd og trygd.

Verklagslóg er ikki gjørd. Kostnaðurin er mettur til umleið 31,7 mió. kr., sum er væl størri, enn áður mett. Hetta er serliga tí, at loftið í tunnlinum er í nógv verri standi, enn roknað varð við, og at trygdarreglurnar, sum LV fylgir, vórðu herdar í 2000 og 2002. Harumframt var arbeiðið í vegakassanum, herímillum drenskipan ikki gjørd sambært forskriftunum tá tunnilin varð bygdur, sum merkir hægri kostnað.

Tað hevur verið arbeitt í fleiri ár við at tryggja Norðskálatunnilin. Arbeiðið byrjaði í 2001. Fram til ultimo 2005 vóru 18,7 mió. kr. nýttar til verkætlanina. Í 2006 var játtanin 7,0 mió. kr. Í 2007 eru 5,0 mió. kr. játtaðar til endamálið.

Fossá, Haldórsvík
Upprunaliga var ætlanin at breiðka og gera ábøtur á verandi brúgv, men niðurstøðan av nærri kanningum staðfestir, at hetta ikki er ein haldgóð loysn. Um nýggj brúgv skal gerast verður verkætlanin væl dýrari. Tað vóru játtaðar 300 tús. kr. í 2006. Í 2007 eru 2,5 mió. kr. játtaðar til endamálið, sum skulu brúkast til prosjektering og brúgvagerð.

Innkoyringarvegur til Tórshavn
Sum er, fer ferðslan til og úr Havnini eftir Hvítanesvegnum gjøgnum Hoyvík. Av vaksandi

fólkatalinum í høvuðsstaðnum, og vaksandi ferðsluni í samfelagnum sum heild, fer trýstið á hetta vegastrekkið, sum longu er tann landsvegur, sum mest verður koyrt eftir, at vaksa munandi komandi árini. Fyri at leiða ferðsluna uttan um bygt øki, verður nýggjur vegur gjørdur úr Skarðshjalla gjøgnum Hoyvíkshagan til íbinding við Oyggjarvegin.

Fyrra stig er frá Oyggjarvegnum til á leið Eystan Gil. Næsta byggistig er frá Eystan Gil til íbinding í landsvegin undir Skarðshjalla.

Kostnaðurin av fyrra byggistigi verður væntandi uml. 35-40 mió. kr. Næsta byggistig verður eisini mett at kosta eini 35-40 mió. kr. Allur kostnaðurin av verkætlanini verður sostatt millum 70-80 mió. kr. Kostnaðurin skal takast við fyrivarni, tí annað byggistig er ikki prosjekterað, og er kostnaðurin tí óvissur.

Vegastrekkið "Løgmannabreyt-Oyggjavegurin" varð prosjekterað liðugt í 2004, og eru fýra útbjóðingar av fyrra byggistigi framdar. Fyrsti og annar partur av fyrsta byggistigi er gjørt liðugt. Triði og fjórði partur av fyrra byggistigi varð boðið út í 2005. Nær fyrra byggistig verður liðugt, veldst um játtan til endamálið, og góðkenning frá kommununi.

Fram til ultimo 2005, vóru 12,4 mió. kr. nýttar til endamálið. Í 2006 vóru 6,0 mió. kr. játtaðar. Í 2007 eru 5,0 mió. kr. játtaðar til endamálið.

Akrar
Endamálið við verkætlanini er at breiðka og gera vegin meira tíðarhóskandi. Í 2007 eru 300 tús. kr. játtaðar.

Trygdartiltøk, størri ábøtur og at taka til
Játtanin verður nýtt til at bøta um verandi samferðslukerv, soleiðis at trygdin verður betri á landsvegunum. Talan kann verða um ábøtur á tunnlar, vegir, íbindingar, busslummar o.t. Í 2007 eru 2,5 mió. kr. játtaðar til endamálið.

Bakkaverja í Sumba
Tað eru játtaðar 300 tús. kr. til bakkaverju í Sumba.

Fyrireiking, tunnil til Dals
Endamálið við verkætlanini er at betra vegasambandið millum Húsavík og Dal við einum tíðarhóskandi vega- og tunnilsarbeið í staðin fyri verandi veg, sum liggur í brattlendi, og har omanrudd kemur fyri. Royndarboringar og prosjektuppskot var gjørt í 2005. Ultimo 2005 vóru 1,2 mió kr. brúktar. Vegna vantandi loyvi frá friðingarmynduleikunum var lítið og onki gjørt í 2006. Tað eru játtaðar 6,1 mió kr. til endamálið í 2007, sum skulu brúkast til at gera prosjektið liðugt, og at byrja arbeiðið.

Tunnil Norð um fjall og til Viðareiðis
Arbeiðið umfatar prosjektering av vega- og tunnilsgerð Norð um Fjall og til kanningar til Viðareiðis. Endamálið er at kanna, um tað ber til at gera tunnil tann vegin, í staðin fyri verandi óhóskandi farleið/tunnlar. Kanningararbeiðið Norð um fjall er um at verða liðugt, og klárt er at fara undir at prosjektera. Tó vantar nakað av kanningum til Viðareiðis.

Verkætlanin, tvs. sjálvt kanningararbeiðið, verður leysliga mett at kosta 1,5 mió. kr. íalt. Farið varð undir verkætlanina í 2004, og ultimo 2005 vóru 366 tús. kr. brúktar til endamálið.

Í 2006 vóru 500 tús. kr. játtaðar til endamálið, og eru eisini 500 tús. kr. játtaðar í 2007. Upphæddin verður nýtt til at prosjektera.

Vága floghavn
Tað eru játtaðar 300 tús. kr. til at víðka parkeringsplássið við Vága floghavn.

Vegagerð í Leirvík
Sambært løgtingslóg nr. 60 frá 16. mai 2006 um vegaføring í Leirvík, so skal vegur við tilhoyrandi rundkoyring, gerast frá verandi landsvegi sunnan fyri tunnilsmunnan á Leirvíkstunnlinum, yvir til tilkoyringarvegin til Norðoyartunnilin. Vegaføringin skal leggjast ígjøgnum bygdina eftir verandi vegi. Býggiútreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 40 mió. kr.

Løgtingið játtaði 11,0 mió. kr. til endamálið við eykajáttan í 2006. Upphæddin kann eisini nýtast til at stuðla tiltøkum, sum eru neyðug fyri at tryggja, at ferðslan gjøgnum bygdina kann koyra trygt og væl, til nýggi vegurin kann nýtast. Í 2007 eru 18,0 mió. kr. játtaðar til at halda áfram við arbeiðinum.

Í viðmerkingunum til verklagslógina verður tilskilað, at umleið 30 mió. kr. verða játtaðar í 2007. Vísandi til omanfyri standandi verður játtanin lutað sundur, soleiðis at 18,0 mió. kr. verða játtaðar í 2007, og 18,0 mió. kr. í 2008.

Vegagerð í Kalsoy, vegir og tunnlar
Arbeiðið fevnir um ábøtur og liðugtgerð av øllum vegakervinum á oynni, herímillum eisini tunnlarnar, sum ongantíð eru gjørdir lidnir. Endamálið er at dagføra samferðslukervið í Kalsoynni. Arbeiðið verður leysliga mett at kosta 21,0 mió. kr. íalt.

Higartil er vegurin millum ferjuleguna og Knúksdal, og Syðradal og Knúksdal liðugur, meðan tørvur er á at dagføra restina av vegakervinum. Í 2005 vóru 2,5 mió. kr. nýttar til endamálið. Í 2006 var játtanin 2,0 mió. kr. Í 2007 eru 2,0 mió. kr. játtaðar til endamálið, sum í stóran mun skal nýtast til at tryggja tunnlarnar. Roknast kann við eykaútreiðslum, tí verkætlanin dregur út.

Skopunarfjørður, kanning av undirsjóvartunnli
Arbeiðið umfatar forkanningar í sambandi við ein møguligan undirsjóvartunnil um Skopunarfjørð. Endamálið er at kanna, um tað ber til at gera undirsjóvartunnil, og hvar hann liggur best. Arbeiðið verður mett at kosta 7 mió. kr. íalt. Higartil eru jarðfrøðiligar kanningar, kjarnuboringar, seismiskar og akustiskar kanningar gjørdar.

Ultimo 2005 vóru 677 tús. kr. brúktar til endamálið. Í 2006 var játtanin 5,0 mió. kr. Í 2007 eru 3,0 mió. kr. játtaðar, sum skulu brúkast til víðari kanningar og prosjektering/útbjóðing.

Eftir ætlan byrjar arbeiðið í 2008, og verður verkætlanin skipað og fíggjað eftir sama leisti sum verandi undirsjóvartunnlar.

Nes - Hvalba
Tað eru játtaðar 300 tús. kr. til at gera ábøtur á vegin Nes - Hvalba.

Fámjin - Øravík
Tað eru játtaðar 300 tús. kr. til at gera ábøtur á vegin Fámjin - Øravík.

Søla av jørð til kommunur
Endamálið við játtanini er at fáa heimild til at selja lendi til kommunur.

Leynatunnilin
Verkætlanin umfatar framhaldandi dagføring av tunnlinum. Í 2007 eru 1,0 mió. kr. játtaðar til endamálið.

Rundkoyring í Gøtudali
Verkætlanin umfatar gerð av rundkoyring, har Leirvíksvegurin verður bundin í vegin niðan gjøgnum Gøtudal. Endamálið við verkætlanini er at gera vegamótið tryggari og betri, nú ferðslan er økt munandi. Kostnaðurin er leysliga mettur til 3,0 mió. kr. Ætlanin er at fara undir verkætlanina í 2007, tá 2,5 mió. kr. eru játtaðar til endamálið. Verkætlanin verður eftir ætlan liðug í 2008.

Vegurin, Sandarlíð
Tað eru játtaðar 300 tús. kr. til at gera forkanningar og ábøtur á vegin.

Undirføring við Norðskála
Tað eru játtaðar 700 tús. kr. í 2007 til at gera undirføring til bilar undir landsvegin við Norðskála. Peningurin verður brúktur til forkanningar, fyrireikandi arbeiði og til at gera undirføringina. Ætlandi verður samlaði kostnaðurin 1,0 mió. kr, og er játtanartørvurin tí 300 tús. kr. í 2008.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	37.126	32.452	69.742	129.300	130.200	104.300
Inntøkujáttan	1.108	690	281	100	100	100
10. Nýgerð av landsvegum						
Útreiðslur	**37.126**	**32.452**	**69.742**	**129.300**	**130.200**	**104.300**
11. Lønir v.m.	4.775	3.325	3.533	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	350	70	1.241	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	2	-	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	3	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-5.127	-3.395	-3.612	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	32.315	26.433	67.831	129.300	130.200	104.300
32. Útvegan av løgu o.ø.	970	1.466	387	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	3.539	4.253	62	-	-	-
72. Flyting til kommunur	300	300	300	-	-	-
Inntøkur	**1.108**	**690**	**281**	**100**	**100**	**100**
21. Søla av vøru og tænastum	*1.056*	*650*	*281*	-	-	-
42. Søla av løgu o.ø.	-	-	-	*100*	*100*	*100*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*78*	*40*	-	-	-	-
79. Innanvirkis bókingar	*-26*	-	-	-	-	-

Virksemisyvirlit: 10 Nýgerð av landsvegum

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
A: Høvuðsendamál (netto) (1.000 kr.)	**36.018**	**31.762**	**69.460**	**129.200**	**130.100**	**104.200**
1. Øravík- Hov	1.579	1.369	14.892	70.000	68.400	-
2. Bøur - Gásadalur	6.403	3.396	9.405	3.800	-	-
3. Gamlarætt- Tórshavn	7.809	1.327	-	-	-	-
4. Oyrareingir- Signabø	-	-	1.728	2.000	4.700	-
5. Tjørnuvík	118	-	-	-	-	10.000
6. Skálafjørður- Gøtueiði	1.412	-	-	-	-	-
7. Skálabotnur- Strendur	5.420	4.385	7.368	9.500	6.500	4.000
8. Klaksvík- Norðoyri	-	606	369	500	-	1.000
9. Trygging av Norðskálatunnlinum	-	1.745	6.533	7.000	5.000	-
10. Svínoy	-	-	-	500	-	8.000
11. Fossá, Haldarsvík	-	-	-	300	2.500	500
12. Innkoyringarvegur til Tórshavn	2.814	5.083	3.707	6.000	5.000	9.000
13. Vegagerð við havnina í Skopun	2.034	1.004	2.012	-	-	-
14. Oyri- Norðskála	3.276	4.734	5.724	5.200	-	-
15. Akrar	565	-	876	300	300	500
16. Depil- Norðtoftir	-	-	-	-	-	-
17. Trygdartiltøk, størri ábøtur og til at taka	2.807	3.402	4.505	4.000	2.500	4.000
18. Bakkaverja í Sumba	300	300	300	300	300	-
19. Fyrireikingar, tunnil til Dals	-	271	632	7.000	6.100	10.000
20. Tunnil Norð um Fjall og til Viðareiðis	-	37	366	500	500	22.000
21. Vága Floghavn	312	554	-	-	300	-
22. Vegagerð í Leirvík	-	211	1.094	-	18.000	18.000
23. Norðoyartunnilsvegurin í Klaksvík	244	40	-	2.000	-	-
24. Runavík - Rituvík	-	416	-	-	-	3.000
25. Streymnes - Brúgvin við Streymin	-	2.215	6.276	3.000	-	-
26. Toftir - Nes	-	667	994	-	-	-
27. Vegagerð í Kalsoy, vegir og tunnlar	925	-	1.500	2.000	2.000	2.000
28. Skopunarfj., kanning av undirsjóvartunnli	-	-	677	5.000	3.000	-
29. Nes - Hvalba	-	-	502	-	300	500
30. Famjin - Øravík	-	-	-	400	300	-
31. Søla av jørð til kommunur	-	-	-	-100	-100	-100
32. Brúgvin um Streymin	-	-	-	-	-	6.000
33. Leynatunnilin	-	-	-	-	1.000	3.000
34. Rundkoyring í Gøtudali	-	-	-	-	2.500	500
35. Vegurin, Sandarlíð	-	-	-	-	300	2.000
46. Undirføring við Norðskála	-	-	-	-	700	300

6.38.1.14. Havnir (Løgujáttan)

Verkætlanirnar vóru loknar í 2005.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	22.620	56.319	7.364	-	-	-
Inntøkujáttan	-	4	-	-	-	-
10. Nýgerð av havnum						
Útreiðslur	**22.620**	**56.319**	**7.364**	**-**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	215	590	23	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	38	139	0	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-219	-728	-23	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	20.177	54.758	7.016	-	-	-
32. Útvegan av løgu o.ø.	2.314	458	339	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	95	1.103	9	-	-	-
Inntøkur	**-**	**4**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vørum og tænastum	-	*4*	-	-	-	-

Virksemisyvirlit: 10 Nýgerð av havnum

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**22.620**	**56.315**	**7.364**	**-**	**-**	**-**
1. Skopunar havn	-	-	-	-	-	-
2. Skopun/Gamla Rætt/Hestur	-	-	-	-	-	-
7. Leirvík	-	-	-	-	-	-
8. Samferðsluhavn í Suðuroy	16.497	42.935	4.697	-	-	-
9. Kalsoy (Syðradalur)	6.123	13.299	2.667	-	-	-
10. Havn í Svínoy	-	81	-	-	-	-

6.38.1.18. Stuðul til infrakervið á útoyggjum (Onnur játtan)

Nýggj lóg um at veita stuðul til íløgur í infrakervið á útoyggjum er galdandi frá 1. januar 2006 (ll. nr. 137 frá 13. desember 2005). Endamálið við lógini er at skapa fyritreytir fyri at betra trivnaðin og vinnuligu møguleikarnar á útoyggjum.

Landsstýrismaðurin kann av árligu játtanini veita kommunum stuðul til byggi- og løguarbeiði til vinnulig, mentanarlig, ítróttarlig og onnur endamál. Ætlanin er at nýta 2,6 mió. kr. av játtanini til havnagerð í Skúvoy.

Útoyggjar sum koma undir hesa skipan eru Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	3.500	3.052	2.821	3.000	3.100	3.100
01. Stuðul						
Útreiðslur	**3.500**	**3.052**	**2.821**	**3.000**	**3.100**	**3.100**
11. Lønir v.m.	-	55	423	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	-	2	4	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	-	9	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-57	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	-	0	10	-	-	-
72. Flyting til kommunur	3.500	3.052	2.374	3.000	3.100	3.100

6.38.1.21. Stuðul til havnir (Onnur játtan)

Landið veitti tilsamans 8 mió. kr. í stuðuli til at útbyggja Vágs havn. Málið var endaliga avgreitt í 2004.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	5.000	3.000	-	-	-	-
01. Stuðul til havnina í Vági						
Útreiðslur	**5.000**	**3.000**	**-**	**-**	**-**	**-**
72. Flyting til kommunur	5.000	3.000	-	-	-	-

6.38.2. Samferðsla

6.38.2.10. Flogferðsla (Lógarbundin játtan)

Játtanin fer til at gjalda aftur toll- og MVG- útreiðslurnar hjá Statens Luftfartsvæsen í Vágum, sum standast av m.a. av út-, og umbyggingum í Vága Floghavn. Peningurin verður endurgoldin sambært avtalu frá 26. apríl 1963, og dagføring av avtaluni við skrivi frá landsstýrinum 3. desember í 1992.

Flogvøllurin verður eftir ætlan yvirtikin í 2007, og ber tí til at lækka játtanina.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	-191	-454	-318	-600	-300	-
01. Endurgjald						
Inntøkur	**-191**	**-454**	**-318**	**-600**	**-300**	**-**
61. Skattir og avgjøld	*-191*	*-454*	*-318*	*-600*	*-300*	-

6.38.2.11. P/F Flogsamband (Onnur játtan)

Landið átti meirilutan av partabrøvunum í P/F Flogsambandi. Felagið var avtikið í 2005.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	-	-	3.985	-	-	-
01. P/F Flogsamband						
Inntøkur	**-**	**-**	**3.985**	**-**	**-**	**-**
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	-	-	*2.464*	-	-	-
85. Søla av virðisbrøvum	-	-	*1.521*	-	-	-

6.38.2.13. Flogferðsla (Løgujáttan)

Fyri at tyrlupallarnir skulu lúka tey krøv, sum loftferðslumyndugleikarnir seta til tyrlupallar til ferðafólkaflutning, hevur verið neyðugt at gera pallarnar betri. Tað er komið væl áleiðis við at dagføra tyrlupallarnar sambært krøvunum hjá SLV, men enn vantar pallurin á Kirkju, sum verður mettur at kosta 2,5 mió. kr. Tað eru játtaðar 2,0 mió. kr. til endamálið í 2006, men verður játtanin ikki nýtt, tí tað ikki hevur eydnast at fáa lendi til vega.

Ongin peningur verður játtaður til verkætlanina í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	245	3	2.000	-	2.000
10. Útbygging av tyrlupallum						
Útreiðslur	**-**	**245**	**3**	**2.000**	**-**	**2.000**
11. Lønir v.m.	-	-	3	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	-3	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	-	-	3	2.000	-	2.000
32. Útvegan av løgu o.ø.	-	245	-	-	-	-

Virksemisyvirlit: 10 Útbygging av tyrlupallum

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**-**	**245**	**1.000**	**2.000**	**-**	**2.000**
1. Tyrlupallurin á Kirkju	-	245	1.000	2.000	-	2.000

6.38.2.19. Norðoyatunnilin (Onnur játtan)

Endamálið við játtanini er at fáa fast samband millum Eysturoynna og Borðoynna. P/F Norðoyatunnilin varð stovnað í 2001, við tí endamáli at fyrireika, gera og reka undirsjóvartunnil undir Leirvíksfjørð. Tunnilin lat upp fyri almennari ferðslu í 2006, og er uppgáva felagsins tískil at reka tunnilin.

Tunnilin kostar umleið 405 mió. kr. tilsamans. Av hesum fíggjar landskassin 235 mió. kr. við partapeningi í felagnum, og hinar umleið 170 mió. kr. eru fíggjaðar við lántøku. Afturat hesum kemur kostnaðurin av avleiddari vegagerð við Leirvíkar bygd. Sambært løgtingslóg nr. 60 frá 16. mai 2006 um vegaføring í Leirvík, kunnu byggiútreiðslurnar í mesta lagi verða 40 mió. kr.

Landið játtaði felagnum 30 mió. kr. í 2001 og 32,5 mió. kr. í 2002. Sambært løgtingslóg nr. 33 frá 26. mars 2002 um fast samband um Leirvíksfjørð skulu 32,5 mió. kr. játtast árliga í eitt fýra ára skeið fyrstu ferð í 2005. Í 2009 verða 42,5 mió. kr. játtaðar.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	32.500	32.500	32.500	32.500
01. Norðoyatunnilin P/F						
Útreiðslur	**-**	**-**	**32.500**	**32.500**	**32.500**	**32.500**
81. Keyp av virðisbrøvum	-	-	32.500	32.500	32.500	32.500

6.38.2.20. Fast samband um Vestmannasund (Onnur játtan)

Landið hevur í tíðarskeiðinum frá 1998 til 2005 játtað íalt 160,3 mió kr. til fast samband um Vestmannasund. Peningurin er settur í P/F Vágatunnilin, sum stóð fyri arbeiðinum at gera fast samband um Vestmannasund. Nú er uppgávan hjá felagnum at reka tunnilin. Vinnumálaráðið umboðar landið sum einasti partaeigari í felagnum.

Sambært verklagslógini var seinasta upphæddin játtað til P/F Vágatunnilin í 2005.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	20.000	20.000	20.000	-	-	-
01. Fast samband um Vestmannasund						
Útreiðslur	**20.000**	**20.000**	**20.000**	**-**	**-**	**-**
81. Keyp av virðibrøvum	20.000	20.000	20.000	-	-	-

6.38.3. Samskifti

6.38.3.01. Postverk Føroya (Landsfyritøka)

Postverk Føroya er umskipað til alment partafelag, og verður ongin peningur tí játtaður á høvuðskontuni.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	4.794	-1.779	-	-	-	-
Útreiðslur	125.612	134.149	-	-	-	-
Inntøkur	120.819	135.928	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	-291	-1.779	-	-	-	-
Útreiðslur	**120.528**	**134.149**	**-**	**-**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	77.835	78.428	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	28.742	31.770	-	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	3.882	8.239	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	7.210	6.610	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	356	355	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	-	797	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	-	2.865	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	983	1.115	-	-	-	-
81. Keyp av virðisbrøvum	1.519	3.971	-	-	-	-
Inntøkur	**120.819**	**135.928**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*114.921*	*126.487*	-	-	-	-
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*3.395*	*3.164*	-	-	-	-
68. Roknað renta	*2.114*	*2.187*	-	-	-	-
85. Søla av virðisbrøvum	*388*	*4.090*	-	-	-	-
21. Løguverkætlan						
Nettoútreiðsla	5.084	-	-	-	-	-
Útreiðslur	**5.084**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
31. Bygging og løguframleiðsla	5.084	-	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	-	-	-	-
Onnur	241,0	241,0	-	-	-	-
Fulltíðarstørv	242,0	242,0	-	-	-	-
Lønarpartur (mió. kr.)	77,8	78,4	-	-	-	-

6.38.3.02. Postverk Føroya, umskipað til partafelag (Onnur játtan)

Í fíggjarlógini fyri 2004 vórðu 30 mió. kr. játtaðar til innskot í sambandi við, at Postverk Føroya varð umskipað til alment partafelag. Eingin játtan er til endamálið í 2006.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	21.500	72.219	-	-	-
Inntøkujáttan	-	-	72.219	-	-	-
01. Postverk Føroya, umskipað til partafelag						
Útreiðslur	**-**	**21.500**	**72.219**	**-**	**-**	**-**
81. Keyp av virðisbrøvum	-	21.500	21.500	-	-	-
82. Útlán v.m.	-	-	50.719	-	-	-
Inntøkur	**-**	**-**	**72.219**	**-**	**-**	**-**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	-	-	*72.219*	-	-	-

6.38.3.08. Postverk Føroya, eftirlønir (Lógarbundin játtan)

Tá Postverk Føroya varð yvirtikið í 1976, yvirtók postverkið 76 tænastumenn, sum gjørdust starvsmenn við sama eftirlønarrætti sum tænastumenn.

Eftirlønarskyldan er ein lógarbundin skylda ásett í § 1 í løgtingslóg nr. 45 frá 9. mai 1976 um viðurskiftini hjá starvsfólki á postverkinum í sambandi við yvirtøku. Ásett er, at eftirlønarbyrðan verður býtt millum statin og Føroya Landsstýri í mun til eftirlønaraldur hjá starvsfólki í postverkinum áðrenn yvirtøkuna, og eftirlønaraldur hjá Postverki Føroya eftir yvirtøkuna. Postverk Føroya (nú partafelagið) fær endurgoldið "donsku eftirlønarútreiðslurnar" frá danska statinum, men fíggjaði sjálvt útreiðslurnar fyri starvstíðina eftir yvirtøkuna av rakstri fyritøkunar fram til ultimo 2004.

Tað var mett at vera óheppið, at Postverk Føroya, tvs. brúkarin av posttænastunum, skuldi fíggja eftirlønarskylduna. Spurningurin er eisini tengdur at fyritreytunum hjá postverkinum at kappast við onnur vinnurekandi. Harafturat er at siga, at landskassin annars ber slíkar eftirlønarskyldur við játtan á fíggjarlógini, t.d. til tænastumenn fólkaskúlans og tænastumenn innan heilsuverkið.

Peningur verður tí settur av á fíggjarlógini til endamálið. Tó soleiðis, at P/F Postverkið sjálvt rindar yvir raksturin, tað sum annars svarar til eftirlønina fyri "vanligar" sáttmálasettar starvsmenn (starvsfólk, sum eru sett í starv eftir yvirtøkuna). Útreiðslur landskassans til endamálið fara leysliga mett at vaksa til umleið 5 mió. kr. næstu 3-4 árini. Síðan fara útreiðslurnar at falla líðandi.

Tað verða játtaðar 3,6 mió. kr. til endamálið í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	2.463	3.000	3.600	4.000
01. Postverk Føroya, eftirlønir						
Útreiðslur	**-**	**-**	**2.463**	**3.000**	**3.600**	**4.000**
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	2.463	3.000	3.600	4.000

6.38.3.11. Jólamerkjagrunnurin (Onnur játtan)

Jólamerkjagrunnurin varð skipaður sum sjálvsognargrunnur í 2004. Høvuðskontan er tí niðurløgd.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	388	-	-	-	-
Inntøkujáttan	-	388	-	-	-	-
01. Jólamerkjagrunnurin						
Útreiðslur	**-**	**388**	**-**	**-**	**-**	**-**
54. Stuðul til annað virksemi	-	388	-	-	-	-
Inntøkur	**-**	**388**	**-**	**-**	**-**	**-**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	-	*388*	-	-	-	-

6.38.3.15. Posteftirlit (Rakstrarjáttan)

Eftir § 20 í løgtingslóg nr. 135 frá 18. oktober 2001 um postvirksemi, skal landsstýrismaðurin útinna skráseting og eftirlit við postvinnurekandi. Landsstýrismaðurin hevur latið Fjarskiftiseftirlitinum upp í hendi at røkja hesar uppgávur.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	0	0	0	0	0	0
Útreiðslur	90	130	155	180	180	180
Inntøkur	90	130	155	180	180	180
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	0	0	0	0	0	0
Útreiðslur	**90**	**130**	**155**	**180**	**180**	**180**
11. Lønir v.m.	-	-	-	30	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	4	8	2	40	30	30
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	-	10	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	85	122	153	100	150	150
Inntøkur	**90**	**130**	**155**	**180**	**180**	**180**
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*90*	*130*	*155*	*180*	*180*	*180*

6.38.3.17. Fjarskiftiseftirlitið (Rakstrarjáttan)

Fjarskiftiseftirlitið er stovnur undir Vinnumálaráðnum, sum virkar eftir løgtingslóg nr. 79. frá 23. mai í 1997 um fjarskifti, og reglugerð fyri stovnin. Fjarskiftiseftirlitið hevur eftirlit við fjarskifti og fjarskiftistænastum. Eftirlitið er ráðgevi hjá landsstýrinum á fjarskiftisøkinum viðvíkjandi rættarreglum, frælsisgerð av fjarskiftismarknaðinum o.a.

Skrivstovan hjá Kappingarráðnum var løgd saman við Fjarskiftiseftirlitinum í 1998, og gjørdist stjórin á Fjarskiftiseftirlitinum eisini stjóri fyri Kappingarráðið. Somuleiðis hevur landsstýrismaðurin lagt umsitingina av Posteftirlitinum, Tryggingareftirlitinum og Skráseting Føroya umframt eftirlit við Realinum til Fjarskiftireftirlitið.

Meginparturin av virkseminum hjá Fjarskiftiseftirlitinum verður fíggjaður við rakstrargjaldi og eftirlitsgjøldum. Fjarskiftisveitarar rinda rakstrargjald í mun til marknaðarpart á føroyska fjarskiftismarknaðinum og tíddargjøld sambært kunngerð. Harumframt eru flytingarinntøkur frá omanfyri nevndu stovnum fyri felags skrivstovuhald o.t.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	-455	-90	-80	0	0	0
Útreiðslur	3.364	3.549	3.660	4.000	4.000	4.000
Inntøkur	3.819	3.640	3.740	4.000	4.000	4.000
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	-455	-90	-80	0	0	0
Útreiðslur	**3.364**	**3.549**	**3.660**	**4.000**	**4.000**	**4.000**
11. Lønir v.m.	1.988	2.248	2.466	2.500	2.600	2.600
14. Keyp av vørum og tænastum	903	829	776	900	850	850
15. Keyp av útbúnaði, netto	93	121	112	200	225	225
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	304	351	305	400	325	325
17. Avskrivingar o.a.	8	1	2	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	0	0	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	69	-	-	-	-	-
Inntøkur	**3.819**	**3.640**	**3.740**	**4.000**	**4.000**	**4.000**
21. Søla av vøru og tænastum	*7*	*3*	*3*	-	-	-
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*3.187*	*2.859*	*2.967*	*3.500*	*3.400*	*3.400*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*1*	*1*	*2*	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*624*	*777*	*769*	*500*	*600*	*600*

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**3.364**	**3.549**	**3.660**	**4.000**	**4.000**	**4.000**
1. Tíddarumsiting	1.034	1.411	1.550	1.480	1.500	1.500
2. Fjarskifti	540	383	327	450	400	400
3. Felagsútreiðslur	750	478	525	920	900	900
4. Leiðsla	380	391	401	500	450	450
5. Kærunevnd	210	106	88	150	150	150
6. Tænastur fyri onnur	450	780	769	500	600	600

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	4,5	5,5	5,5	5,5	5,5	5,5
Fulltíðarstørv	5,5	6,5	6,5	6,5	6,5	6,5
Lønarpartur (mió. kr.)	2,0	2,2	2,5	2,5	2,6	2,6

6.38.3.19. KT-fyrisiting (Rakstrarjáttan)

Undirkonta 20. Vanligt virksemi
KT-fyrisitingin tekur sær av kunningartøkniligari samskipan innan landsfyrisitingina sum heild. Herímillum at lýsa og gera heildarætlanir fyri KT-virksemi landsins, taka sær av málum viðvikjandi KT-trygd, orða og fremja KT-politikk hjá landinum, o.t.

Ein yvirskipað ætlan er gjørd fyri alla KT-nýtsluna hjá landinum.

Verkætlanir
KT-rakstrardepilin verður útbygdur í stigum og virkar tvørtur um øll stjórnarráð, og gerast alsamt fleiri aðalráð og landsstovnar partur av rakstrardeplinum. Fyrimunurin við einum felags KT-tænastudepli er, at ymiskar KT-skipanir og vitan kunnu savnast á einum stað. KT-trygdin kann stýrast betur og raksturin av KT-skipanum verður rationaliseraður.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at almenna fyrisitingin skal talgildast. Farið verður undir hesa verkætlan í 2007.

Starvsfólk
Tað starvast trý fólk í KT-fyrisitingini í 2006, eitt undir vanligum virksemi, og tvey við verkætlanum. Mett verður, at starvsfólkini yvirhøvur hava fyrisitingarligar uppgávur, og koma tey tí undir vanligt virksemi í 2007. Sostatt økist starvsfólkatalið ikki.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	-	564	2.247	5.000	5.000	5.030
Útreiðslur	-	564	2.317	5.000	6.000	6.030
Inntøkur	-	-	70	-	1.000	1.000
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	-	564	927	650	1.750	1.780
Útreiðslur	**-**	**564**	**927**	**650**	**1.750**	**1.780**
11. Lønir v.m.	-	133	415	450	1.350	1.372
14. Keyp av vørum og tænastum	-	234	463	150	300	308
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	197	49	50	100	100
40. Verkætlanir						
Nettoútreiðsla	-	-	1.321	4.350	3.250	3.250
Útreiðslur	**-**	**-**	**1.390**	**4.350**	**4.250**	**4.250**
11. Lønir v.m.	-	-	66	1.600	1.000	1.000
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	530	1.750	2.000	2.000
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	794	1.000	1.250	1.250
Inntøkur	**-**	**-**	**70**	**-**	**1.000**	**1.000**
63. Vanligar flytingarinntøkur	-	-	-	-	*1.000*	*1.000*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	-	*70*	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	-	0,3	1,0	1,0	3,0	3,0
Fulltíðarstørv	-	0,3	1,0	1,0	3,0	3,0
Lønarpartur (mió. kr.)	-	0,1	0,4	0,5	1,4	1,4

6.38.4. Ferðslutrygd

6.38.4.01. Akstovan (Rakstrarjáttan)

Akstovan umsitur landsstýrismansins vegna akfarseftirlit, skrásetir/umskrásetir akfør, útvegar koyrikort og krevur inn vegskatt. Virksemið hjá Akstovuni verður fíggjað við tænastugjøldum, sum eru ásett í løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 22. apríl 2003.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.		2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan		-703	-200	-209	-985	-1.050	-944
Útreiðslur		10.987	11.408	11.635	10.715	11.950	12.056
Inntøkur		11.690	11.608	11.844	11.700	13.000	13.000
20.	**Vanligt virksemi**						
	Nettoútreiðsla	-703	-200	-209	-985	-1.050	-944
	Útreiðslur	**10.987**	**11.408**	**11.635**	**10.715**	**11.950**	**12.056**
11.	Lønir v.m.	5.141	5.486	5.788	5.810	6.340	6.440
14.	Keyp av vørum og tænastum	4.238	4.262	4.697	3.625	4.185	4.185
15.	Keyp av útbúnaði, netto	1.030	820	612	650	760	766
16.	Leiga, viðlíkahald og skattur	578	840	541	630	665	665
19.	Ymsar rakstrarútreiðslur	0	-1	-3	-	-	-
71.	Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-
	Inntøkur	**11.690**	**11.608**	**11.844**	**11.700**	**13.000**	**13.000**
21.	*Søla av vøru og tænastum*	*91*	*78*	*88*	*70*	*82*	*82*
25.	*Eftirlits- og umsjónaravgjøld*	*2*	*3*	*2*	*2*	*2*	*2*
61.	*Skattir og avgjøld*	*1*	-	-	-	-	-
62.	*Kravd gjøld, bøtur o.a.*	*11.596*	*11.528*	*11.754*	*11.628*	*12.916*	*12.916*

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**10.987**	**11.408**	**11.635**	**10.715**	**11.950**	**12.056**
1. Leiðsla og hjálparvirksemi	2.670	4.056	3.947	1.179	3.570	3.676
2. Sýn	3.562	3.647	3.177	4.072	3.672	3.672
3. Koyrikort	2.082	1.512	2.129	2.893	2.171	2.171
4. Akfarsskráseting	2.673	2.193	2.382	2.571	2.537	2.537
B: Virksemi (tal)						
2.1. Framdar sýningar	14.648	15.424	13.744	14.900	14.500	14.500
3.1 Útvegað koyrikort	2.643	2.808	2.538	2.600	2.500	2.500
4.1. Skrásett akfør í árinum	2.304	2.324	2.568	2.400	2.500	2.500
4.2. Umskrásett akfør í árinum	5.450	5.609	6.132	5.500	6.000	6.000
C: Eindarkostnaður (kr.)						
2.1. Útreiðslur fyri hvørt sýn	301	322	310	303	323	323
3.1. Útreiðslur fyri hvørt koyrikort	977	732	1.123	1.235	1.109	1.109
4.1. Útreiðslur fyri hvørja skráseting/umskráseting	428	375	367	361	381	381
D: Tørvur (tal)						
2.1 Tørvur á framdum sýnum	20.150	20.773	20.573	20.800	2.100	2.100
E: Tørvsfulnaður (í %)						
2.1 Sýn	60	74	67	72	69	69

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	16,5	18,5	17,0	17,0	18,0	18,0
Fulltíðarstørv	17,5	19,5	18,0	18,0	19,0	19,0
Lønarpartur (mió. kr.)	5,1	5,5	5,8	5,8	6,3	6,4

6.38.4.04. Ráðið fyri ferðslutrygd (Onnur játtan)

Ráðið skal:

- Betra ferðsluvanarnar við upplýsing og fjølbroyttum fyritakssemi
- Stuðla ferðsluundirvísingini við ráðgeving og stuðuli
- Útvega tíðarhóskandi og viðkomandi undirvísingarmiðlar í ferðslulæru
- Skipa fyri skeiðvirksemi og trygdarfremjandi verkætlanum
- Geva sakliga upplýsing um øll viðurskifti, sum eru til ampa fyri ferðslutrygdina
- Samstarva við myndugleikar, stovnar og einstaklingar um ferðslutrygdarspurningar
- Fáa støðugar og viðkomandi upplýsingar um ferðsluóhapp/vanlukkur, skaðaorsøkir o.a. at nýta í ferðslutrygdararbeiðnum
- Fáa regluligt fjølmiðlainnivist um ferðslutrygdarboðskap ráðsins

Afturat játtanini á fíggjarlógini fíggja tryggingarfeløgini og limagjøld frá kommunum eisini ein part av virkseminum hjá RFF. Tryggingarfeløgini rinda 1% av tryggingarinntøkum sínum í limagjaldi til RFF.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	900	900	900	900	900	900
01. Stuðul						
Útreiðslur	**900**	**900**	**900**	**900**	**900**	**900**
54. Stuðul til annað virksemi	900	900	900	900	900	900

Virksemisyvirlit: 01 Stuðul

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
A: Útreiðslur (1.000 kr.)	**2.016**	**2.101**	**2.063**	**2.050**	**2.250**	**2.250**
Skrivstovuhald	1.368	1.397	1.434	1.250	1.450	1.450
Tiltøk: Skeið, undirvísing, lýsingar o.a.	648	704	629	800	800	800
B: Inntøkur (1.000 kr.)	**1.912**	**2.025**	**2.054**	**2.050**	**2.140**	**2.140**
Landskassastuðul	900	900	900	900	900	900
Tryggingarfeløg	920	996	1.010	1.000	1.100	1.100
Limagjald, og aðrar møguligar inntøkur	92	129	144	150	140	140

6.38.5. Ferðavinna

6.38.5.01. Ferðaráð Føroya (Rakstrarjáttan)

Ferðaráð Føroya og Menningarstovan verða løgd saman í ein stovn. Sí høvuðskontu 6.37.1.03. Vinnuframastovan (Rakstrarjáttan).

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.		2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan		7.989	8.048	7.825	9.267	-	-
Útreiðslur		9.617	9.110	8.446	10.187	-	-
Inntøkur		1.628	1.061	621	920	-	-
20.	**Vanligt virksemi**						
	Nettoútreiðsla	7.462	7.329	7.090	7.537	-	-
	Útreiðslur	**8.097**	**7.822**	**7.389**	**7.837**	**-**	**-**
	11. Lønir v.m.	3.363	3.429	3.307	3.447	-	-
	14. Keyp av vørum og tænastum	3.632	3.287	2.953	2.965	-	-
	15. Keyp av útbúnaði, netto	224	96	134	150	-	-
	16. Leiga, viðlíkahald og skattur	347	401	315	350	-	-
	19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-1	0	0	-	-	-
	51. Tilskot til útlandið o.a.	-	-	50	-	-	-
	53. Stuðul til vinnu	532	610	630	925	-	-
	71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-
	Inntøkur	**635**	**493**	**299**	**300**	**-**	**-**
	21. Søla av vøru og tænastum	*96*	*59*	-	*70*	-	-
	29. Ymsar rakstrarinntøkur	*528*	*434*	*299*	*230*	-	-
	63. Vanligar flytingarinntøkur	*11*	-	-	-	-	-
21.	**Marknaðarføring**						
	Nettoútreiðsla	-	-	-	1.000	-	-
	Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**1.000**	**-**	**-**
	53. Stuðul til vinnu	-	-	-	1.000	-	-
22.	**FITUR samstarv Ísland - Føroyar**						
	Nettoútreiðsla	523	700	733	730	-	-
	Útreiðslur	**523**	**729**	**733**	**730**	**-**	**-**
	11. Lønir v.m.	0	11	20	-	-	-
	14. Keyp av vørum og tænastum	22	168	114	30	-	-
	51. Tilskot til útlandið o.a.	500	550	600	700	-	-
	Inntøkur	**-**	**29**	**-**	**-**	**-**	**-**
	29. Ymsar rakstrarinntøkur	-	*29*	-	-	-	-

45. Inntøkufíggjað virksemi, verkætlanir

Nettoútreiðsla	4	20	2	0	-	-
Útreiðslur	**997**	**559**	**324**	**620**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	165	65	0	120	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	759	493	322	500	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	63	-	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	1	2	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-
72. Flyting til kommunur	10	-	-	-	-	-
Inntøkur	**993**	**539**	**322**	**620**	**-**	**-**
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*128*	-	*-3*	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*865*	*539*	*325*	*620*	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	-	-
Onnur	10,0	9,0	9,0	9,0	-	-
Fulltíðarstørv	11,0	10,0	10,0	10,0	-	-
Lønarpartur (mió. kr.)	3,4	3,4	3,3	3,4	-	-

6.38.5.04. Kunningartænastan (Onnur játtan)

Málið um at keypa partabrøv í Nordatlantisk Turistselskab ApS varð endaliga avgreitt í 2004. Málið er sostatt lokið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	66	-	-	-	-
01. Kunningartænastan						
Útreiðslur	**-**	**66**	**-**	**-**	**-**	**-**
81. Keyp av virðisbrøvum	-	66	-	-	-	-

Arbeiðsmarknaður

6.39.1. Ymsar útreiðslur

6.39.1.01. Semingsmannaskipanin (Rakstrarjáttan)

Endamálið við játtanini er at fíggja semingsmannaskipanina á privata arbeiðsmarknaðinum, smb. lóg nr. 86 frá 31. mars í 1928 um seming í arbeiðsósemjum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 40 frá 10. mai 1984. Lógin ásetur at landið skal rinda lønir, skrivstovuhald o.t. hjá semingsmannaskipanini.

Ein nevnd sett av landsstýrismanninum í vinnumálum, hevur arbeitt við lógaruppskotum um skipanir til at loysa ósemjur á arbeiðsmarknaðinum, sum fatar um fastan gerðarrætt og semingsstovn fyri allan arbeiðsmarknaðin. Fastur gerðarrættur er stovnaður, og verður semingsstovnur fyri allan arbeiðsmarknaðin eftir ætlan skipaður í 2007. Semingsstovnur fyri allan arbeiðsmarknaðin verður leysliga mettur at kosta 400 tús. kr. árliga.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	369	183	202	800	300	400
Útreiðslur	369	183	202	800	300	400
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	369	183	202	800	300	400
Útreiðslur	**369**	**183**	**202**	**800**	**300**	**400**
11. Lønir v.m.	136	147	164	700	260	350
14. Keyp av vørum og tænastum	227	26	45	100	40	50
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	10	-	-	-	-
17. Avskrivingar o.a.	7	-	-7	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-

6.39.1.02. Fastur gerðarættur (Onnur játtan)

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava gørt sáttmála um fastan gerðarrætt, og er gerðarrætturin skipaður í 2006. Fasti gerðarrætturin skal loysa trætur, ósemjur og ivamál á arbeiðsmarknaðinum, umframt at savna, menna og kunna um føroyskan arbeiðsmarknaðarrætt.

Eftir § 1, stk. 3 í løgtingslóg nr. 21 frá 11. apríl 2006 um mál ið hoyra undir fasta gerðarrættin, ber landskassin tær útreiðslur til skrivstovu, samsýning og aðrar fastar útreiðslur av fasta gerðarrættinum, ið gjøldini til gerðarrættin ikki røkka til.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	-	1.100	1.100
01. Fastur gerðarættur						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**-**	**1.100**	**1.100**
54. Stuðul til annað virksemi	-	-	-	-	1.100	1.100

6.39.1.07. Arbeiðseftirlitið (Rakstrarjáttan)

Arbeiðseftirlitið er stovnur undir Vinnumálaráðnum og umsitur m.a. føroysku lóggávuna um arbeiðsumhvørvi við tilhoyrandi kunngerðum.

Arbeiðseftirlitið umsitur eisini løgtingslóg um kavaravinnu, og lóg um spreingievni við seinni broytingum. Arbeiðseftirlitið umsitur harumframt reglurnar um mát, løggildar vektir og nøgdarmátarar. Hetta virksemið verður fíggjað av inntøkum. Játtanin er hækkað við 500 tús. kr. fyri at kunna umsita spreingievni á ein tryggan hátt.

Uppgávur stovnsins eru m.a.:

- Ráðgeva og leiðbeina virkjum.
- Regluligar eftirlitsferðir á virkjum og arbeiðsplássum.
- Lógarbundin sýn og eftirlit við vandamiklum arbeiðstólum og -maskinum.
- Lógarbundnar útbúgvingar fyri trygdarskipanina á virkjum.
- Lógarbundin førleikaskeið fyri trukk- og kranaførarar.
- Góðkenna innrættingar á virkjum og arbeiðsgongdir.
Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahús í Føroyum við umleið 20 serlæknaøkjum og 181 seingjarplássum. Innan fleiri onnur serlæknaøki er ráðgeving skipað, soleiðis at læknar uttanlands eru við í viðgerðini av sjúklingum á Landssjúkrahúsinum.

Uppgávan hjá sjúkrahúsinum er at kanna, viðgera, røkta og venja sjúklingar uppaftur. Sjúkrahúsið hevur eina bráðfeingis tilbúgvingarskipan alt samdøgrið innan tey stóru serlæknaøkini.

Í 2000 varð virksemið á Landssjúkrahúsinum skipað í deplar undir leiðslu av leiðandi yvirlækna og leiðandi sjúkrarøktarfrøðingi í felag. Harumframt fekk Landssjúkrahúsið eina trístreingjaða leiðslu við sjúkrahússtjóra, sjúkrarøktarstjóra og læknastjóra, sum í felag taka yvirskipaðu avgerðirnar. Sjúkrahússtjórin hevur evstu ábyrgdina mótvegis Almanna- og heilsumálaráðnum.

Skurðdepilin
Á skurðdeplinum eru serlæknar millum annað innan ortopædi, urologi, plastikkirurgi, gynækologi/obstetrik og almenna kirurgi. Harumframt eru oyrna-, nasa- og hálsdeild, eygnadeild, tannlæknadeild og ein deild fyri skurðstovur og skopiir. Í 2005 varð virksemið á føðideildini og ljósmøðurdeildini samanlagt. Á deplinum eru tvær seingjadeildir við íalt 44

seingjum, dagskurðstovur við 4 seingjum og harafturat eitt kirurgiskt ambulatorium. Í 2006 vóru íalt 112,4 ársverk á skurðdeplinum.

Ambulanta virksemið á skurðdeplinum er nógv økt síðan nýggi bygningurin á Landssjúkrahúsinum varð tikin í nýtslu í september 2004. Hetta hevur havt við sær, at bíðilistarnir eru styttir innan ávís øki, eitt nú innan oyrna-, nasa og háls (ONH) og ortopædi.

Miðað verður ímóti, at ein enn størri partur av virkseminum á skurðdeplinum verður ambulant og dagkirurgi, umframt at innleggingartíðin verður stytt.

Innleggingar pr. ár	**2000**	**2001**	**2002**	**2003**	**2004**	**2005**
Skurðdepilin íalt	**4.286**	**4.340**	**4.601**	**4.592**	**4.924**	**4.714**
Í meiri enn eitt samdøgur	3.253	3.231	3.322	3.308	3.253	2.863
Í minni enn eitt samdøgur	1.033	1.109	1.279	1.284	1.671	1.861

Medisinski depilin
Á medisinska deplinum verður viðgerð veitt millum annað innan barnasjúkur, hjartasjúkur, lungnasjúkur, krabbamein, evnaskiftissjúkur, nýrasjúkur íroknað dialysu, maga-tarm sjúkur, neurologiskar sjúkur, húðsjúkur umframt fysio- og ergoterapi. Ein rehabiliteringseind varð skipað í 2005 av verandi ergo- og fysioterapideildunum. Á deplinum eru 5 sjúklingadeildir við íalt 68 seingjarplássum og harumframt eitt medisinskt ambulatorium. Í 2006 vóru íalt 156,4 ársverk á medisinska deplinum.

Stórar broytingar hava verið á medisinska deplinum hesi seinnu árini, har ein lutfalsliga størri partur av kanningum og viðgerðum er broyttur til ambulant virksemi. Innleggingartíðin er stytt, og hevur møguleiki tí verið fyri at gera fleiri ambulantar viðgerðir. Málið er í framtíðini, at økja ambulanta virksemið enn meira, soleiðis at færri planlagdar innleggingar verða og at tær verða styttri.

Stórur vøkstur hevur verið í útreiðslunum til heilivág og aðrar viðgerðarvørur hesi seinastu árini. Alt bendir á, at útreiðslurnar til heilivág fara at økjast enn meira komandi árini innan eitt nú krabbameinsviðgerð og genterapi. Heilivágurin á marknaðinum gerst støðugt betri við færri hjáárinum, men nýggi heilivágurin er oftast væl dýrari, og tað sæst aftur á útreiðslunum.

Í 2007 er játtanin økt við 1,4 mió. kr. til heilivág og viðgerðarvørur.

Avsettar eru 1.075 tkr. til setan av nervasjúkulækna frá januar 2007 og til setan av krabbameinslækna frá apríl 2007. Til økt virksemi innan dialysuviðgerð eru avsettar 600 tkr.

Innleggingar pr. ár	**2000**	**2001**	**2002**	**2003**	**2004**	**2005**
Medisinski depilin íalt	**4.758**	**5.381**	**5.677**	**6.092**	**6.216**	**5.118**
Í meiri enn eitt samdøgur	3.297	3.193	3.284	3.383	3.408	3.219
Í minni enn eitt samdøgur	1.461	2.188	2.393	2.709	2.808	1.906

Psykiatriski depilin
Psykiatriski depilin veitir viðgerð fyri sálarligum sjúkum í breiðari merking. Innan barna- og

ungdómspsykiatri er samstarv við serlæknar uttanlands. Depilin hevur eisini ábyrgdina av økispsykiatriini. Á deplinum eru 6 sjúklingadeildir við íalt 60 seingjarplássum. Av sjúklingunum á psykiatriska deplinum eru fleiri fastbúgvandi. Í 2006 vóru íalt 115,1 ársverk á psykiatriska deplinum.

Stórar broytingar henda innan psykiatriska økið, og ætlanir eru um aðrar stórar broytingar, sum eru gjøllari lýstar í álitinum um heildarpsykiatri. Sambært hesi ætlan fara liðugt viðgjørdir sjúklingar, sum í løtuni eru fastbúgvandi á psykiatriska deplinum, at flyta út av sjúkrahúsinum. Henda ætlan er farin í gongd. Sum liður í heildarpsykiatriini er ein økispsykiatrisk skipan sett á stovn í 2004. Bráðfeingis og ambulanta viðgerðin av sálarliga sjúkum fólkum verður styrkt við hesum.

Avsettar eru 800 tkr. til Barna- og ungdómspsykiatri í 2007.

Innleggingar pr. år	**2000**	**2001**	**2002**	**2003**	**2004**	**2005**
Psykiatriski depilin íalt	**340**	**316**	**353**	**367**	**408**	**395**
Í meiri enn eitt samdøgur	329	311	343	359	391	388
Í minni enn eitt samdøgur	11	5	10	8	17	7

Bráðdepilin
Bráðdepilin varð endaliga skipaður í 2006. Bráðdepilin umfatar bráðmóttøkuna/skaðastovu, intensiv við 5 seingjum, anæstesi og sjúkraflutningstænastuna og tænasturnar í forhøllini. Í 2006 vóru íalt 82,6 ársverk á Bráðdeplinum.

Umsíðir kemur nýggj vaktarskipan fyri kommunulæknaskipanina, ið skal fevna um alt meginøkið. (Einans Suðuroyar- og Sandoyar læknadømi eru uttanfyri vaktarskipanina). Í hesum sambandi er játtanin til Landssjúkrahúsið hækkað við 1.205 tkr., ið skal nýtast til rakstur av skipanini.

Diagnostiski depilin
Diagnostiski depilin varð eisini endaliga skipaður í 2006. Depilin umfatar røntgen, patologi og rannsóknarstovu. Í 2006 vóru íalt 48 ársverk á diagnostiska deplinum. Hóast økta virksemið seinastu 20 árini á røntgendeildini, hevur starvsfólkaorkan verið næstan óbroytt. Kanningarmynstrið er broytt til meira læknakrevjandi kanningar. Umframt hetta verður MR skannarin við verandi starvsfólkaorku ikki nógv nýttur. Fyri at bøta um hesi viðurskifti varð játtan til yvirlækna og radiograf í hálvum starvi sett av, frá seinnu helvt av 2006.

Stórur vøkstur hevur verið í talinum av røntgen- og rannsóknarstovukanningum hesi seinnu árini, og útreiðslurnar eru øktar munandi.

Talgildar skipanir fyri røntgen og rannsóknarstovukanningar, ið vóru tiknar í nýtslu í 2005/2006, hava bøtt munandi um arbeiðsgongdirnar á diagnostiska deplinum og samskiftið við aðrar deildir, hini sjúkahúsini umframt kommunulæknarnar.

Tal av kanningum/viðgerðum pr. år	**2000**	**2001**	**2002**	**2003**	**2004**	**2005**
A. Røntgen	**14.920**	**15.579**	**16.421**	**16.255**	**16.372**	**15.991**
Innløgd	4.285	4.357	4.255	4.300	3.943	4.777
Ambulant	10.635	11.222	12.166	11.955	12.429	11.214

B. Rannsóknarstovan	**230.162**	**229.692**	**244.425**	**257.144**	**281.013**	**303.133**
Innløgd	96.765	97.816	101.355	102.239	108.248	106.310
Ambulant	133.397	131.876	143.070	154.905	172.765	196.823

Tænastudepilin
Tænastudepilin fevnir um raksturin av bygningum (u.l. 50.000 kvm.), uttanduraøki (u.l. 150.000 kvm., tekniskar veitingar, medisinskan útbúnað, vaskarí, køk, goymslu, reingerð og húsavørð.

Vaskaríið verður rikið sum inntøkufíggjað virksemi, og umleið helvtin av umsetninginum kemur frá at vaska fyri almenn og privat virki. Kappingarráðið hevur í 2006 kannað viðurskiftini á vaskaríinum og komið til, at mannagongdirnar eru í samsvari við galdandi reglur.

Goymslan økir støðugt sítt virksemi og veitir eisini tænastu til aðrar kundar innan heilsuverkið. Í 2007 er ætlanin at fáa til vega nýggja telduskipan til goymsluna.

Køkurin er skjótt 40 ára gamal. Hann er niðurslitin og hevur tørv á stórum ábøtum. Tí verður neyðugt at gera eina heildarætlan fyri køkin. Í 2006 varð ein kaffistova í nýggja bygninginum latin upp, sum køkurin á Landssjúkrahúsinum rekur.

Avsettar eru 300 tkr. til fólk til køkin og 700 tkr. til ein medicoteknikara og øktar rakstrarútreiðslur á teknisku deild.

Fyrisiting
Fyrisitingin hevur nógvar rakstraruppgávur, m.a. lønarútgjalding, starvsfólkamál, bókhald, fíggjarstýring, KT, skrivarauppgávur o.s.fr.

KT er vorðið ein týðandi táttur í virkseminum á sjúkrahúsinum. Nýggja talgilda heilsuskipanin er royndarkoyrd á sjúkahúsinum í 2006. Við talgildum skipanum fyri røntgen og rannsóknarkanningar, er virksemið á sjúkrahúsinum í alt størri mun tengt at KT. Hetta stillar krøv til KT-økið á sjúkrahúsinum, bæði hvat viðvíkur rakstri og trygd.

Í 2006 vóru ialt 22,5 ársverk í fyrisitingini, íroknað ráðleggjarar og KT starvsfólk.

Avsettar eru 2.000 tkr. til tekniskar fyrireikingar á deildunum vegna talgildu heilsuskipanina, og 400 tkr. til førleikamenning.

Sambært avtalu millum Almanna- og heilsumálaráðið og Mentamálaráðið um flyting av Sjúkrasystraskúla Føroya verða 527 tkr. fluttar til § 7 Útbúgving og gransking.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	264.295	287.640	297.947	301.469	315.143	319.900
Útreiðslur	296.075	319.001	331.110	330.360	342.283	347.040
Inntøkur	31.780	31.360	33.163	28.891	27.140	27.140
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	265.204	287.549	298.836	301.469	315.143	319.900
Útreiðslur	**283.455**	**306.449**	**318.653**	**317.054**	**330.718**	**335.475**
11. Lønir v.m.	211.028	227.174	236.169	242.623	251.377	256.134
14. Keyp av vørum og tænastum	67.614	74.960	79.594	69.616	72.481	72.481
15. Keyp av útbúnaði, netto	2.598	1.646	732	2.598	4.622	4.622
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.901	2.337	1.762	1.901	1.919	1.919
17. Avskrivingar o.a.	-	41	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	282	280	365	282	285	285
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	11	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	26	-	-	26	26	26
57. Rentuútreiðslur o.a.	8	11	19	8	8	8
Inntøkur	**18.251**	**18.901**	**19.817**	**15.585**	**15.575**	**15.575**
21. Søla av vøru og tænastum	*9.999*	*10.906*	*12.434*	*9.999*	*9.999*	*9.999*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*1.159*	*844*	*1.125*	*1.159*	*1.159*	*1.159*
42. Søla av løgu o.ø.	-	-	*1*	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*7.094*	*7.150*	*6.257*	*4.427*	*4.417*	*4.417*
40. Inntøkufíggjað virksemi (Vaskarí)						
Nettoútreiðsla	-132	-11	-900	0	0	0
Útreiðslur	**7.190**	**7.914**	**7.004**	**8.272**	**6.520**	**6.520**
11. Lønir v.m.	3.406	3.640	3.797	3.742	2.890	2.890
14. Keyp av vørum og tænastum	3.036	3.182	3.161	2.730	2.130	2.130
15. Keyp av útbúnaði, netto	724	745	37	1.223	1.023	1.023
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	24	347	9	577	477	477
57. Rentuútreiðslur o.a.	-	-	0	-	-	-
Inntøkur	**7.322**	**7.925**	**7.904**	**8.272**	**6.520**	**6.520**
21. Søla av vøru og tænastum	*7.322*	*7.925*	*7.904*	*8.272*	*6.520*	*6.520*
50. Inntøkufíggjað virksemi (Hoyritól)						
Nettoútreiðsla	-777	103	11	0	0	0
Útreiðslur	**5.430**	**4.637**	**5.453**	**5.034**	**5.045**	**5.045**
11. Lønir v.m.	750	699	939	667	678	678
14. Keyp av vørum og tænastum	4.680	3.846	4.512	4.222	4.222	4.222
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	44	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	49	2	85	85	85
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	-	60	60	60
Inntøkur	**6.208**	**4.534**	**5.442**	**5.034**	**5.045**	**5.045**
21. Søla av vøru og tænastum	*6.208*	*4.534*	*5.442*	*5.034*	*5.045*	*5.045*

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
1.: Lønarútreiðslur (1.000 kr.)	**211.028**	**227.174**	**236.169**	**242.623**	**251.377**	**256.134**
1. Medisinski depilin	50.583	55.655	58.346	59.994	62.969	64.522
2. Skurðdepilin	44.388	46.365	43.405	44.325	45.925	46.706
3. Psykiatriski depilin	38.711	41.802	41.577	42.539	43.439	44.177
4. Kliniskar tænastudeildir	25.697	27.375	-	-	-	-
5. Bráðdepilin	-	-	25.604	25.606	27.306	27.774
6. Diagonostiski depilin	-	-	16.910	18.288	18.919	19.240
7. Tænastudepilin	36.860	40.150	33.586	32.174	32.984	33.544
8. Fyrisiting	7.089	7.773	8.048	9.349	9.487	9.648
9. Felagsútreiðslur	7.700	8.054	8.693	10.348	10.348	10.523

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	35,0	37,0	37,0	37,0	38,8	39,0
Onnur	589,0	605,0	613,5	614,6	625,1	625,1
Fulltíðarstørv	624,0	642,0	650,5	651,6	663,8	664,1
Lønarpartur (mió. kr.)	211,0	227,2	236,2	242,6	251,4	256,1

8.20.3.05. Søla av íbúðarbygningum (Løgujáttan)

Arbeitt verður við ætlanum um at selja íbúðabygningarnar á Landssjúkrahúsinum. Ætlanin var upprunaliga at selja bygningarnar í 2005, men fyrireikingin av søluni hevur tikið nógv longri tíð enn væntað.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	-	-	-	30.000	35.000	-
10. Søla av íbúðarbygningum						
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**30.000**	**35.000**	**-**
42. Søla av løgu o.ø.	-	-	-	*30.000*	*35.000*	-

8.20.3.06. Medicoteknisk tól (Løgujáttan)

Arbeiðið at útskifta tólini og talgilda røntgenviðgerðina verður gjørt yvir trý ár. Sambært ætlanini vórðu tólini talgild í 2005 og tólini í øðrum røntgenrúminum á

Landssjúkrahúsinum skift út. Í 2006 verða tólini í røntgendeildunum á Suðuroyar sjúkrahúsi og Klaksvíkar sjúkrahúsi skift út, og í 2007 verður seinna røntgenrúmið á Landssjúkrahúsinum skift út. Samanlagt verður roknað við, at útskiftingin av tólunum og talgildingin kostar umleið 24 mió. kr. íalt. Av hesum vóru játtaðar 10 mió. kr. í 2005, 9 mió. kr. í 2006 og í 2007 eru avsettar 5 mió. kr. Í 2007 eru 3 mió. kr. avsettar til keyp av sjúkrabilum og øðrum tólum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	2.881	1.993	10.045	10.000	8.000	10.000
10. Medicoteknisk tól						
Útreiðslur	**2.881**	**1.993**	**10.045**	**10.000**	**8.000**	**10.000**
14. Keyp av vørum og tænastum	1	8	199	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	-199	-	-	-
32. Útvegan av løgu o.ø.	2.880	1.985	10.045	10.000	8.000	10.000

8.20.3.08. Landssjúkrahúsið, útbygging (Løgujáttan)

Heitini á bygningum hjá Landssjúkrahúsinum eru hesi: A-bygningurin er tað gamla Dronning Alexandrines Hospital, har millum annað føðideildin húsast í dag. B-bygningurin er tann stóri høgi bygningurin har millum annað B8 húsast í dag. C-bygningurin er bygningurin, sum gongur niðan úr B-bygninginum móti J.C. Svabos gøtu. E-bygningurin er gamla barakkin út móti J.C. Svabos gøtu. G-bygningurin er nýbygningurin.

Íløguætlan fram til ár 2015

Í 1999 legði bygginevndin á Landssjúkrahúsinum fram byggiætlan, ið lýsti tørv á og ætlan fyri nútíðargerð av sjúkrahúsinum. Seinni lat bygginevndin eina støðufrágreiðing um verandi bygningar gera. Á hesum grundarlagi var ein íløguætlan gjørd, sum fekk politiska undirtøku. Íalt varð roknað við, at íløgutørvurin til útbygging, umbygging, umvæling, viðlíkahald og brunateknisk krøv vóru umleið 500 mió. kr. í 2000. Medicotekniskur útbúnaður og innbúgv var ikki partur av hesi uppgerð.

Íløguætlanin hevur síðani verið karmur um framhaldandi dagføring av sjúkrahúsinum. Bygginevndin fyri Landssjúkrahúsið hevur handað landsstýrismanninum eina endurskoðaða byggiætlan, sum inniheldur eina dagførda íløguætlan, sum umfatar allar bygningarnar. Íløguætlanin er løgd fram til 2015 við eini árligari játtan upp á 35 mió. kr. Ein verklagslóg er gjørd og samtykt fyri framhaldandi byggivirksemi.

Út- og umbyggingin av Landssjúkrahúsinum

Flutt var inn í nýggja G-bygningin í 2004 og farið er nú víðari til umbyggingarnar og umvælingarnar í B-bygninginum. Í 2005 er íbindingin við nýbygningin gjørd á 1. hædd, soleiðis at bygningarnir verða ein funktionel heild sum ætlað. Eisini er farið víðari við at fyrireika og byrja umbyggingarnar á gomlu skurðgongini og at gera nýggjan sterilcentral. Hetta verða tær stóru verkætlanirnar í 2006 og 2007 og eru tær tengdar at virkseminum í nýggja G-bygninginum. Ætlanin er eisini at byrja at umvæla og umbyggja bygningarnar, ið

húsa psykiatrisku deildunum og at fyrireika høvuðsumvæling og útbygging av B-bygninginum.

Umvæling av bygningunum hjá Landssjúkrahúsinum
Sambært støðisfrágreiðingini frá 1999, sum var ein neyv teknisk meting av gomlu bygningunum, varð staðfest, at ein høvuðsumvæling, umfatandi bæði tekniskar installatiónir og sjálvar bygningslutirnar, var sera átrokandi, skuldu stór bygningsvirði ikki fara fyri skeyti. Saman við høvuðsumvælingini er neyðugt at tillaga gomlu bygningarnar, soleiðis at tørvurin á nøkrum alneyðugum funktiónum verður loystur. Játtanarkarmarnir fyri árini 1999-2004 loyvdu mest sum bert verkætlanini "nýggi G-bygningurin". Sostatt var ikki rúm fyri einari grundleggjandi høvuðsumvæling av gomlu bygningunum. Eftir stendur tó, at framhaldandi høvuðsumvæling av gamla Landssjúkrahúsinum er meira neyðug enn nakrantíð.

Á fíggjarlógini fyri 2007 eru 33 mió. kr. settar av.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	55.335	40.053	35.354	33.000	33.000	39.000
10. Landssjúkrahúsið						
Útreiðslur	**55.335**	**40.053**	**35.354**	**33.000**	**33.000**	**39.000**
11. Lønir v.m.	-	-	248	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	7	92	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-7	-	-248	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	55.335	39.961	35.354	33.000	33.000	39.000

8.20.3.10. Klaksvíkar sjúkrahús (Rakstrarjáttan)

Klaksvíkar sjúkrahús hevur eina skurð- og eina heiliráðdeild. Á Klaksvíkar sjúkrahúsi er settur ein yvirlækni innan medisin. Ein yvirlækni innan kirurgi er sambært seravtalu við Landssjúkrahúsið settur bæði á Klaksvíkar sjúkrahúsi og á Landssjúkrahúsinum. Hini yvirlæknastørvini innan kirurgi verða sett við avloysarum í eitt avmarkað tíðarskeið. Hjálparlæknar røkja forvaktina á báðum deildum. Í tann mun tað er neyðugt, verða serlæknar settir í starv.

Sjúkrahúsið hevur 36 seingjarpláss. Á skurðdeildini eru 24 sengur og á heiliráðdeildini eru 12 sengur. Klaksvíkar sjúkrahús hevur felags rakstur við Norðoya røktarheim. Á røktarheiminum er plass til 36 búfólk.

Klaksvíkar sjúkrahús samstarvar við Landssjúkrahúsið innan læknaligu serøkini. Millum annað er samstarv við røntgenlækna, sálarlækna, eygnalækna, oyrna- nasa- og hálslækna. Av og á koma serlæknar í øðrum greinum á sjúkrahúsið, millum annað innan urologi, handkirurgi og akslakirurgi.

Eina ferð um vikuna hevur rannsóknarstovan á Klaksvíkar sjúkrahúsi opið í læknamiðstøðini í Gøtudali.

Avsettar eru 900 tkr., ið skulu nýtast til KT-fólk, útgerð og til frálæru í sambandi við talgildu heilsuskipanina, umframt til at ganga ymiskum trygdarkrøvum frá Dátueftirlitinum á møti, t.d. viðvíkjandi servararúmi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	46.671	48.867	49.648	49.618	51.598	52.551
Útreiðslur	64.773	68.635	67.756	66.656	68.597	69.550
Inntøkur	18.102	19.768	18.108	17.038	16.999	16.999
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	46.671	48.867	49.648	49.618	51.598	52.551
Útreiðslur	**64.773**	**68.635**	**67.756**	**66.656**	**68.597**	**69.550**
11. Lønir v.m.	49.815	52.589	53.414	54.637	56.066	57.019
14. Keyp av vørum og tænastum	12.957	13.568	12.506	10.569	10.667	10.667
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.315	1.578	920	500	905	905
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	545	486	599	600	606	606
17. Avskrivingar o.a.	-	-	28	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	54	414	287	350	353	353
52. Tilskot til einstaklingar	82	-	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	4	-	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	2	0	2	-	-	-
Inntøkur	**18.102**	**19.768**	**18.108**	**17.038**	**16.999**	**16.999**
21. Søla av vøru og tænastum	*1.067*	*1.210*	*1.089*	*1.000*	*1.000*	*1.000*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*184*	*2.789*	*899*	*100*	*100*	*100*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*16.851*	*15.768*	*16.120*	*15.938*	*15.899*	*15.899*

Virksemisyvirlit

Innleggingar pr. ár	**2000**	**2001**	**2002**	**2003**	**2004**	**2005**
	1.493	**1.425**	**1.527**	**1.523**	**1.593**	**1.560**
Í meiri enn eitt samdøgur	1.274	1.205	1.237	1.198	1.199	1.199
Í minni enn eitt samdøgur	219	220	290	325	394	361

Tal av kanningum/viðgerðum pr. ár	**2000**	**2001**	**2002**	**2003**	**2004**	**2005**
A. Røntgen	**2.518**	**2.446**	**2.465**	**2.855**	**2.206**	**2.553**
Innløgd	679	689	657	786	468	587
Ambulant	1.839	1.757	1.808	2.069	1.738	1.966
B. Rannsóknarstovan	**60.868**	**60.186**	**62.466**	**68.034**	**71.411**	**79.891**
Innløgd	22.053	22.454	22.969	21.389	22.012	21.882
Ambulant	38.815	37.732	39.497	46.645	49.399	58.009

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007** **F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	5,0	5,0	5,0	5,0	5,0	5,0
Onnur	137,0	140,0	140,0	140,0	141,5	141,5
Fulltíðarstørv	142,0	145,0	145,0	145,0	146,5	146,5
Lønarpartur (mió. kr.)	49,8	52,6	53,4	54,6	56,1	57,0

8.20.3.11. Klaksvíkar sjúkrahús (Løgujáttan)

Játtanin er ætlað til framhaldandi viðlíkahald av starvsfólkahúsum, yvirlæknahúsi og einum dupulthúsi omanfyri Víkavegin. Hetta arbeiði byrjaði í 2006.

Ongar størri ábøtur ella broytingar eru gjørdar við starvsfólkahúsini, uttan at skrivstovur til fyrisiting og onkur kanningarrúm eru innrættað. Húsini eru bygd í 1960.

Yvirlæknahúsini eru bygd í 1928 og eru ikki í góðum standi. Takið er tó nýtt. Neyðugt er at bjálva og klæða húsini og møguliga at skifta vindeyguni o.a.

Dupulthúsini oman fyri vegin eru gomul sethús, ið sjúkrahúsið hevur ognað sær fyri mongum árum síðani. Sunnari partur av húsunum má innrættast.

Avsettar eru 1 mió. kr. til endamálið í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	1.995	2.000	1.000	2.000
Inntøkujáttan	-	-	-	3.500	-	-
10. Klaksvíkar sjúkrahús						
Útreiðslur	**-**	**-**	**1.995**	**2.000**	**1.000**	**2.000**
11. Lønir v.m.	-	-	15	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	1	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	-1	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	-	-	1.981	2.000	1.000	2.000
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**3.500**	**-**	**-**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	-	-	*3.500*	-	-

8.20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús (Rakstrarjáttan)

Suðuroyar sjúkrahús hevur eina felags skurð- og heiliráðdeild. Á Suðuroyar sjúkrahúsi eru tveir yvirlæknar innan kirurgi. Umframt hesar eru ofta avloysarar uttanlands frá. Suðuroyar sjúkrahús hevur 26 seingjarpláss. Sjúkrahúsið hevur felags rakstur við Suðuroyar ellis- og røktarheim, ið hevur 30 búfólkapláss. Sjúkrahúsið hevur konsulenttænastu við oyrna-, eygna- og røntgendeildina á Landssjúkrahúsinum.

Sjúkrahúsið hevur eisini eitt laboratorium í Læknamiðstøðini í Vági, ið er opið tvær ferðir um vikuna, har møguleiki er hjá ambulantum sjúklingum at fáa tikið blóðroyndir o.a.

Harumframt hava ljósmøðurnar á sjúkrahúsinum eina ferð um vikuna viðtalu á Læknamiðstøðini í Vági.

Avsettar eru 675 tkr. til setan av medisinskum yvirlækna frá apríl 2007 og 299 tkr. til setan av KT-fólki.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	35.186	36.610	38.670	38.316	40.136	41.120
Útreiðslur	48.576	50.849	53.657	52.198	53.986	54.970
Inntøkur	13.391	14.240	14.987	13.882	13.850	13.850
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	35.186	36.610	38.670	38.316	40.136	41.120
Útreiðslur	**48.576**	**50.849**	**53.657**	**52.198**	**53.986**	**54.970**
11. Lønir v.m.	38.368	40.388	42.733	42.719	44.419	45.403
14. Keyp av vørum og tænastum	7.625	8.104	8.465	7.232	7.299	7.299
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.348	1.028	492	1.239	1.251	1.251
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.193	1.242	1.784	763	770	770
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	44	86	183	245	247	247
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	0	0	-	-	-
Inntøkur	**13.391**	**14.240**	**14.987**	**13.882**	**13.850**	**13.850**
21. Søla av vøru og tænastum	*615*	*844*	*902*	*500*	*500*	*500*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*102*	*110*	*123*	*100*	*100*	*100*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*12.674*	*13.286*	*13.962*	*13.282*	*13.250*	*13.250*

Virksemisyvirlit

Innleggingar pr. ár	**2000**	**2001**	**2002**	**2003**	**2004**	**2005**
	816	**834**	**955**	**898**	**987**	**979**
Í meira enn eitt samdøgur	750	751	826	767	848	851
Í minni enn eitt samdøgur	66	83	129	131	139	128

Tal av kanningum/viðgerð. pr. ár	**2000**	**2001**	**2002**	**2003**	**2004**	**2005**
A. Røntgen	**1.731**	**1.669**	**1.723**	**1.546**	**1.423**	**1.553**
Innløgd	331	310	376	253	286	302
Ambulant	1.400	1.359	1.347	1.293	1.137	1.251
B. Rannsóknarstovan	**35.337**	**35.755**	**37.690**	**41.197**	**46.162**	**52.590**
Innløgd	13.851	13.729	14.631	13.578	17.652	20.264
Ambulant	21.486	22.026	23.059	27.619	28.510	32.326

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	5,0	4,0	5,0	5,0	5,8	5,8
Onnur	105,5	106,5	106,5	106,5	107,5	107,5
Fulltíðarstørv	110,5	110,5	111,5	111,5	113,3	113,3
Lønarpartur (mió. kr.)	38,4	40,4	42,7	42,7	44,4	45,4

8.20.3.17. Eftirlønir innan heilsuverkið (Lógarbundin játtan)

Játtanin verður nýtt til eftirlønir til tænastumenn, ið hava starvast í heilsuverkinum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	8.671	9.305	10.390	11.000	11.800	12.000
20. Eftirløn						
Útreiðslur	**8.671**	**9.305**	**10.390**	**11.000**	**11.800**	**12.000**
52. Tilskot til einstaklingar	8.671	9.305	10.390	11.000	11.800	12.000

8.20.3.20. Serviðgerð uttanlands (Rakstrarjáttan)

Sambært sjúkrahúslógini § 5 hava persónar, ið búgva her í landinum, rætt til ókeypis viðgerð frá sjúkrahúsverkinum. Rætturin til ókeypis viðgerð fevnir eisini um viðgerð í Danmark ella í øðrum landi, tá ávísingin er gjørd í samsvari við tær av Visitatiónsnevndini givnu leiðreglum.

Ávísingar til kanningar og viðgerðir uttanlands kunnu bert verða til viðgerðarstøð, ið landsstýrismaðurin hevur gjørt avtalu við um at taka ímóti føroyskum sjúklingum, ella til viðgerðarstøð, ið Visitatiónsnevndin hevur givið loyvi til í serstøkum førum.

Játtanin til serviðgerð uttanlands kann eisini verða nýtt til at keypa tænastur frá útlandinum til serligar viðgerðir, soleiðis at til ber at viðgera sjúklingar í Føroyum, ístaðin fyri at senda sjúklingar uttanlands, um hetta hevur við sær sparingar í sjúkrahúsverkinum.

Talva 1 vísir, hvussu ofta føroyskir sjúklingar verða sendir til viðgerð uttanlands. Ætlanin fyri 2006 er gjørd við nýtsluni fyri fyrru árshálvu í 2006 sum grundarlag.

Talva 1	2001	2002	2003	2004	2005	Æ2006
Tal av viðgerðaruppihaldum fyri føroyskar sjúklingar	1.424	1.482	1.499	1.774	1.972	1.980

Talva 2 vísir, hvussu nógv avvarðandi eru visiterað at fylgja sjúklingunum til viðgerð uttanlands. Ætlanin fyri 2006 er gjørd við nýtsluni fyri fyrru árshálvu í 2006 sum grundarlag.

Talva 2	2001	2002	2003	2004	2005	Æ2006
Tal av visiteraðum avvarðandi	1.037	1.158	1.080	1.137	1.625	1.630

Sjúklingahotellið Tórshavn

Endamálið við Sjúklingahotellinum Tórshavn er at hýsa sjúklingum og møguliga teimum, ið varða av sjúklingunum, sum føroyska sjúkrahúsverkið sendir niður til viðgerðar. Húsaleigan fyri Sjúklingahotellið Tórshavn verður prístalsjavnað á hvørjum ári. Danskt meirvirðisgjald er tikið við í játtanina hjá Sjúklingahotellinum Tórshavn.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.		2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan		91.079	96.508	99.671	102.121	106.421	106.533
Útreiðslur		91.604	97.184	100.235	102.591	106.891	107.003
Inntøkur		525	675	564	470	470	470
20.	**Vanligt virksemi**						
	Nettoútreiðsla	68.174	70.220	70.878	75.200	78.892	78.892
	Útreiðslur	**68.174**	**70.220**	**70.878**	**75.200**	**78.892**	**78.892**
	11. Lønir v.m.	200	342	333	-	-	-
	14. Keyp av vørum og tænastum	67.963	69.905	70.545	75.200	78.892	78.892
	19. Ymsar rakstrarútreiðslur	11	-27	-	-	-	-
22.	**Flutningur og uppihald**						
	Nettoútreiðsla	12.496	14.588	17.501	15.300	15.639	15.639
	Útreiðslur	**12.496**	**14.588**	**17.501**	**15.300**	**15.639**	**15.639**
	14. Keyp av vørum og tænastum	12.496	14.588	17.501	15.300	15.639	15.639
23.	**Sjúklingahotellið Tórshavn**						
	Nettoútreiðsla	10.409	11.700	11.292	11.621	11.890	12.002
	Útreiðslur	**10.935**	**12.375**	**11.855**	**12.091**	**12.360**	**12.472**
	11. Lønir v.m.	5.568	5.939	6.169	6.395	6.612	6.724
	14. Keyp av vørum og tænastum	2.264	3.081	2.410	2.261	2.282	2.282
	15. Keyp av útbúnaði, netto	113	78	39	51	51	51
	16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2.987	3.270	3.234	3.384	3.415	3.415
	19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-2	-1	0	-	-	-
	54. Stuðul til annað virksemi	4	4	4	-	-	-
	57. Rentuútreiðslur o.a.	1	5	0	-	-	-
	Inntøkur	**525**	**675**	**564**	**470**	**470**	**470**
	21. Søla av vøru og tænastum	*525*	*676*	*552*	*470*	*470*	*470*
	67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	-	*-1*	*11*	-	-	-

8.20.3.25. Hvíldarheimið Naina (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir Hvíldarheiminum Nainu er Ll. nr. 18 frá 9. apríl 1964 um raksturin hjá Hvíldarheiminum Nainu, ið ásetur, at "landskassin letur árliga studning við játtan á fíggjarlógini". Írestandi útreiðslur gjalda kommunurnar og sjúkrakassarnir.

Á heiminum er pláss fyri 25 fólkum. Heimið er ætlað sum hvíldar- og eftirbataheim. Innleggingartíðin er í mesta lagi fýra vikur í senn.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.965	1.652	1.815	1.814	1.846	1.928
Útreiðslur	5.144	5.789	6.000	6.192	6.286	6.368
Inntøkur	3.179	4.137	4.186	4.378	4.440	4.440
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	1.965	1.652	1.815	1.814	1.846	1.928
Útreiðslur	**5.144**	**5.789**	**6.000**	**6.192**	**6.286**	**6.368**
11. Lønir v.m.	3.931	4.435	4.456	4.750	4.831	4.913
14. Keyp av vørum og tænastum	822	838	837	1.199	910	910
15. Keyp av útbúnaði, netto	304	349	370	112	213	213
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	87	168	336	131	332	332
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-1	0	1	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	1	-	-	-	-	-
Inntøkur	**3.179**	**4.137**	**4.186**	**4.378**	**4.440**	**4.440**
21. Søla av vøru og tænastum	*848*	*759*	*769*	*803*	*803*	*803*
63. Vanligar flytingarinntøkur	-	*22*	-	-	-	-
77. Flyting frá kommunum	*2.331*	*3.355*	*3.417*	*3.575*	*3.637*	*3.637*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	14,0	14,0	14,0	14,0	14,0	14,0
Fulltíðarstørv	14,0	14,0	14,0	14,0	14,0	14,0
Lønarpartur (mió. kr.)	3,9	4,4	4,5	4,8	4,8	4,9

8.20.3.30. Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (Rakstrarjáttan)

Arbeiðsuppgávurnar hjá Deildini fyri arbeiðs- og almannaheilsu eru at kanna einstaklingar fyri sjúku ella mein av arbeiðsávum, at meta um arbeiðsførleika, serliga í sambandi við fyritíðarpensjón, endurbúgving og yrkisráðgeving, at ráðgeva Arbeiðseftirlitinum og

Skipasýninum í arbeiðsmedisinskum spurningum, at skipa fyri sjúkufyribyrgjandi arbeiði og at fremja granskingarvirksemi í arbeiðs- og almannaheilsu.

Inntøkufíggjað virksemi

Deildin hevur, síðani hon varð sett á stovn í 1988, skipað fyri ymiskum granskingarvirksemi í bæði arbeiðslæknafrøði og fólkaheilsu. Hetta virksemi, sum hevur verið í neyvum samstarvi við starvsfelagar í Evropa, USA og Asia, er fíggjað við peningi úr almennum og privatum grunnum í USA, ES og Danmark. Ein megintáttur í granskingini er, hvussu dálkingin í heimshøvunum ávirkar heilsuna hjá stívliga 2000 føroyskum børnum, serliga miðnervalag og órinverju teirra. Hesar granskingarætlanir halda fram í fleiri fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.		2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan		1.179	1.266	1.190	1.539	1.302	1.319
Útreiðslur		3.164	4.009	3.990	4.039	3.902	3.919
Inntøkur		1.985	2.743	2.801	2.500	2.600	2.600
20.	**Vanligt virksemi**						
	Nettoútreiðsla	1.179	1.261	1.190	1.539	1.302	1.319
	Útreiðslur	**1.205**	**1.348**	**1.318**	**1.539**	**1.302**	**1.319**
	11. Lønir v.m.	869	964	991	1.341	1.014	1.031
	14. Keyp av vørum og tænastum	357	423	321	176	266	266
	15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	-	22	22	22
	16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-21	-41	4	-	-	-
	19. Ymsar rakstrarútreiðslur	1	2	2	-	-	-
	Inntøkur	**27**	**88**	**128**	**-**	**-**	**-**
	21. Søla av vøru og tænastum	-	-	*128*	-	-	-
	29. Ymsar rakstrarinntøkur	-	*30*	-	-	-	-
	76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*27*	*58*	-	-	-	-
40.	**Inntøkufíggjað virksemi**						
	Nettoútreiðsla	0	5	0	0	0	0
	Útreiðslur	**1.958**	**2.661**	**2.672**	**2.500**	**2.600**	**2.600**
	11. Lønir v.m.	831	1.167	1.117	1.180	1.271	1.271
	14. Keyp av vørum og tænastum	1.127	1.397	1.486	1.280	1.272	1.272
	15. Keyp av útbúnaði, netto	-	5	44	40	50	50
	16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	19	23	-	7	7
	19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	-2	3	-	-	-
	32. Útvegan av løgu o.ø.	-	17	-	-	-	-
	57. Rentuútreiðslur o.a.	0	-1	-1	-	-	-
	71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	58	-	-	-	-
	Inntøkur	**1.958**	**2.656**	**2.672**	**2.500**	**2.600**	**2.600**
	21. Søla av vørum og tænastum	-	*-1*	*-59*	-	-	-
	63. Vanligar flytingarinntøkur	*1.958*	*2.656*	*2.731*	*2.500*	*2.600*	*2.600*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	1,0	1,0	1,0	2,0	1,0	1,0
Fulltíðarstørv	2,0	2,0	2,0	3,0	2,0	2,0
Lønarpartur (mió. kr.)	0,9	1,0	1,0	1,3	1,0	1,0

8.20.4. Viðgerðarstovnar

8.20.4.02. Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (Rakstrarjáttan)

Viðgerðarheimið á Velbastað hevur til endamáls at virka sum viðgerðarstaður fyri rúsdrekkamisnýtarar o.o. Heilbrigdi hevur 20 viðgerðarpláss.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	4.450	4.528	5.110	4.710	4.779	4.835
Útreiðslur	4.450	4.528	5.110	4.710	4.779	4.835
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	4.450	4.528	5.110	4.710	4.779	4.835
Útreiðslur	**4.450**	**4.528**	**5.110**	**4.710**	**4.779**	**4.835**
11. Lønir v.m.	2.631	2.838	3.035	3.211	3.266	3.322
14. Keyp av vørum og tænastum	962	1.164	1.342	980	989	989
15. Keyp av útbúnaði, netto	49	38	410	20	20	20
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	243	138	168	499	504	504
55. Íløgustuðul o.a.	429	280	81	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	135	70	73	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	8,5	9,5	9,5	9,5	9,5	9,5
Fulltíðarstørv	8,5	9,5	9,5	9,5	9,5	9,5
Lønarpartur (mió. kr.)	2,6	2,8	3,0	3,2	3,3	3,3

8.20.4.03. Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið (Rakstrarjáttan)

Blákrossheimið hevur til endamáls at virka sum viðgerðar- og avrúsingarstaður, búfelagsskapur, familju- og ambulantur viðgerðarstaður. Á heiminum eru 15 pláss.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	4.603	4.717	4.707	4.707	4.779	4.839
Útreiðslur	4.691	4.811	4.809	4.781	4.853	4.913
Inntøkur	88	94	102	74	74	74
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	4.603	4.717	4.707	4.707	4.779	4.839
Útreiðslur	**4.691**	**4.811**	**4.809**	**4.781**	**4.853**	**4.913**
11. Lønir v.m.	3.200	3.332	3.403	3.443	3.502	3.562
14. Keyp av vørum og tænastum	897	928	893	898	906	906
15. Keyp av útbúnaði, netto	72	82	122	60	61	61
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	521	470	391	380	384	384
Inntøkur	**88**	**94**	**102**	**74**	**74**	**74**
21. Søla av vøru og tænastum	*88*	*92*	*100*	*74*	*74*	*74*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	-	*2*	*1*	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	9,9	9,2	8,5	8,5	8,5	8,5
Fulltíðarstørv	9,9	9,2	8,5	8,5	8,5	8,5
Lønarpartur (mió. kr.)	3,2	3,3	3,4	3,4	3,5	3,6

8.20.5. Útlán

8.20.5.01. Lánsafturgjald (Onnur játtan)

Kommunur gjalda aftur lán, sum tær hava fingið í sambandi við, at heilsumiðstøð verður bygd. Føroya Gjaldstova umsitur lánsafturgjaldið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	270	-	-	-	-	-
Inntøkujáttan	1.247	501	303	287	196	181
01. Afturgjaldan av lánum						
Útreiðslur	**270**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
82. Útlán v.m.	270	-	-	-	-	-
Inntøkur	**1.247**	**501**	**303**	**287**	**196**	**181**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*1.247*	*501*	*303*	*287*	*196*	*181*

Almannamál

8.21.1. Fyrisiting

8.21.1.04. Almannastovan (Rakstrarjáttan)

Almannastovan veitir sosiala ráðgeving og leiðbeining til einstaklingar. Almannastovan umsitur flestu sosialu útgjaldsskipanirnar.

Almannastovan umsitur:

- Lóg um almenna forsorg (undantikið heimarøkt, stovnar og stuðulsskipan fyri vaksin)
- Lóg um almannapensjónir o.a.
- Lóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- Lóg um viðbót til ávísar pensjónistar
- Lóg um uppihald á stovni
- Lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.o.
- Lóg um stuðul til uppihaldspening
- Lóg um dagpening av sjúku v.m.
- Lóg um ásetan og javning av almannaveitingum
- Lóg um stuðul til umsorgararbeiði

Somuleiðis umsitur Almannastovan ávísar ásetingar í

- Lóg um barnavernd
- Lóg um almenna sjúkratrygging
- Lóg um útreiðslur sjúkrakassanna til heilivág og afturbering landskassans

Harumframt umsitur Almannastovan "Millumlandasáttmálan frá 18. august 2003 við Finnland, Ísland, Noreg og Svøríki sum almannatrygd", sum fekk virknað í Føroyum tann 1. juli 2005. Sáttmálin fevnir um pensjónir, dagpening v.m. Høvuðssetningurin í sáttmálanum er, at norðurlendskir ríkisborgarar verða javnsettir við ríkisborgarar í viðkomandi landi í mun til lóggávuna í landinum. Eisini "Nordisk Konvention om Social Bistand og Sociale Tjenester" frá 14. juni í 1994 er sett í gildi í Føroyum, og hevur sum høvuðssetning at javnseta allar norðurlendskar borgarar á forsorgarøkinum.

Viðskiftaøkið
Almannastovan er á viðskiftaøkinum skipað í fýra økisdeildir, tvær serdeildir og eina veitingardeild. Veitingardeildin, sum er á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn, umsitur og stendur fyri útgjalding av øllum trygdarveitingum, ið verða útgoldnar eftir føstum reglum, herundir pensjónum, sjúkradagpeningi, barnapeningi og stuðli til uppihaldspening.

Økisdeildirnar í Klaksvík, Runavík, Tórshavn og á Tvøroyri veita sosiala ráðgeving og vegleiðing, upplýsa um rættindi sambært sosiallóggávuni, taka ímóti umsóknum um allar almannaveitingar, hjálpa við at fylla út umsóknarbløð, og taka avgerð um uppihalds- og stakveitingar eftir forsorgarlógini, sum í stóran mun eru grundaðar á meting av tørvinum í tí einstaka førinum. Harumframt taka tær avgerðir um og umsita ávísar endurbúgvingarfyriskipanir, samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima, hjálparráð til

persónar við førleikatarni vegna avlamni, umframt taka avgerðir um tillutan av fyritíðarpensjónum vegna einkjustøðu.

Tær báðar serdeildirnar, Arbeiðsmarknaðardeildin og Serdeildin fyri børn og vaksin, veita - eftir ávísing frá økisdeildunum - serligan stuðul til fólk við førleikatarni. Serdeildirnar halda til í somu hølum sum økisdeildin í Tórshavn, men eru ráðgevararnir at hitta regluliga á økisdeildunum kring landið.

Serdeildin fyri børn og vaksin veitir ráð og vegleiðing til fólk, sum hava brúk fyri serligum fyriskipanum, orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku og taka avgerð um veitingar til hesi, herundir um m.a. endurgjald fyri ymsar meirútreiðslur av at uppihalda varandi sjúkum ella brekaðum barni heima, endurgjald fyri inntøkumiss o.a.

Arbeiðsmarknaðardeildin veitir ráð og vegleiðing til fólk, sum hava brúk fyri verkligari ráðgeving og serligum stuðli fyri at kunna uppihalda sær gjøgnum arbeiði og vera virkin í arbeiði. Deildin tekur avgerðir um arbeiðsmarknaðarrættaðar fyriskipanir, herundir um útbúgving, umskúling, upplæring, arbeiðsroynd, vard størv o.t.

Ætlan landsstýrisins er, at fólk við skerdum førleika í so stóran mun sum gjørligt skulu kunna gerast ein partur av vanliga arbeiðsmarknaðinum. Fyri at røkka hesum máli eru almennar skipanir við endurbúgving og vardum størvum settar á stovn. Almannastovan hevur við eini arbeiðsmarknaðardeild lagt dent á at styrkja hesar skipanir. Hóast hesar skipanir eru tøkar, so er tað ein sannroynd, at tað er trupult hjá fólki við skerdum førleika at fáa fótafesti á arbeiðsmarknaðinum. Harumframt eru tað fólk, ið orsakað av breki ella sjúku seinni í lívinum eftir nógv ár á arbeiðsmarknaðinum, sum lættliga verða sett uttan fyri arbeiðsmarknaðin. Fyri at bøta um hesi viðurskifti er neyðugt at seta munagóð tiltøk í verk. Arbeiðsmarknaðardeildin á Almannastovuni skal tískil vera karmur um eina verkætlan, ið hevur sum endamál at fáa fleiri fólk við skerdum førleika á arbeiðsmarknaðin aftur umframt at fyribyrgja, at fólk missa tilknýtið til arbeiðsmarknaðin. Byrjað verður við at styrkja Arbeiðsmarknaðardeildina við eina upphædd uppá 800 tkr. í 2007 og aftur at økja um starvsfólkatalið í 2008.

Síðan 1. januar 2006 hevur Almannastovan harumframt umsitið mál um tillutan av fyritíðarpensjón og uppafturtøku- og eftirlitsmál á fyritíðarpensjónsøkinum. Henda umsiting lá fyri 1. januar 2006 undir Vanlukkutryggingarráðnum.

Fyrisitingarøkið
Fyrisitingarøkið hjá Almannatovuni umfatar fyrst og fremst felagsfyrisitingina á høvuðsdeildini í Tórshavn. Á høvuðsdeildini liggja allar felags fyrisitingarligu uppgávurnar, umfatandi fíggjarviðurskifti, KT, journal og arkiv, roknskap, starvsfólka- og lønarumsiting, yvirskipaðar leiðsluráðleggingar- og skrivarauppgávur, løgfrøðilig og onnur faklig ráðgeving o.a.

Fyrisitingin av landsstovnum fyri børn er løgd undir Almannastovuna. Somuleiðis liggur stuðulsskipanin fyri børn og dag- og umlættingarstovnurin fyri fjølbrekað børn (Reiðrið), sum fór at virka um somu tíð, undir Almannastovuni.

Fyrisitingarøkið umfatar harumframt eftirlit við sjúkrakassanum og umsiting av stuðli til umsorgararbeiði.

23. Høvuðsbarnaverndarnevndin

1. januar 2006 kom løgtiingslóg nr. 18 frá 5. mars 2005 í gildi.

Sambært hesi lóg skal Høvuðsbarnaverndarnevndin taka avgerð í øllum málum um 1) umsorganaryvirtøku og samverurætt, 2) fyriskipanir, har samtykki ikki er fingið frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan, 3) rætt til ókeypis umboðan og 4) familjuviðgerð og dagstovnatilboð hjá landinum.

Tað eru 3 limir og 3 varalimir í Høvuðsbarnaverndarnevndini. Limirnir eru ein løgfrøðingur, ein sálarfrøðingur og ein barnasakkønur.

Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur alla málsviðgerð í nevndu málum. Skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini liggur sum sjálvstøðug eind undir Almannastovuni. Skrivstovan fyrireikar øll mál, sum eftir barnaverndarlógini skulu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til avgerðar.

Skrivstovan er mannað við viðkomandi fakkunnleika - tilsamans 2 fulltíðarstørv.

24. Fakliga nevndin fyri børn við serligum tørvi

Fakliga nevndin fyri børn við serligum tørvi hevur sínar fundir á Almannastovuni, sum hevur ábyrgd av umsitingarliga partinum av arbeiðinum. Nevndin er mannað við 3 serfrøðingum og er sett sambært forsorgarlógini § 32d. Nevndin skal taka støðu í málum, har ivamál eru, um barn er fevnt av § 5 í dagstovnalógini, ella um Stuðulsfólkaskipanin skal veita barni tilboð.

Almannastovan metir, at kostnaðurin av arbeiðinum hjá nevndini er umleið 70 tkr. um árið. Játtanin er til skrivstovuútreiðslur og samsýningar til nevndarlimir. Ein nýggj undirkonta er upprættað til endamálið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	34.365	34.628	35.591	35.900	37.373	38.167
Útreiðslur	34.365	34.652	35.591	35.900	37.373	38.167
Inntøkur	-	24	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	34.365	34.628	35.487	34.904	36.218	37.067
Útreiðslur	**34.365**	**34.652**	**35.487**	**34.904**	**36.218**	**37.067**
11. Lønir v.m.	23.839	24.578	24.107	24.823	26.041	26.890
14. Keyp av vørum og tænastum	6.479	6.816	8.394	6.080	6.139	6.139
15. Keyp av útbúnaði, netto	2.251	1.658	1.051	1.634	1.649	1.649
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.796	1.599	1.897	2.367	2.389	2.389
17. Avskrivingar o.a.	-	-	3	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	1	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	-	37	-	-	-
Inntøkur	**-**	**24**	**-**	**-**	**-**	**-**
77. Flyting frá kommunum	-	*24*	-	-	-	-

23. Høvuðsbarnaverndarnevndin						
Nettoútreiðsla	-	-	103	996	1.085	1.100
Útreiðslur	**-**	**-**	**103**	**996**	**1.085**	**1.100**
11. Lønir v.m.	-	-	-	800	887	902
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	6	96	97	97
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	98	100	101	101
24. Fakliga nevndin fyri børn við serligum tørvi						
Nettoútreiðsla	-	-	-	-	70	-
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**-**	**70**	**-**
11. Lønir v.m.	-	-	-	-	70	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Onnur	77,0	76,0	73,0	69,9	75,5	77,5
Fulltíðarstørv	79,0	78,0	75,0	71,9	77,5	79,5
Lønarpartur (mió. kr.)	23,8	24,6	24,1	24,8	26,0	26,9

Starvsfólkayvirlit: 23 Høvuðsbarnaverndarnevndin

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	-	-	-	2,0	2,0	2,0
Fulltíðarstørv	-	-	-	2,0	2,0	2,0
Lønarpartur (mió. kr.)	-	-	-	0,8	0,9	0,9

Viðmerkjast skal, at her eru bert starvsfólkini hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini tikin við. Samsýningar til nevndarlimirnar og eykalimir verða eisini goldnar av somu kontu.

8.21.1.07. Hjálpartólamiðstøðin (Rakstrarjáttan)

Hjálpartólamiðstøðin er stovnur undir Almannastovuni, sum veitir einstaklingum persónlig hjálpartól. Hjálpartólamiðstøðin veitir ráðgeving, vegleiðing og stuðul til hjálpartól, avlamisakfør o.a. til fólk, ið eru avlamin ella hava onnur brek, varandi sjúku ella aldurstreytaðar veikleikar.

Í játtanini fyri 2007 eru 1,2 mió. kr. fluttar frá 8.21.7.01. Vanlig forsorg, undirkonta 06 Hjálparamboð v.m. § 18 til 8.21.1.07. Hjálpartólamiðstøðin. Hetta eru útreiðslur til sakkøna hjálp og flutningsútreiðslur, sum ikki eiga at verða bókaðar sum lógarbundnar útreiðslur.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	5.282	5.361	5.342	5.343	6.623	6.691
Útreiðslur	5.282	5.361	5.342	5.343	6.623	6.691
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	5.282	5.361	5.342	5.343	6.623	6.691
Útreiðslur	**5.282**	**5.361**	**5.342**	**5.343**	**6.623**	**6.691**
11. Lønir v.m.	3.684	3.916	3.915	3.921	3.988	4.056
14. Keyp av vørum og tænastum	614	546	617	607	1.813	1.813
15. Keyp av útbúnaði, netto	423	349	251	140	141	141
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	554	543	551	675	681	681
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	7	7	7	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	13,0	13,0	13,0	11,5	11,5	11,5
Fulltíðarstørv	13,0	13,0	13,0	11,5	11,5	11,5
Lønarpartur (mió. kr.)	3,7	3,9	3,9	3,9	4,0	4,1

8.21.1.08. Alv-skúlin (Rakstrarjáttan)

Alv-skúlin við Áir er fyri vaksin, sum av likamligum, sálarligum ella sosialum orsøkum hava skerdan arbeiðsførleika. Skúlin strembar eftir at menna næmingarnar og sjálvsálit teirra, so at teir kunnu koma aftur í tær avbjóðingar, sum samfelagið býður, og at teir har kunnu kenna seg væl.

Á skúlanum ber til at taka 9. flokk og FHS. Í ár eru 24 nærmingar tilmeldaðir undirvísing í ALV-skúlanum. Tað eru 14 nærmingar í 9. flokki og 10 FHS-næmingar.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Nettoútreiðslujáttan	2.110	2.168	2.900	3.095	3.144	3.189
Útreiðslur	2.110	2.168	2.900	3.095	3.144	3.189
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	2.110	2.168	2.900	3.095	3.144	3.189
Útreiðslur	**2.110**	**2.168**	**2.900**	**3.095**	**3.144**	**3.189**
11. Lønir v.m.	1.546	1.858	2.141	2.576	2.620	2.665
14. Keyp av vørum og tænastum	322	279	405	322	325	325
15. Keyp av útbúnaði, netto	136	9	214	91	92	92
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	99	22	139	99	100	100
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	7	-	-	7	7	7
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	0	-	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Í lønarflokki 36 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	7,0	8,2	8,5	9,0	8,5	8,5
Fulltíðarstørv	7,0	8,2	8,5	9,0	8,5	8,5
Lønarpartur (mió. kr.)	1,5	1,9	2,1	2,6	2,6	2,7

8.21.1.10. Teknmálstulkatænastan (Onnur játtan)

Teknmálstulkatænastan tekur sær av øllum virksemi í sambandi við tulkingar fyri deyv. Á Teknmálstulkatænastuni starvast ein skrivari í hálvum starvi, ein teknmálstulkur í fullum starvi og ein teknmálstulkur í hálvum starvi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	760	760	760	760	760	760
01. Stuðul						
Útreiðslur	**760**	**760**	**760**	**760**	**760**	**760**
54. Stuðul til annað virksemi	760	760	760	760	760	760

8.21.1.19. Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark (Onnur játtan)

Endamálið við Ráðgevingini fyri føroyingar í Danmark er m.a.:

- at veita føroyingum í Danmark hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum
- at upplýsa um nevnda økið mótvegis einstaklingum, myndugleikum og stovnum í Danmark
- at virka sum millumlið millum føroyingar í Danmark og myndugleikar og stovnar í Danmark og í Føroyum á nevndu økjum.

Upphæddin verður latin til skrivstovuhald hjá ráðgevingini, sum hevur tveir fastløntar sosialráðgevar í starvi. Virksemið hjá ráðgevingini heldur til í Føroyahúsinum í Keypmannahavn og á Sjúklingahotellinum Tórshavn.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	847	897	897	897	897	897
01. Stuðul						
Útreiðslur	**847**	**897**	**897**	**897**	**897**	**897**
54. Stuðul til annað virksemi	847	897	897	897	897	897

8.21.1.22. Stuðul til feløg (Onnur játtan)

Fyribilsskattur verður goldin av rentuinntøku og vinningsbýti, og verður hesin um árslok gjørdur upp saman við aðrari kapitalinntøku sambært § 14 í Kapitalvinningsskattalógini. Henda uppgerð kann geva avlops- ella írestandi skatt, treytað av støddini á øðrum kapitalinntøkum.

Vinningsbýti
Feløg og grunnar o.o., sum luta út vinningsbýti, skulu halda aftur skatt, sum er 35%. Tá útlutað verður til feløg og grunnar o.o. skal verða hildin aftur skattur, sum er 18%. Feløg og grunnar o.o., sum eru fult skattskyldug í Føroyum skulu ikki gjalda skatt av vinningsbýtinum. Avgerandi fyri, í hvørjum fíggjarári skattur av vinningsbýti verður tikin við er, nær vinningsbýtið fellur til gjaldingar. Vinningsbýtið, sum fellur til gjaldingar í 2006, verður tikið við í 2006.

Rentuinntøkur
Fyri likamligar persónar og deyðsbúgv undir fullari ella avmarkaðari skattskyldu í Føroyum verða rentuinntøkur roknaðar upp í uppgerðina viðvíkjandi skattskyldugu inntøkuni eftir § 14 í Kapitalvinningsskattalógini. Henda inntøkan verður skattað 35%. Fyri tilskrivaða rentu í føroyskum peningastovnum er tann regla galdandi, at peningastovnurin, sum tilskrivar rentu á innlánið tvær ferðir um árið, avroknar í rentuskatti 35% beinleiðis í landskassan.

Vinningur av virðisbrævasølu
Vinningur við søla av virðisbrøvum, ið er skattskyldugur eftir Kapitalvinningsskattalógini verður skattaður við 35%. Feløg og grunnar o.o. lata skatt upp á 18%.

Broyting til Kapitalvinningsskattalógina er samtykt í 2006 sum staðfestir, at frá 1. januar 2007 verður skattafrítøkan avtikin fyri virðisbrøv, ið vórðu útvegaði áðrenn Kapitalvinningsskattalógin kom í gildi, tó soleiðis, at tað bert er staðfesti vinningurin eftir 1. januar 2007, ið verður skattaður. Hendan broyting breiðkar skattagrundarlagið, og fer sum frá líður at geva landskassanum fleri inntøkur.

Í 2005 komu inn 30,1 mió. kr. í kapitalvinningsskatti. Metingin er, at kapitalvinningsskatturin í 2006 verður 55 mió. kr., og 60 mió. kr. í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	51.493	62.410	30.121	45.000	60.000	60.000
01. Kapitalvinningsskattur						
Inntøkur	**51.493**	**62.410**	**30.121**	**45.000**	**60.000**	**60.000**
61. Skattir og avgjøld	*51.048*	*62.346*	*29.781*	*45.000*	*60.000*	*60.000*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*445*	*64*	*341*	-	-	-

20.52.1.13. Avgjald av kapitaleftirlønum (Onnur játtan)

Avgjald av kapitaleftirlønum verður kravt sambært løgtingslóg nr. 51 frá 29. desember 1971 um skatt av rentutryggingum v.m. við seinni broytingum (Rentutryggingarlógin).

Avgjald, sum er 35%, verður tikið tá ið kapitaleftirlønir verða útgoldnar við heimild í § 6, b) og c) eftir reglunum í § 7, 1. stk. í sambandi við:

- aldur,
- deyða, og
- úr starvi av óarbeiðsføri

Sambært § 7, 2. stk. verður 55% avgjald tikið við útgjalding av kapitaleftirlønum. Henda regla verður nýtt í sambandi við útgjald í ótíð, t.d. tá ið persónur fer úr føroysku skattaskipanini (flytur av landinum).

Inntøkugrundarlagið fyri avgjald av kapitaleftirlønum er ógvuliga skiftandi m.a. av fólkafráflytingini, og tí er ikki gjørligt at gera neyvar metingar um inntøkurnar. Í 2005 var avgjaldið av kapitaleftirlønum 12,2 mió. kr. Mett verður, at inntøkan í 2006 er 11 mió. kr. Roknað verður við somu inntøku í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	8.179	8.980	12.192	10.000	11.000	11.000
01. Avgjald av kapitaleftirlønum						
Inntøkur	**8.179**	**8.980**	**12.192**	**10.000**	**11.000**	**11.000**
61. Skattir og avgjøld	*8.179*	*8.980*	*12.192*	*10.000*	*11.000*	*11.000*

20.52.1.22. Fíggjarognaravgjald (Onnur játtan)

Lógin um fíggjarognaravgjald og rentuavgjald fór úr gildi 1. januar 1997. Roknað verður ikki við nøkrum inngjaldi frameftir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	-4	-	-	-	-	-
01. Fíggjarognaravgjald						
Inntøkur	**-4**	-	-	-	-	-
61. Skattir og avgjøld	*-4*	-	-	-	-	-
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*0*	-	-	-	-	-

20.52.1.25. Arvagjøld (Onnur játtan)

Arvagjøld verða kravd sambært fólkatingslóg frá 27. mars 1908, sett í gildi við kongligari fyriskipan nr. 468 frá 8. november 1921 við seinni broytingum.

Meginparturin av arvagjaldinum verður goldin landskassanum, og ein minni partur fer í ríkiskassan. Inntøkur landskassans av arvagjaldinum vóru 5,2 mió. kr. í 2005. Mett verður, at arvagjaldið gevur 5 mió. kr. í 2006. Roknað verður við somu inntøku í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	3.885	3.304	5.185	4.000	5.000	5.000
01. Arvagjøld						
Inntøkur	**3.885**	**3.304**	**5.185**	**4.000**	**5.000**	**5.000**
61. Skattir og avgjøld	*3.885*	*3.304*	*5.185*	*4.000*	*5.000*	*5.000*

20.52.1.28. Gjald til barsilsskipan (Onnur játtan)

Aarbeiðstakarar og arbeiðsgevarar rinda 0,62% av A-inntøkuni til at fíggja barsilsskipanina á høvuðskontu 6.39.4.01. Barsilsskipan.

Gjaldið, sum verður kravt inn á sama hátt sum ALS-gjaldið, verður kravt inn við heimild í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, og sum seinast varð broyttt í Ll. nr. 163 frá 22. desember 2005.

Í 2005 vórðu 30,3 mió. kr. goldnar til barsilsskipanina. Mett verður, at upphæddin í 2006 er 78 mió. kr. Hækkingin í mun til 2005 stavar í stóran mun frá, at gjaldið fór frá 0,25% upp til 0,62%. Roknað verður við 82 mió. kr. í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	29.018	29.633	30.308	74.400	82.000	84.000
01. Gjald til barsilsskipan						
Inntøkur	**29.018**	**29.633**	**30.308**	**74.400**	**82.000**	**84.000**
21. Søla av vørum og tænastum	*14*	*19*	*21*	-	-	-
61. Skattir og avgjøld	*29.004*	*29.614*	*30.288*	*74.400*	*82.000*	*84.000*

20.52.1.30. Gjald til Búnaðarstovuna (Onnur játtan)

Á hesa høvuðskontu kemur inn gjald frá Búnaðargrunninum. Gjaldið er fyri jarðarumsiting, sum Búnaðarstovan fremur. Jarðarumsitingin verður mett at kosta 2,7 mió. kr. í 2006. Roknað verður við somu upphædd í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	75	-	-	-
Inntøkujáttan	-	70	2.422	2.700	2.700	2.700
01. Gjald til Búnaðarstovuna						
Útreiðslur	**-**	**-**	**75**	**-**	**-**	**-**
17. Avskrivingar o.a.	-	-	75	-	-	-
Inntøkur	**-**	**70**	**2.422**	**2.700**	**2.700**	**2.700**
63. Vanligar flytingarinntøkur	-	*70*	-	*2.700*	*2.700*	*2.700*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	-	*2.422*	-	-	-

20.52.2. Avgjøld og tollur

20.52.2.01. Meirvirðisgjald (Onnur játtan)

Meirvirðisgjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 við seinni broytingum. Avgjald verður rindað í landskassan í øllum liðum í vinnuligari vøru- og tænastusølu og av innflutningi úr útlondum.

Høvuðsreglan er, at MVG-inntøkurnar verða førdar í tí fíggjarári, tá ið kravið er gjaldkomið. T.e., at eitt krav, sum stavar frá síðsta ársfjórðingi í 2005, fellur til gjaldingar 10. februar í

2006, og verður sostatt tikið við sum inntøka í fíggjarárinum 2006. Fyri vikuavrokningar er avgerandi, nær uppgávan er innlisin í skipanina. Fyri MVG-endurgjald til kommunur er avgerandi, hvat tíðarskeið upphæddin verður útgoldin fyri.

Í 2005 komu 989,2 mió. kr. inn í meirvirðisgjaldi. Hægri búskaparligt virksemi er í samfelagnum, og er serliga privatnýtslan voksin nógv síðsta árið vegna lægri rentu og lagaligari fígging á sethúsamarknaðinum. Dagførd meting fyri 2006 er, at meirvirðisgjaldsinntøkurnar verða 1.150 mió. kr. Roknað verður við 1.210 mió. kr. í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	93.333	112.658	107.073	93.000	110.000	110.000
Inntøkujáttan	1.061.380	1.054.094	1.096.311	1.088.000	1.320.000	1.355.000
01. Meirvirðisgjald						
Útreiðslur	**93.333**	**112.658**	**107.073**	**93.000**	**110.000**	**110.000**
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-1	-	-	-	-	-
72. Flyting til kommunur	93.333	112.658	107.073	93.000	110.000	110.000
Inntøkur	**1.061.380**	**1.054.094**	**1.096.311**	**1.088.000**	**1.320.000**	**1.355.000**
61. Skattir og avgjøld	*1.058.252*	*1.050.790*	*1.095.436*	*1.086.000*	*1.318.000*	*1.353.000*
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*974*	*1.129*	*955*	-	-	-
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*2.154*	*2.175*	*-81*	*2.000*	*2.000*	*2.000*

20.52.2.04. Tollavgjøld (Onnur játtan)

Tollavgjøld verða kravd sambært § 2 í løgtingslóg nr. 120 frá 23. desember 1991 um avgjald á framleiðslu og innflutningi við seinni broytingum (seinast broytt við løgtingslóg nr. 43 frá 27. april 2005).

Tollgjald er GATT-tollur, ið er ásettur fyri hvørt vørunummar sær í Toll- og Vøruskránni. Eingin GATT-tollur verður roknaður av innflutningi úr ES- og EFTA-londunum og teimum londum, Føroyar hava fríhandilsavtalu við.

Fyri 2005 var inntøkan 31,2 mió. kr. Mett verður, at inntøkan av tollavgjøldum er 35 mió. kr. 2006. Roknað verður við somu inntøku í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	33.547	29.920	31.164	30.000	35.000	35.000
01. Tollavgjøld						
Inntøkur	**33.547**	**29.920**	**31.164**	**30.000**	**35.000**	**35.000**
61. Skattir og avgjøld	*31.835*	*28.704*	*30.219*	*30.000*	*35.000*	*35.000*
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*327*	*480*	*315*	-	-	-
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*1.384*	*737*	*630*	-	-	-

20.52.2.07. Punktgjøld (Onnur játtan)

Punktgjøld verða kravd sambært § 1 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi við við seinni broytingum.

Inntøkan var 153,3 mió. kr. í 2005. Dagførd meting er, at inntøkurnar av punktgjøldum verða 180 mió. kr. í 2006.

Samlaða inntøkan av punktgjøldum í 2007 verður mett til 180 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	158.478	173.647	153.338	185.000	180.000	180.000
01. Punktgjøld						
Inntøkur	**158.478**	**173.647**	**153.338**	**185.000**	**180.000**	**180.000**
61. Skattir og avgjøld	*158.478*	*173.647*	*153.338*	*185.000*	*180.000*	*180.000*

20.52.2.10. Lønhæddargjald (Onnur játtan)

Lønhæddargjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993 um lønarhæddaravgjald. Avgjald gjalda hesi virki, sum fyri samsýning lata tænastur:

- Læknavirksemi, tannlækna- og annað tannavirksemi, kiropraktik, fysioterapi og onnur verulig heilsurøkt.
- Tryggingarvirksemi.
- Banka-, sparikassa- og fíggjarvirksemi.

Inntøkan í 2005 var 12,7 mió. kr. Mett verður, at inntøkan í 2006 er 13 mió. kr. Roknað verður við somu inntøku í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	11.892	11.626	12.678	12.000	13.000	13.500
01. Lønhæddargjald						
Inntøkur	**11.892**	**11.626**	**12.678**	**12.000**	**13.000**	**13.500**
61. Skattir og avgjøld	*11.832*	*11.582*	*12.633*	*12.000*	*13.000*	*13.500*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*60*	*44*	*45*	-	-	-

20.52.2.13. Brennioljugjald (Onnur játtan)

Brennioljugjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 179 frá 18. desember 1992 um serligt avgjald á brenniolju (seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 4. apríl 2000).

Eitt gjald í landskassan, sum er 0,80 kr. fyri liturin verður lagt á gassoljusøluna. Fyri gassolju latin til skip yvir 20 GT skal einki gjald verða rindað. Sambært kunngerð nr. 96 frá 29. juni 1994 um endurgjald av serligum oljugjaldi kunnu ávís meirvirðisgjaldskrásett virki fáa góðkenning at fáa endurrindað avgjaldið.

Í 2005 var nettoinntøkan 64 mió. kr. Mett verður, at nettoinntøkan til landskassan av brennioljugjaldinum er 65 mió. kr. í 2006. Roknað verður við 60 mió. kr. í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	15.943	11.628	13.478	12.000	12.000	12.000
Inntøkujáttan	75.720	79.356	77.569	77.000	72.000	72.000
01. Brennioljugjald						
Útreiðslur	**15.943**	**11.628**	**13.478**	**12.000**	**12.000**	**12.000**
53. Stuðul til vinnu	15.943	11.628	13.478	12.000	12.000	12.000
Inntøkur	**75.720**	**79.356**	**77.569**	**77.000**	**72.000**	**72.000**
61. Skattir og avgjøld	*75.720*	*79.356*	*77.569*	*77.000*	*72.000*	*72.000*

20.52.2.16. Framleiðsluavgjøld (Onnur játtan)

Framleiðsluavgjøld verða kravd sambært § 2 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi við seinni broytingum.

Størsti parturin av inntøkunum stavar frá framleiðslu av sterkum øli av kl. I og A. Gjaldið er 7,60 kr. fyri liturin av kl. I og 10 kr. fyri liturin av kl. A.

Inntøkan í 2005 var 18,7 mió. kr. Mett verður, at inntøkan av framleiðslugjaldinum er 20 mió. kr. í 2006. Roknað verður við, at inntøkan verður 20 mió. kr. í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	18.049	18.487	18.714	20.000	20.000	20.000
01. Framleiðsluavgjøld						
Inntøkur	**18.049**	**18.487**	**18.714**	**20.000**	**20.000**	**20.000**
61. Skattir og avgjøld	*18.049*	*18.487*	*18.714*	*20.000*	*20.000*	*20.000*

20.52.2.19. Skrásetingargjald (Onnur játtan)

Skrásetingargjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 175 frá 18. desember 1992 um skrásetingargjald á motorakfør v.m. við seinni broytingum (seinast broytt við løgtingslóg nr. 41 frá 27. apríl 2005).

Fyri motorakfør v.m., sum eru skrásetingarskyldug eftir ferðslulógini, verður ásett skrásetingargjald, sum byggir á eitt virðisgjald. Gjaldið verður rindað í landskassan, samstundis sum akfarið verður skrásett. Rakstrarstaðið fatar eisini um burturbeiningargjald og umskrásetingargjald.

Í 2005 vóru avgjaldsroknaðar 94,5 mió. kr. í skrásetingargjaldi. Nettoinntøkurnar av skrásetingargjaldi eru mettar at verða 140 mió. kr. í 2006. Orsøkin til vøksturin er, at bilasølan verður metstór í 2006.

Mett verður, at bilasølan fer at minka nakað í 2007. Nettoinntøkan av skrásetingargjaldinum verður mett til 115 mió. kr. í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	1.563	1.577	1.409	1.500	1.500	1.500
Inntøkujáttan	77.232	67.833	95.861	91.500	116.500	116.500
01. Skrásetingargjald						
Inntøkur	**77.232**	**67.833**	**92.628**	**91.500**	**113.000**	**113.000**
61. Skattir og avgjøld	*71.292*	*62.521*	*89.858*	*85.500*	*110.000*	*110.000*
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*5.940*	*5.312*	*2.771*	*6.000*	*3.000*	*3.000*

02. Gjald fyri burturbeining av bili						
Útreiðslur	**1.563**	**1.577**	**1.409**	**1.500**	**1.500**	**1.500**
14. Keyp av vørum og tænastum	1.563	1.577	1.409	1.500	1.500	1.500
03. Inntøkur, burturbeiningargjøld						
Inntøkur	**-**	**-**	**3.233**	**-**	**3.500**	**3.500**
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	-	-	*3.233*	-	*3.500*	*3.500*

20.52.2.22. Vegskattur (Vektgjald) (Onnur játtan)

Vegskattur verður kravdur sambært løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 um vegskatt av motorakførum v.m. við seinni broytingum (seinast broytt við løgtingslóg nr. 157 frá 22. desember 2005).

Í 2005 vóru umleið 52 mió. kr. goldnar í vegskatti.

Vegskatturin varð hækkaður frá 2006 at galda. Metingin er, at hetta ger, at inntøkan frá vegskatti verður 77 mió. kr. í 2006.

Mett verður, at samlaða inntøkan av vegskattinum verður 80 mió. kr. í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	11	-	-	-	-
Inntøkujáttan	48.586	50.353	52.271	77.000	80.000	83.000
01. Vegskattur						
Útreiðslur	**-**	**11**	**-**	**-**	**-**	**-**
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	11	-	-	-	-
Inntøkur	**48.586**	**50.353**	**52.271**	**77.000**	**80.000**	**83.000**
61. Skattir og avgjøld	*48.586*	*50.344*	*52.266*	*77.000*	*80.000*	*83.000*
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	-	*9*	*4*	-	-	-

20.52.2.25. Ferðaavgjald (Onnur játtan)

Ferðaavgjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðagjald við seinni broytingum (seinast broytt við løgtinglóg nr. 98 frá 29. desember 1998).
Fyri ferðafólk, ið verða flutt úr Føroyum, skulu gjaldast 120 kr. í landskassan.

Í 2005 var inntøkan av ferðaavgjaldinum 12,3 mió. kr. Mett verður, at inntøkan í 2006 verður beint undir 12 mió. kr., og 12 mió. kr. í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	11.093	10.790	12.306	11.000	12.000	12.000
01. Ferðaavgjald						
Inntøkur	**11.093**	**10.790**	**12.306**	**11.000**	**12.000**	**12.000**
61. Skattir og avgjøld	*10.899*	*10.783*	*12.298*	*11.000*	*12.000*	*12.000*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*195*	*7*	*8*	-	-	-

20.52.2.28. Umhvørvisavgjald á smyrjiolju (Onnur játtan)

Umhvørvisavgjald á smyrjiolju verður kravt sambært løgtingslóg nr. 75 frá 13. mai 1992. Inntøkugrundarlagið er innflutt og framleidd smyrjiolja sambært vørunr. 2710.19.81 og 2710.19.89 í toll- og vøruskránni. Avgjaldið er 1 kr. fyri liturin.

Í 2005 vórðu 2,26 mió. kr. avgjaldsroknaðar í umhvørvisgjaldi á smyrjiolju. Mett verður, at inntøkan er 2,2 mió. kr. í 2006. Roknað verður við somu inntøku í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	2.193	2.288	2.255	2.200	2.200	2.200
01. Umhvørvisgjald						
Inntøkur	**2.193**	**2.288**	**2.255**	**2.200**	**2.200**	**2.200**
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*2.193*	*2.288*	*2.255*	*2.200*	*2.200*	*2.200*

20.52.3. Ymsar inntøkur

20.52.3.01. Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 (Onnur játtan)

Fíggingargrunnurin frá 1992, ið eigur mestsum allan partapeningin í P/f Føroya Banka, er ogn landskassans. Sambært avtaluni millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri frá 10. juni 1998 er tað frameftir Landsstýrið, sum velur allar nevndarlimirnar í Fíggingargrunninum.

í 2005 vórðu 49,7 mió. kr. útgoldnar til landskassan sum vinningsbýti. Vinningsbýtisinntøkur landskassans frá Fíggingargrunninum eru 595 mió. kr. í 2006. Harav vóru tó 535 mió. kr. bókaðar á grein 53 Serinntøkur, fíggjarmál.

Í 2007 verður roknað við 50 mió. kr. frá Fíggingargrunninum. Í sambandi við, at Fíggingargrunnurin fer at selja síni partabrøv í Føroya Banka, fer vanliga vinningsbýtið úr grunninum væntandi at minka so hvørt sum sølan fer fram.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	72.579	19.885	49.711	60.000	50.000	35.000
01. Útluting						
Inntøkur	**72.579**	**19.885**	**49.711**	**60.000**	**50.000**	**35.000**
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*72.579*	*19.885*	*49.711*	*60.000*	*50.000*	*35.000*

20.52.3.04. Útluting frá almennum partafeløgum (Onnur játtan)

Henda høvuðskonta fevnir um vinningsbýti frá almennu partafeløgunum Føroya Tele og Atlantic Airways. Vinningsbýtisinntøkan frá hesum feløgum er 30 mió. kr. í 2006.

Roknað verður við, einum vinningsbýtið upp á 30 mió. kr. í 2007. Í samband við, at arbeitt verður við at einskilja fleiri almennar fyritøkur, kann roknast við, at vinningsbýtisinntøkurnar fara at minka tey komandi árini.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	3.000	12.000	10.092	20.000	30.000	30.000
01. Útluting frá almennum partafeløgum						
Inntøkur	**3.000**	**12.000**	**10.092**	**20.000**	**30.000**	**30.000**
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*3.000*	*12.000*	*10.092*	*20.000*	*30.000*	*30.000*

20.52.3.10. Aðrar inntøkur (Onnur játtan)

Torført er at meta um inntøkuna á hesi høvuðskontu neyvari, tí her verða fleiri óvanligar inntøkur sum til dømis bøtur og annað tílíkt skrásettar.

Mett verður at inntøkan í 2006 verður umleið 8 mió. kr. Roknað verður við somu inntøku í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	44	-44	573	-	-	-
Inntøkujáttan	4.009	9.007	8.140	10.300	8.300	8.300
01. Loyvisgjøld						
Inntøkur	**-**	**0**	**-**	**50**	**50**	**50**
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*-*	*0*	*-*	*50*	*50*	*50*
02. Skeinkiloyvi, avgjøld						
Inntøkur	**45**	**105**	**105**	**65**	**65**	**65**
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*45*	*105*	*105*	*65*	*65*	*65*
04. Navnaprógv						
Útreiðslur	**-**	**2**	**3**	**-**	**-**	**-**
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	3	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	-	1	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	-	1	-	-	-	-
Inntøkur	**11**	**28**	**12**	**10**	**10**	**10**
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*11*	*28*	*12*	*10*	*10*	*10*
05. Bøtur						
Inntøkur	**222**	**3.800**	**28**	**1.000**	**1.000**	**1.000**
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*222*	*3.800*	*28*	*1.000*	*1.000*	*1.000*
07. Burturlutingargjøld						
Inntøkur	**1.097**	**664**	**1.034**	**1.100**	**1.100**	**1.100**
61. Skattir og avgjøld	*1.097*	*664*	*1.034*	*1.100*	*1.100*	*1.100*
09. Lóggilding av el-innleggjarum, avgjøld						
Inntøkur	**107**	**113**	**110**	**75**	**75**	**75**
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*107*	*113*	*110*	*75*	*75*	*75*
11. Víddargjøld						
Útreiðslur	**0**	**0**	**0**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	0	0	0	-	-	-
Inntøkur	**2.107**	**2.107**	**6.028**	**6.000**	**6.000**	**6.000**
21. Søla av vøru og tænastum	*2.107*	*2.107*	*6.028*	*6.000*	*6.000*	*6.000*
12. Nýtslugjald, (royalties, oljufeløg)						
Inntøkur	**420**	**61**	**325**	**-**	**-**	**-**
61. Skattir og avgjøld	*420*	*61*	*325*	*-*	*-*	*-*
13. Afturgjald vegna skuldarumskipan						
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**2.000**	**-**	**-**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*-*	*-*	*-*	*2.000*	*-*	*-*

60. Óvanligar inntøkur

Útreiðslur		**44**	**-46**	**570**	**-**	**-**	**-**
11.	Lønir v.m.	0	-	-	-	-	-
14.	Keyp av vørum og tænastum	-	0	-	-	-	-
17.	Avskrivingar o.a.	-	-	119	-	-	-
19.	Ymsar rakstrarútreiðslur	44	-44	450	-	-	-
53.	Stuðul til vinnu	-	-2	-	-	-	-
Inntøkur		**1**	**2.129**	**498**	**-**	**-**	**-**
21.	*Søla av vøru og tænastum*	*-*	*2.100*	*-*	*-*	*-*	*-*
29.	*Ymsar rakstrarinntøkur*	*1*	*29*	*498*	*-*	*-*	*-*

01. Loyvisgjøld
Gjald sum verða latin fyri handilsloyvi og loyvi til hýruvognskoyring. Persónar lata eitt gjald, sum er kr. 200 og partafeløg kr. 500.

02. Skeinkiloyvi, avgjøld
Gjøld fyri skeinkiloyvi verða kravd sambært kunngerð nr. 60 frá 7. mai 1992 um skeinkingarloyvi. Gjaldið fyri skeinkiloyvi fyri øll rúsdrekkasløg er kr. 10.000. Fyri skeinkiloyvi bara fyri øl og borðvín er gjaldið kr. 5.000.

04. Navnaprógv
Gjøld fyri navnaprógv verða kravd sambært kunngerð nr. 18 frá 21. januar 1993 um gjøld fyri navnaprógv v.m. við seinni broytingum.
Fyri navnaprógv verður latið eitt gjald, sum er kr. 1.000 í landskassan.

05. Bøtur
Inntøkugrundarlagið er m.a. hesar bøtur:
Parkeringarbøtur, sektir - skattalóg nr. 48 frá 21. juni 1985 (§ 125), og fiskibøtur.

07. Burturlutingargjøld
Gjald sum verður latið sambært løgtingslóg nr. 99 frá 29. desember 1998 um gjald av vinningi við burturluting v.m. Ístaðin fyri inntøkuskatt skal verða latið gjald, sum er 15%, í landskassan av hvørjum vinningi, sum hevur meira virði enn kr. 3.000.

09. Løggilding av el-innleggjarum, avgjøld
Samb. løgtingslóg nr. 142 frá 10. juni 1993 og kunngerð nr. 111 frá 17. oktober 1994 skal el-innleggjari til tess at fáa og varðveita løggilding sum el-innleggjari gjalda eitt árligt gjald. Vanliga gjaldið er kr. 1.000, sum skal verða goldið frammanundan í seinasta lagi 15. januar í árinum.

11. Víddargjøld
Samb. § 7 í Fylgiskjal B til løgtingslógirnar nr. 5 frá 8. februar 2000 og nr. 27 frá 17. mai 2004 um ávikavist fyrsta og annað útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, skal loyvishavari rinda árligt víddargjald. Byrjunargjaldið er 500 kr. pr. ferkilometur pr. loyvisdag. Eftir 6 árum hækkar gjaldið árliga.

12. Nýtslugjald (royalties, oljufeløg)
Nýtslugjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 26 frá 21. apríl 1999 um at skatta inntøkur av kolvetnisvirksemi (Kolvetnisskattalógin).

13. Afturgjald vegna skuldarumskipan
Afturgjald vegna skuldarumskipan er sambært løgtingslóg nr. 29 frá 8. apríl 2005 um umskipan av landsskatta-, mvg- og tollskuld v.m. hjá fólki (Skuldarumskipanarlógin).

60. Aðrar inntøkur
Henda undirkonta verður nýtt til óvanligar inntøkur og útreiðslur, sum ikki kunnu verða flokkaðar aðrastaðni.

20.52.5. Flyting frá øðrum greinum

20.52.5.01. Endurrindan av keyps-MVG (Onnur játtan)

Henda høvuðskonta er til miðsavning av øllum keyps-MVG. Í 2005 var endurrindan av keyps-MVG 108,4 mió. kr. Torført er at meta neyvt um hesa játtan, men verður mett, at endurrindanin av keyps-MVG verður 120 mió. kr. í 2006. Mett verður, at endurrindanin av keyps-MVG verður 120 mió. kr. í 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	113.659	113.191	108.450	110.000	120.000	120.000
Inntøkujáttan	314	51	39	-	-	-
01. Endurrindan av keyps-MVG						
Útreiðslur	**113.659**	**113.191**	**108.450**	**110.000**	**120.000**	**120.000**
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-3	-	-	-	-	-
75. Keyps-mvg	113.661	113.191	108.450	110.000	120.000	120.000
Inntøkur	**314**	**51**	**39**	**-**	**-**	**-**
63. Vanligar flytingarinntøkur	*314*	*51*	*39*	-	-	-

Ríkisstuðul

20.54.1. Heildarveiting o.t.

20.54.1.01. Heildarveiting o.t. (Onnur játtan)

01. Heildarveiting
Samsvarandi avtalu við donsku stjórnina, og staðfest av Føroya Løgtingi við ríkislógartilmæli í 2002 var árliga heildarveitingin 615,5 mió. kr. fyri árini 2003 - 2006. Samráðingar eru í gongd millum landsstýrið og donsku stjórnina fyri árini 2007-2008, og verður miðað ímóti, at heildarveitingin verður verandi á sama støði, sum hon hevur verið tey seinastu árini.

02. Endurgjøld
Endurgjald verður rindað úr ríkiskassanum fyri eftirlønir til tænastumenn o.o., sum sett hava verið í føroyska fólkaskúlanum. Útreiðslurnar til læraraeftirlønir eru á høvuðskontu 7.23.2.07. Læraraeftirlønir. Til 30. juni 1997 hevur ríkiskassin endurrindað 80% av øllum útreiðslunum til læraraeftirlønir, men frá 1. juli 1997 verður endurrindað eftir L. nr. 474 frá 10. juni 1997 "Lov om ophævelse af lov om tjenestemænd m.fl. i folkeskolen på Færøerne". Eftir lógini verður skilnaður gjørdur millum eftirlønaraldur, sum vunnin er fyri og eftir 31. desember 1987. Frá 1. juli 1997 endurrindar ríkiskassin 80% av teimum eftirlønarútreiðslum, sum eru fyri eftirlønarrætt, sum vunnin er fyri 31. desember 1987. Útreiðslurnar til læraraeftirlønir vaksa støðugt, men lutfallið millum útreiðslurnar til læraraeftirlønir og tað, ríkiskassin endurrindar, fer at minka ár fyri ár.

Endurrindanin fyri 2005 var 15,5 mió. kr. Í 2006 verður roknað við 19,5 mió. kr., og er sama upphædd ásett fyri 2007.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	629.780	633.156	630.997	630.500	635.000	635.000
01. Heildarveiting						
Inntøkur	**615.500**	**615.500**	**615.500**	**615.500**	**615.500**	**615.500**
65. Flytingar úr Danmark	*615.500*	*615.500*	*615.500*	*615.500*	*615.500*	*615.500*
02. Endurgjøld						
Inntøkur	**14.280**	**17.656**	**15.497**	**15.000**	**19.500**	**19.500**
65. Flytingar úr Danmark	*14.280*	*17.656*	*15.497*	*15.000*	*19.500*	*19.500*

20.54.1.03. Eftirgeving av ríkislánum (Onnur játtan)

Høvuðskontan er niðurløgd.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	1.866	-	-	-	-	-
02. Eftirgeving av ríkislánum, Før. Specialskúla						
Inntøkur	**1.866**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
65. Flytingar úr Danmark	*1.866*	-	-	-	-	-

§ 25 Gjaldføri

Broytingar í "virði" og "skuld v.m."

25.60.1. Ymsar broytingar

25.60.1.01. Broytingar í "virði" og "skuld v.m." (Onnur játtan)

Gjaldføri landskassans broytist í mun til RLÚ úrslitið, sum er úrslit eftir rakstur-, løgu- og útlánsvirksemi landskassans, og í mun til afturgjalding av skuld og útvegan av gjaldføri.

Í 2007 verður roknað við, at RLÚ yvirskotið verður 51,8 mió. kr. Afturat hesum kemur, at serinntøkur, netto vegna sølu av partabrøvum í almennum partafeløgum verða mettar til 508,5 mió. kr., at afturgjalding av skuld verður 347,5 mió. kr., og at útvegan av gjaldføri verður 347,5 mió. kr. Samanumtikið hevur hetta við sær eitt økt gjaldføri upp á 560,3 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	0	0	0	96.821	-560.284	-
10. Ogn						
Inntøkur	**0**	**215**	**0**	**96.821**	**-560.284**	**-**
93. Goymslur og áogn	*70.086*	*-76.122*	*21.502*	-	-	-
94. Tøkur peningur	*656.158*	*356.619*	*126.554*	*96.821*	*-560.284*	-
96. Roknskapartøkniligar-, avstemmingar-, og skráset	*-7.149*	*-5.705*	*-991*	-	-	-
99. Mótkonto til tøkniligar bókingar	*-719.095*	*-274.577*	*-147.064*	-	-	-
20. Útjavningarkonto og skuld						
Inntøkur	**0**	**-215**	**0**	-	-	-
98. Stuttfreistað skuld	*-40.810*	*26.447*	*91.779*	-	-	-
99. Mótkonto til tøkniligar bókingar	*40.810*	*-26.661*	*-91.779*	-	-	-

ad 93:	Goymslur	0
	Skatta-, toll- o.t. skuldarar	0
	Tænastu- og vøruskuldarar	0
	Millumrokning kommunur og alm. stovnar	0
	Aðrir skuldarar	0
	Tíðaravmarkingar	0

ad Skatta-, toll- o.t. skuldarar: Gjaldstovan heldur, at av tí at árliga verður avsett fyri virðisleysar skuldarar, so er gjørligt at halda ein nullvøkstur

ad 94: Er yvirskot á fíggjarlógini eftir rakstrar-, løgu- og útlánsútreiðslur, so veksur ágóði landskassans hetta talið. Er harafturímóti hall á gjaldførispostunum, t.d. um

skattaeftirstøðurnar vaksa, so minkar tað tøka pening landskassans. Somuleiðis minkar tað tøka pening landskassans, tekur t.d. landskassin 200 mió. kr. í láni, men skal gjalda 300 mió. kr. aftur.

Broytingin í tøkum peningi kann verða roknað sum niðanfyri:

Úrslit eftir rakstrar-, løgu- og útlánsútreiðslur	51.784
+ Serinntøkur, netto vegna sølu av partabrøvum í almennum partafeløgum	508.500
+ Gjaldførisbroytingar á "virði og skuld" (ikki tøkur og bundin peningur)	0
+ Upptikin lán - afturgjald av lánum	0
= Broyting í tøkum og bundnum peningi	+560.284

ad 95: Av tí, at útjavningarkontan mestsum bara virkar sum ein tøknilig konta, so er tað mest sum ógjørligt at meta um upphæddina, sum kemur at standa á kontuni.

25.60.1.04. Avtøka av grunnum (Onnur játtan)

Høvuðskontan er niðurløgd.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-69.990	-	-	-	-
Inntøkujáttan	-	0	-	-	-	-
01. Avtøka av Jarðargrunninum						
Útreiðslur	**-**	**-69.899**	**-**	**-**	**-**	**-**
82. Útlán v.m.	-	-69.899	-	-	-	-
Inntøkur	**-**	**0**	**-**	**-**	**-**	**-**
93. Goymslur og áogn	-	*457*	-	-	-	-
94. Tøkur peningur	-	*149.074*	-	-	-	-
98. Stuttfreistað skuld	-	*-1.411*	-	-	-	-
99. Mótkonto til tøkniligar bókingar	-	*-148.120*	-	-	-	-
02. Avtøka av Vakstrarhúsgrunninum						
Útreiðslur	**-**	**-91**	**-**	**-**	**-**	**-**
82. Útlán v.m.	-	-91	-	-	-	-
Inntøkur	**-**	**0**	**-**	**-**	**-**	**-**
94. Tøkur peningur	-	*4.763*	-	-	-	-
98. Stuttfreistað skuld	-	*-9*	-	-	-	-
99. Mótkonto til tøkniligar bókingar	-	*-4.754*	-	-	-	-

25.60.1.07. Stovnan av grunnum (Onnur játtan)

Høvuðskontan er niðurløgd.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	69.990	-	-	-	-
Inntøkujáttan	-	0	-	-	-	-
01. Stovnan av Búnaðargrunninum						
Útreiðslur	**-**	**69.990**	**-**	**-**	**-**	**-**
82. Útlán v.m.	-	69.990	-	-	-	-
Inntøkur	**-**	**0**	**-**	**-**	**-**	**-**
93. Goymslur og áogn	-	*-457*	-	-	-	-
94. Tøkur peningur	-	*-153.836*	-	-	-	-
98. Stuttfreistað skuld	-	*1.419*	-	-	-	-
99. Mótkonto til tøkniligar bókingar	-	*152.874*	-	-	-	-

Afturgjald av landskassaskuld

25.62.1. Afturgjald

25.62.1.01. Afturgjald av landskassaskuld (Onnur játtan)

Langfreistaða skuldin hjá landskassanum var umleið 3,59 mia. kr. við árslok 2005. Skuldin var samansett av lánsbrævaskuld á 3,89 mia. kr. og skuld til danska statin á 0,5 mia. kr. Skuldin til danska statin er rentu- og avdráttarfrí, og fellur bert til gjaldingar um olja verður funnin í føroysku undirgrundini áðrenn 2018.

Lánsbrævaskuldin er givin út í 3 røðum, sum ganga yvir 1 til 5 ár. Skuldin verður umfíggjað heilt ella partvíst eftir tørvi, so hvørt sum røðirnar ganga út.

845,8 mió. kr. av lánsbrævaskuldini verða afturgoldnar í 2006. Í 2007 standa 347,5 mió. kr. í lánsbrøvum til at skula afturgjaldast.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	459.362	347.500	980.000
01. Afturgjald						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**459.362**	**347.500**	**980.000**
83. Afturgjaldan av lánum	-	-	-	459.362	347.500	980.000

Útvegan av gjaldføri

25.64.1. Útvegan

25.64.1.01. Útvegan av gjaldføri (Onnur játtan)

Landskassin hevur lánsbrævaskuld á 3 mia. kr. Lánsbrævaskuldin er givin út í 3 røðum, sum ganga yvir 1 til 5 ár. Skuldin verður umfíggjað heilt ella partvíst eftir tørvi, so hvørt sum røðirnar ganga út. Miðal effektiva rentan í 2006 er mett til 1,5% p.a.

347,5 mió. kr. standa til at skula endurfíggjast í 2007. Ætlan landsstýrsins er at nýta einskiljingarinntøkur landskassans til at gjalda skuld niður við, so fyrivarni verður tikið fyri gjaldføristørvinum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	-	-	-	575.000	347.500	980.000
01. Útvegan						
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**575.000**	**347.500**	**980.000**
87. Upptøka av lánum	-	-	-	*575.000*	*347.500*	*980.000*

§ 53 Serinntøkur, fíggjarmál

Fíggjarmál o.a.

53.15.1. Fíggjarfyrisiting v.m.

53.15.1.21. P/F Føroya Banki, søla av partabrøvum (Onnur játtan)

Farið verður í 2007 undir at einskilja Føroya Banka. Fíggingargrunnurin frá 1992, ið er formligi eigarin av bankanum, stendur fyri hesu uppgávu. Fíggjarmálaráðið hevur mett, at inntøkurnar av einskiljing av Føroya Banka verða 400 mió. kr. í 2007. Henda upphædd svarar til áleið 1/3 av innara virðinum á bankanum.

Fíggjarmálaráðið leggur tó dent á, at avgerandi fyri hvør upphæddin í seinasta enda verður, er hvussu stóran part av bankanum Fíggingargrunnurin velur at selja í 2007 og til hvønn kurs partabrøvini verða seld fyri.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	-	-	-	-	400.000	-
01. P/F Føroya Banki, søla av partabrøvum						
Inntøkur	-	-	-	-	**400.000**	-
85. Søla av virðisbrøvum	-	-	-	-	*400.000*	-

§ 56 Serinntøkur, vinnumál

Handil og vinna annars

56.37.1. Ymsar útreiðslur

56.37.1.26. P/F Føroya Lívstrygging, søla av partabrøvum (Onnur játtan)

Eftir § 1 í løgtingslóg nr. 59 frá 16. mai 2006 um at einskilja P/F Føroya lívstrygging, hevur landsstýrismaðurin materiella heimild til at avhenda 50% av partapeninginum til Ognarfelagið Lív og at selja hini 50% av partapeninginum.

Endamálið við hesi játtan er at fáa fíggjarliga heimild til at selja 50% av partapeninginum.

Við løgtingslóg nr. 105 frá 22. desember 1999 um umskipan av Føroya Lívstrygging stovnaði landsstýrismaðurin eitt lívstryggingarfelag við 500 tús. kr. í partapeningi, sum er teknaður av landsstýrismanninum. Partapeningurin er sostatt ogn landsins, og kunnu partabrøvini ikki avhendast, uttan at fíggjarlig heimild fyriliggur.

Ultimo 2005 var eginogn felagsins 86,6 mió. kr., bonusútjavningin var 111,2 mió. kr. og ábyrgdarpeningurin 25,1 mió. kr. ella 222,9 mió. kr. íalt.

Tað er torført at meta um inntøkurnar hjá landinum av at selja 50% av partapeninginum í P/F Føroya Lívstrygging, men verður her sett ein upphædd uppá 43,3 mió. kr. Tá helvtin av felagnum er seld, fæst at vita, hvussu stórar veruligu inntøkurnar verða.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	-	-	-	-	43.300	-
01. P/F Føroya Lívstrygging, søla av partabrøvum						
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**-**	**43.300**	**-**
85. Søla av virðisbrøvum	-	-	-	-	*43.300*	-

56.37.1.28. P/F Føroya Lívstrygging, avhendan av partabrøvum (Onnur játtan)

Eftir § 1 í løgtingslóg nr. 59 frá 16. mai 2006 um at einskilja P/F Føroya lívstrygging, hevur landsstýrismaðurin materiella heimild til at avhenda 50% av partapeninginum til Ognarfelagið Lív og at selja hini 50% av partapeninginum.

Endamálið við hesi játtan er at fáa til vega fíggjarliga heimild til at avhenda Ognarfelagnum Lív 50% av partapeninginum. Endamálið við Ognarfelagnum Lív er at eiga partapening í P/f Føroya Lívstrygging. Limirnir í felagnum er tryggingartakararnir.

Tað hevur ongar útreiðslur við sær fyri landskassan at avhenda Ognarfelagnum Lív partabrøvini. Talan er bert um eina fíggjarlógartekniska uppseting, sum heimilar landsstýrismanninum at avhenda partabrøvini. Útreiðslur og inntøkur javnviga. Upphæddin á játtanini uppá 43,0 mió. kr. er ásett eftir metta søluvirðinum, t.e. tað, sum landið kundi fingið, um partabrøvini vórðu seld í staðin. Tá helvtin av felagnum er seld íleggjara (sí høvuðskontu 56.37.1.26. P/F Føroya Lívstrygging, søla av partabrøvum) fæst at vita, hvussu stórar veruligu útreiðslurnar/inntøkurnar verða á hesi høvuðskontuni.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	-	43.000	-
Inntøkujáttan	-	-	-	-	43.000	-
01. P/F Føroya Lívstrygging, avhendan av partabrøvum						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**-**	**43.000**	**-**
54. Stuðul til annað virksemi	-	-	-	-	43.000	-
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**-**	**43.000**	**-**
85. Søla av virðisbrøvum	-	-	-	-	*43.000*	-

56.37.1.30. P/F Føroya Lívstrygging, ráðgeving (Onnur játtan)

Sáttmáli er gjørdur við ráðgeva. Ráðgevin skal saman við arbeiðsbólkinum, sum arbeiðir við einskiljingarmálum, gera verkevnisætlan (prospekt) viðvíkjandi P/f Føroya Lívstrygging, virðismeta felagið og ráðgeva við søluni av felagnum o.t.

Játtaðar verða 1,7 mió. kr. til nevndu ráðgeving og líknandi útreiðslur, sum standast av søluni.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	-	1.700	-
01. P/F Føroya Lívstrygging, ráðgeving						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**-**	**1.700**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	-	1.700	-

Samferðsla og samskifti

56.38.2. Samferðsla

56.38.2.52. P/F Atlantsflog, ráðgeving (Onnur játtan)

Sáttmáli er gjørdur við ráðgevingarfelag, um at gera verkevnisætlan (prospekt) í sambandi við ætlanina at selja 33% av partapeninginum í P/F Atlantsflogi, at virðismeta felagið, standa fyri at selja felagið, umframt at bera so í bandi, at felagið verður skrásett á føroyska virðisbrævamarknaðinum.

Verkevnisætlanin er gjørd, og er komið væl áleiðis við at virðismeta felagið í 2006. Tað sum síðan er eftir at gera, er at selja og skráseta felagið, og verður 1,0 mió. kr. játtað til endamálið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	-	1.000	-
01. P/F Atlantsflog, ráðgeving						
Útreiðslur	-	-	-	-	**1.000**	-
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	-	1.000	-

56.38.2.54. P/F Atlantsflog, søla av partabrøvum (Onnur játtan)

Málið
Eftir § 1 í løgtingslóg nr. 37 frá 9. mai 2006 um at einskilja P/F Atlantsflog, hevur landsstýrismaðurin heimild til at selja upp til 33% av partapeninginum í felagnum. Eftir § 2 í lógini skal felagið skrásetast á føroyska virðisbrævamarknaðinum. Sum nú er, eigur landið allan partapeningin í felagnum.

Hetta er partur av eini heildarætlan hjá landsstýrismanninum um at einskilja 66% av partapeninginum í P/F Atlantsflog. Politisk undirtøka er fyri hesum, men skal tilgongdin byggja á tvær løgtingssamtyktir heldur enn á eina.

Mannagongd søla
Mannagongdin er henda, at landsstýrismaðurin í fyrsta søluumfari selur upp til 33% av partapeninginum í P/F Atlantsflog. Av teimum 33% verða 3% boðin út til starvsfólkini í P/F Atlantsflog. Hini 30% skulu verða boðin almenninginum.

Eftir søluna verður felagið skrásett á virðisbrævamarknaðinum. Í øðrum umfari ætlar landsstýrismaðurin at biðja um heimild til at selja 33% afturat av partapeninginum, sum

verða seld virknum íleggjarum. Landið fer sostatt at sita eftir við 34% av partapeninginum, eftir at felagið er einskilt.

Landsstýrismaðurin fer at taka atlit í sambandi við søluna, so at virksemið hjá felagnum verður ikki flutt av landinum eftir tað, at meirilutin í felagnum er seldur.

Tá P/F Atlantsflog er skrásett á virðisbrævamarknaði, merkir tað, at øll, sum hava hug og keypsorku, kunnu ogna sær partabrøv í felagnum. Talan kann verða um føroyskar og útlendskar íleggjarar.

Samanumtikið verður sølan av P/F Atlantsflog skipað soleiðis:

1. umfar í 2007		Í 2007	2. umfar 2008	Landið
Almenningurin	Starvsfólk	Skráseting	Virkin íleggjari	F.L.
30%	3%		33%	34%
33%			33%	34%

Ognarmeting og fíggjarheimild

Tað er sera torført at meta um inntøkurnar hjá landinum av at selja 33% av partapeninginum í P/F Atlantsflog. P/F Atlantsflog hevði 31. desember 2005 ein bókførdan eginpening, sum er umleið 152 mió. kr. Harafturat hækkar eginpeningurin samsvarandi partapeninginum, tá hangarurin og tyrlan verða skotin inn í felagið við ognarinnskoti (apportinnskoti), ella við leysliga mett 51,8 mió. kr. Eginpeningurin verður eftir hesum 203,8 mió. kr.

Hugsa vit okkum, at inntøkur landskassans av søluni verða 1/3 av fyribils metta eginpeninginum, so verða inntøkurnar 67,9 mió. kr.

Endamálið við játtanini er at fáa fíggjarliga heimild til at selja upp til 33% av P/F Atlantsflogi. Tað at inntøkurnar verða settar til 67,9 mió kr., er ein leyslig meting.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2003 R	2004 R	2005 R	2006 J	**2007 F**	2008 Æ
Inntøkujáttan	-	-	-	-	67.900	-
01. P/F Atlantsflog, søla av partabrøvum						
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**-**	**67.900**	**-**
85. Søla av virðisbrøvum	-	-	-	-	*67.900*	-

Játtanarskipanin

1. Fíggjarlógin

Fíggjarlógin er grundarlag undir virkseminum hjá landinum í einum fíggjarári.

Fíggjarlóg, fíggjarlógaruppseting, játtanarsløg og viðmerkingar eru týðandi amboð hjá løgtinginum at stýra, ávirka og raðfesta útreiðslur og inntøkur landsins, og eru við til at áseta, hvørjar heimildir, skyldur og hvørja ábyrgd ein landsstýrismaður hevur viðvíkjandi umsiting av játtanum. Fíggjarlógin er eisini ein týðandi miðil til at kunna almenningin um politiskar avgerðir.

Sambært § 43, stk. 2, í stýriskipanarlógini má eingin útreiðsla verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður.

Stýriskipanarlógin ásetir, at landsstýrið leggur trý sløg av játtanarlóggávu fyri løgtingið:

- *fíggjarlóg*
- møguliga *bráðfeingis játtanarlóg*, sum § 43, stk. 3, í stýrisskipanarlógini ásetir, at landsstýrið skal leggja fyri tingið, um útlit ikki eru fyri, at fíggjarlógin verður samtykt, áðrenn fíggjarárið byrjar
- *eykafíggjarlóg*, ið fevnir um allar eykajáttanir, sum fíggjarnevndin hevur veitt í gjøgnum árið, skal góðkennast í seinasta lagi 31. desember sama ár. Landsstýrið hevur skyldu at leggja fram uppskot hesum viðvíkjandi innan 1. desember.

Fíggjarlógin kann seinni verða broytt við 1) *eykajáttan við løgtingslóg*, ella um málið hevur skund, við at 2) *fíggjarnevndin veitir eykajáttan*.

Eykajáttanir, sum fíggjarnevndin samtykkir, skulu takast við á eykafíggjarlógina.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum samskipar fíggjarlógararbeiðið. Tað er tí hann, sum vegna landsstýrið leggur fyri løgtingið landsstýrisins uppskot um fíggjarlóg og aðrar játtanarlógir.

2. Bruttojáttanir og nettojáttanir

Útgangsstøðið í játtanarskipanini er, at útreiðslur og inntøkur verða játtaðar hvør sær (bruttomeginreglan). Inntøkuvøkstur heimilar tí ikki samsvarandi útreiðsluvøkstri.

Í nevndu førum verður bruttomeginreglan tó ikki nýtt:

- *Sølukostnaður, tá ið fastar ognir verða seldar*, verður drigin frá søluinntøkuni, soleiðis at tað er nettoinntøkan av søluni, sum verður játtað.
- *Tá ið brúktir lutir verða seldir í umbýti við nýggjar*, er tað bert nettoútreiðslan, sum skal játtast.
- *Tá ið endurgjald, dagbøtur o.a. í sambandi við løguarbeiði* eru fyri eykaútreiðslur, sum stovnurin hevur í sambandi við eitt ítøkiligt arbeiði, verður nettoútreiðslan sett á játtanina.

- Tá ið *peningur verður lagdur út* fyri annan stovn ella kommunur, t.v.s., at tað er greitt, í tí løtu goldið verður, at sama upphædd er útreiðsla hjá øðrum lands- ella kommunalum myndugleika, og at tað ikki áliggur útgjaldandi stovni nøkur sjálvstøðug ábyrgd at taka á seg útreiðsluna. Um landsstovnur leggur pening út fyri annan landsstovn, er tað harumframt eitt krav, at útgjalding og útreiðsla eru í sama fíggjarári.
- *tryggingarendurgjøld*, ið vanliga koma fyri.
- *lønarendurgjøld.*

Roknskaparliga verður eisini konterað eftir bruttomeginregluni, tó so, at í sambandi við tey omanfyri nevndu undantøk, verður konterað á serligum roknskaparkontum sambært Kontuskipan Landsins.

Bruttomeginreglan fevnir ikki um játtanarsløgini landsfyritøka og rakstrarjáttan. Fyri hesi játtanarsløg verður játtanin latin sum nettoútreiðslujáttan.

Sjálvt um játtanir sostatt á summum økjum verða givnar sum nettojáttanir, verða útreiðslur og inntøkur settar upp fyri seg í sundurgreinaðu ætlanunum í fíggjarlógarviðmerkingunum.

3. Átekningar

Á játtanarlógunum kunnu vera, umframt játtanir, eisini átekningar. Átekningar verða nýttar sum ein ískoytisáseting til ávísa játtan.

4. Vanligar ræðisásetingar

4.1 Almennar reglur

Ein játtan er ein heimild hjá landsstýrismanninum at hava útreiðslur til eitt ávíst endamál, ella at hava inntøkur av ávísum slag, í samsvari við tær fyritreytir, sum játtanin er givin eftir.

Tá ið ein fyrisitingarlig leiðsla hevur ræðisrættindi í sambandi við játtanir, er hetta eftir *heimiling* frá landsstýrismanninum, og er tað undir teimum treytum, ið fylgja við heimilingini.

Játtanin skal nýtast samsvarandi fyritreytunum fyri játtanini. Harumframt kunnu í heimilingini vera ásettar aðrar fyrisitingarligar treytir, eins og ræðisrætturin altíð kann takast aftur í fíggjarárinum.

Játtanarheimild skal vera fingin til vega, áðrenn rátt verður. Tá miðað verður ímóti, at fíggjarlógin skal vera ein fullfíggjað fíggjarætlan fyri landsins inntøkur og útreiðslur í fíggjarárinum, er meginreglan, at heimild skal verða fingin til vega á fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, áðrenn rátt verður.

4.2 Játtanartíðarskeið

Ein játtan er ein *heimild at ráða í tí fíggjarári, sum játtanin er givin fyri.*

Um tað ikki er serlig heimild til at gjalda frammanundan, ella at geva gjaldsskáa, skal miðast ímóti, at tað ikki er størri munur á tíðarskeiðnum millum útreiðslur og útgjald, og millum inntøkur og inngjald.

Atgerðir, sum føra við sær skyldur fyri landskassan út um tíðarskeiðið, ið játtanin er fyri, burtursæð frá vanligum skyldum, ið eru knýttar at framhaldandi rakstri av einum stovni, t.d. løn til starvsfólk og leigusáttmálar, kunnu bara gerast, um serstøk heimild er fingin til vega frammanundan t.d. við serligari lóg.

Eru skyldur, sum bera við sær útreiðslur í fleiri fíggjarárum, skal játtan til útreiðslurnar fáast til vega hvørt fíggjarár sær.

4.3 Endurrindan av keyps-MVG hjá stovnum / virksemi, sum ikki eru MVG-skrásettir / skrásett

Stovnar (virksemi), sum ikki eru MVG-skrásettir, skulu, tá ið fíggjarlógaruppskotið verður gjørt meta um rakstrar- og løguútreiðslur *uttan* at taka útreiðslur við til keyps-MVG.

Á roknskapinum verður keyps-MVG skrásett fyri seg á standardkontu 75. Sjálvur útreiðsluparturin verður skrásettur á standardkontur 14, 15, 16, 19, 31 og 32 t.v.s. uttan MVG, men MVG-parturin verður skrásettur undir standardkontu 75.

Snýr tað seg um MVG av vørum og tænastum, sum er goldið uttanlands, so skal MVG-upphæddin skrásetast saman við útreiðsluni til vøruna / tænastuna.

Keyps-MVG verður mánaðarliga lyft av roknskapinum og flutt á eina felags játtan undir § 20.

4.4 Annað

Vanliga er ikki loyvt at langtíðarleiga. Tó kunnu sáttamálar um operationella langtíðarleigu gerast, um tað eru eyðsýndir fyrimunir fyri landskassan at langtíðarleiga í staðin fyri at keypa. Sáttmálar upp á meira enn kr. 250.000 skulu góðkennast av Fíggjarmálaráðnum.

Hinvegin kunnu sáttmálar ikki gerast fyri fíggjarliga langtíðarleigu, sum reelt kemur í staðin fyri keyp ella bygging. Talan er um fíggjarliga langtíðarleigu tá ein av niðanfyrinevndu treytum er lokin:

- Sambært avtaluni verður ognarrætturin latin langtíðarleigaranum, tá leigutíðin er av.
- Leigarin hevur optión til at keypa aktivið fyri ein prís, ið væntandi verður so nógv lægri enn handilsvirðið tá optión verður nýtt, at tað má metast rímuliga vist, at optiónin fer at verða nýtt.
- Langtíðarleigan er galdandi størsta partin av tíðini, sum aktivið verður nýtt, og í so máta er líkað mikið, um ognarrætturin verður fluttur ella ikki í endanum av tíðarskeiðnum.
- Nútíðarvirðið av langtíðarleigugjøldunum er størri enn ella í øllum førum tað sama sum handilsvirðið av langtíðarleigaða aktivinum. Í hesum sambandi hevur tað einki at siga, um ognarrætturin møguliga verður fluttur við endan av tíðarskeiðnum.

5. Serstakar ásetingar fyri einstøku játtanarsløgini

5.1 Játtanarsløgini

Ræðisreglurnar eru tengdar at fylgjandi fimm játtanarsløgum, sum á ymiskan hátt eru bindandi fyri, hvørjar heimildir, skyldur og hvørja ábyrgd ein landsstýrismaður hevur viðvíkjandi umsiting av játtanum:

- Rakstrarjáttan
- Løgujáttan
- Lógarbundin játtan
- Landsfyritøka
- Onnur játtan

Undir ”B. Játtanir” í fíggjarlógartekstinum er ásett í klombrum aftan fyri høvuðskontuheitið, hvat slag av játtan, talan er um. Um einki stendur, so er tað “Onnur játtan”.

Fyri øll játtanarsløgini eru tær vanligu ræðisásetingarnar galdandi, umframt niðanfyri nevndu serstøku ásetingar fyri tey einstøku játtanarsløgini.

5.2 Rakstrarjáttan (vanligt virksemi)

Rakstrarjáttan verður nýtt, tá endamálið við játtanini serliga er ætlað at verða rokkið við almennum rakstarvirksemi, og at hava neyðugar útreiðslur í tí sambandi, t.v.s. útreiðslur til starvsfólk, keyp av vørum og tænastum og til rakstur av bygningum v.m.

Hóast virksemið verður minni, og størri skynsemisbroytingar enn ætlað verða framdar, er ikki loyvt til betra um støðið á almennu tænastuni á økinum meira enn upprunaliga ætlað.

Stovnar, ið skulu gera ætlanir um byggi- og løguarbeiði, kunnu nýta pening til fyrireikandi kanningar, herundir tørvsmetingar. Útreiðslur til framhaldandi fyrireikingararbeiði og projekteringsútreiðslur krevja serstaka løgujáttan.

Í *Sundurgreinað ætlan* í viðmerkingunum er játtanin á høvuðskontuni sundurliðað í undirkontur og standardkontur. Henda sundurgreining er ikki bindandi. Tó er ikki loyvt landsstýrismanninum at fara uppum ásetta lønarkarmin (standardkonta 11). Um góðar grundgevingar eru fyri tí, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tó loyva frávik frá hesi áseting.

Rakstrarjáttan, er ein *nettoútreiðslujáttan til tann ella teir* landsstovnar, sum høvuðskontan fevnir um. Stovnurin kann hava rakstrarútreiðslur og -inntøkur samsvarandi viðmerkingunum til høvuðskontuna. Meirinntøkur geva rætt til at hava samsvarandi meirútreiðslur, tó er ikki loyvt at fara uppum ásetta lønarkarmin.

5.2.1 Góðkenning av ávísum størvum

Fíggjarmálaráðið skal góðkenna øll tænustumannastørv og øll onnur størv við eini løn svarandi til tænastumannastørv í 36. lønarflokki ella hægri, áðrenn tey verða skipað.

Umsóknir um at skipa omanfyrinevndu størv skulu sendast til lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum saman við upplýsingum, sum eru neyðugar til viðgerðina.

Eitt góðkent starv í lønarflokki 36. ella hægri kann altíð nýtast í einum lægri lønarflokki.

Innan fyri lønarrammuna og góðkend størv, ásetir aðalráðið/stovnurin sjálvur samansetingina av starvsfólkanýtslu.

5.3 Rakstrarjáttan (inntøkufíggjað virksemi)

Landsstovnar kunnu fáa játtan til at hava inntøkufíggjað virksemi, um hetta virksemið lýkur niðanfyri standandi treytir:

- Viðskiftafólkini hava *ikki* nakra *skyldu at taka móti* tænastuni ella vøruni.
- Stovnurin skal kunna *skilja* framleiðsluna, sum ætlanin er at hava sum inntøkufíggjað virksemi, frá øðrum uppgávum hjá stovninum.
- Tað inntøkufíggjaða virksemið skal *náttúrliga hanga saman* við vanligu uppgávunum, sum stovnurin hevur fingið álagt at loysa.

Kostnaðurin, skal ásetast soleiðis, at hann *ikki er kappingaravlagandi* mótvegis privatum og øðrum almennum kappingarneytum, og langtíðar miðalkostnaðurin skal verða fíggjaður.

Um talan er um einkarrætt ella støðu, ið líkist einkarrætti, so er prísurin, sum samsvarar langtíðarkostnaðinum, samstundis *hámarksprísurin,* ið kann setast á vøruna ella tænastuna, tá ið hon verður seld í Føroyum.

Langtíðar miðalkostnaðurin er tað, sum tað í miðal kostar at gera eina ávísa vøru ella veita eina ávísa tænastu gjøgnum eitt longri tíðarskeið. Sum partur av kostnaðinum er at rokna:

- beinleiðis útreiðslur, tvs. útreiðslur, sum beinleiðis eru knýttar at tí einstøku vøruni ella tænastuni (t.d. løn, tilfar ella uttanhýsis tænastur), og
- óbeinleiðis útreiðslur, tvs. útreiðslur, sum ikki beinleiðis kunnu knýtast at tí einstøku vøruni ella tænastuni, men sum kunnu roknast út frá útreiðslum fyri viðkomandi ár (t.d. høli, innbúgv, edv, skrivstovulutir og leiðsla), umframt
- aðrar óbeinleiðis útreiðslur, sum kunnu vera rakstrarútreiðslur frá farnum árum, ella útreiðslur, ið stava aðra staðni frá á landsins rakstrarætlan (t.d. mettar avskrivingar og roknað rentað).

Undir inntøkufíggjaðum virksemi kunnu havast inntøkur og útreiðslur, ið vanliga koma undir løgujáttan.

Í viðmerkingum til fíggjarlógaruppskotið verður greitt frá *slagi av inntøkufíggjaðum virksemi,* og hvussu stórt hetta virksemi er. *Skilt verður ímillum vanligt virksemi og inntøkufíggjað virksemi hjá stovninum.*

Inntøkufíggjað virksemi verður sett á serstaka undirkontu. Sundurgreiningin í standardkontur er ikki bindandi, og loyvt er landsstýrismanninum at fara upp um ásetta lønarkarmin (standardkonta 11) á hesi undirkontu, men lønarútreiðslur kunnu einans nýtast til tað inntøkufíggjaða virksemið.

Í fíggjarlógaruppskotinum verður gjørd rakstrarætlan fyri útreiðslur av inntøkufíggjaðum virksemi, lutvíst grundað á ætlaðar útreiðslur, og lutvíst á ætlaða nýtslu av inntøkum annars.

Útreiðslur til vørur og tænastur skulu liðast sundur eftir veruligu nýtsluni til ávikavist vanligt og inntøkufíggjað virksemi.

5.3.1 Starvsfólk

Til inntøkufíggjað virksemi kunnu *starvsfólk* bert setast, um størvini verða fíggjað við inntøkum, hetta virksemi gevur. Er tað neyðugt, fyri at tryggja stovnin fíggjarliga, skulu setanirnar vera tíðar- ella uppgávuavmarkaðar.

Tænastumenn ella tænastumannalíknandi starvsfólk kunnu ikki setast við beinleiðis tilknýti til inntøkufíggjað virksemi.

Tey fólk, her upp í sáttmálasettir leiðarar, sum verða sett í starv beinleiðis til inntøkufíggjað virksemi, verða sett eftir vanligu sáttmálatreytunum, sum eru galdandi á økinum.

Lønarútreiðslur til starvsfólk, sum lutvíst taka lut í inntøkufíggjaðum virksemi, verða konteraðar alt eftir, hvussu stóran part starvsfólkini hava arbeitt í ávikavist vanligum virksemi og inntøkufíggjaðum virksemi.

5.4 Løgujáttan

Løgujáttan verður sum meginregla nýtt til at selja, keypa, konstruera og gera bygningar, skip og aðrar løgur. Harumframt verður henda játtan nýtt, tá løgustuðul ella lán verða veitt til ítøkiligar byggiætlanir, sum ikki eru lógarbundnar.

Undir hesar játtanir verða bókaðar:
- Løguútreiðslur og løguinntøkur
- Løgustuðul og útlán til einstakar ætlanir
- Avdráttir av veðrættarskuld

Hetta hevur eitt nú við sær, at keyp av føstum ognum og nýbygging kann fíggjast av somu játtan.

5.4.1 Løgujáttan, útreiðslur

5.4.1.1 Játtanir, lýstar í viðmerkingunum til fíggjarlógina

Landsstýrismaðurin er ikki bundin av sundurgreiningini millum fleiri løguarbeiði undir somu høvuðskontu, treytað av, at metti samlaði kostnaðurin fyri tær einstøku ætlanirnar heldur, og at samlaðu útreiðslurnar kunnu haldast innan fyri galdandi fíggjarlóg.

Tiltøk, sum føra til týðandi ætlanarbroytingar, herundir tiltøk, sum hækka upprunaliga metta samlaða kostnaðin fyri einstakar ætlanirnar, kunnu fremjast, um serstøk heimild er fingin til vega við eykajáttanarlóg.

5.4.1.2 Nýggjar ætlanir í fíggjarárinum

Ætlanir, sum skulu fíggjast við eini løgujáttan, og sum ikki eru lýstar í viðmerkingunum til løgujáttanina, kunnu bara fremjast, um heimild er fingin til vega við eykajáttanarlóg.

5.4.1.3 Játtanir, lýstar í serstakari lóg

Er talan um størri løgujáttanir, sum ofta fevna um fleiri fíggjarár, er meginreglan, at landsstýrismaðurin leggur uppskot fyri tingið um serstaka lógarheimild til tess at tryggja, at tílík týðandi mál verða nóg væl lýst og fáa eina hóskandi viðgerð í tinginum.

Um tað í serstøku lógini er ásettur ein samlaður løgukostnaður, kann landsstýrismaðurin gera avtalur, sum hava við sær byggiútreiðslur í komandi fíggjarárum, um so er, at hetta er neyðugt fyri at gera skilagóðar sáttmálar við atliti at valda útbjóðingarháttinum, og treytað av, at tann samlaði løgukostnaðurin verður hildin.

5.4.2 Løgujáttan, inntøkur

Løguinntøkur eru inntøkur av at avhenda fastar ognir, skip o.t., endurrindan í sambandi við bygging og løgugerð fyri onnur, endurgjald fyri liðug løguarbeiði og avskrivingar av ognum og løgum.

Landsins føstu ognir, skip o.t. kunnu bert seljast, um tey verða boðin út alment.

Løguinntøkur kunnu bert havast, um so er, at heimild er fyri hesum á fíggjarlógini, annars verða hesar at taka við á eykajáttanarlóg.

5.5 Lógarbundin játtan

Lógarbundin játtan verður nýtt, tá tað er bindandi ásett í aðrari lóggávu, hvør kann fáa pening, ella hvør skal rinda, og hvussu stór upphæddin skal verða. Sum dømi kann fólkapensiónin verða nevnd.

Talan er um lógarbundnar útreiðslur, tá ið móttakarin sambært lóg hevur rættarkrav til ávísan stuðul ella veiting, og tá ið peningaupphæddin ella útrokningargrundarlagið er ásett í lóg ella sambært lóg.

Tað er tí serliga umráðandi, at landsstýrismaðurin metir lógarbundnu útreiðslurnar á fíggjarlógini so neyvt sum gjørligt. Um tað í fíggjarárinum vísir seg, at hesar metingar væntandi ikki koma at halda, skal landsstýrismaðurin leggja uppskot um eykajáttanarlóg fyri tingið, ella í øðrum lagi uppskot um at broyta stuðulslóggávuna.

5.6 Landsfyritøka

Játtanarslagið Landsfyritøka verður nýtt, tá virksemið hjá almennum stovni í høvuðsheitum er vinnuligt, og tað tí er skilabest at geva leiðsluni størri møguleikar til at laga virksemið eftir marknaðarviðurskiftunum.

Játtanin er eitt nettotal, sum er ein játtanarkarmur til nettoútreiðslur hjá fyritøkuni. Í høvuðsheitum eru tær somu ásetingar galdandi, sum fyri játttanarslagið *rakstrarjáttan*, herundir góðkenning av ávísum størvum.

Fyri játtanarslagið *landsfyritøkur* er sundurgreiningin á undirkontur og standardkontur ikki bindandi, og loyvt er landsstýrismanninum at fara uppum ásetta lønarkarmin (standardkonta 11).

5.7 Onnur játtan

Onnur játtan verður nýtt í serligum føri, tá játtanarendamálið er ætlað at verða rokkið við at veita stuðul, serstakliga til ítøkiligar studningsjáttanir, veita lán v.m., ella tá talan er um inntøkur, sum ikki eru náttúrliga knýttar at rakstrar- og løguvirkseminum. Vanliga verður hetta játtanarslagið nýtt, tá hini játtanarsløgini ikki hóska.

Lønarútreiðslur kunnu ikki játtast undir hesum játtanarslagi. Sundurgreiningin í viðmerkingunum av, hvat játtanin kann nýtast til, er bindandi fyri landsstýrismannin, um ikki annað er tilskilað í viðmerkingunum.

Fíggjarlógaruppseting

1. Inngangur

Dagførda fíggjarlógin er í tveimum pørtum. Sjálv lógin, ið verður nevnd *tekstur*, er skipað í greinar. Lógin hevur harafturat *viðmerkingar til tær einstøku greinarnar*.

Øll málsøki, ið ein landsstýrismaður hevur ábyrgd av, verða savnað í eina grein. Eisini eru greinar um Løgtingið, inntøkur, gjaldføri og serinntøkur.

Í tekstpartinum eru upplýsingar um játtanarupphæddir, umframt møguligar átekningar (lógarásetingar um ræði yvir játtanum).

Í viðmerkingunum er greitt nærri frá endamáli, grundarlagi, og fyritreytum fyri teimum einstøku játtanunum. Eisini er sundurgreinað ætlan, starvsfólkayvirlit og virksemisyvirlit.

2. Tekstparturin á fíggjarlógaruppskotinum

Inngangurin til tekstpartin er eitt høvuðsyvirlit yvir landsins fíggjarætlan. Yvirlitið vísir samlaðar útreiðslur og inntøkur.

Fyri hvørja grein og málsøki eru í høvuðsyvirlitinum vístar rakstrarútreiðslur, inntøkur og/ella nettoútreiðslur. Rakstrarútreiðslurnar eru landsins rakstarætlan fyri rakstrarútreiðslur, og inntøkurnar er landsins rakstrarætlan fyri inntøkur. Munurin millum samlaðar útreiðslur og samlaðar inntøkur vísir yvir- ella undirskot á landsins rakstrarætlan (rakstrarsaldan).

Landsins løguútreiðslur og -inntøkur verða settar á serstaka løguætlan í høvuðsyvirlitinum.

Úrslit fyri landsins rakstrar-, løgu- og útlánsætlan (RLÚ-úrslit), er ein samanlegging av rakstrar- og løguúrslitinum.

Niðanfyri er stutt greitt frá, hvussu skilt verður ímillum rakstrarútreiðsluætlan, skattur o.t. (ætlan), og løguætlan.

Rakstrarútreiðsluætlan fevnir um rakstrarútreiðslur, tilskot, útlán (tó ikki útlán til alment løguvirksemi) o.a. Harumframt eru vanligar rakstrarinntøkur so sum inntøkur av tænastusølu, nýtslugjøldum og aðrar inntøkur, ið eru beinleiðis knýttar at rakstrinum. Rakstrarútreiðsluætlanin er grundarlag undir tí útreiðslupolitisku stýringini, og nettoútreiðslur á rakstrarútreiðsluætlanini svara til rakstrarkarmin fyri greinina.

Skattur o.t.(ætlan) fevnir um skatt, avgjøld, tvungin gjøld og ávísir (vanliga stórir) inntøkupostar, ið eru av tílíkum slag, at hesir verða skildir frá útreiðslustýringini.
Í høvuðsheitum verða inntøkur, sum sambært altjóða allýsingum verða roknaðar við í skattatrýstið, tiknar við í inntøkurakstrarætlanina.

Løguætlanin fevnir um landsins útreiðslur til bygging og keyp av føstum ognum o.t., umframt íløgustuðul og útlán til alment løguvirksemi. Eisini fevnir løguætlanin um inntøkur, sum stava frá sølu og avskrivingum av landsins ognum.

Aftan á høvuðsyvirlitið kemur *teksturin* til tær einstøku greinarnar. Teksturin er í trimum brotum:

A. Yvirlit, er yvirlit yvir játtanaruppskot fyri málsøkir og virksemi umframt búskaparliga flokking eftir slag.

B. Játtanir, vísa til játtanirnar, sum Løgtingið hevur samtykt.

C. Átekningar, innihalda serstakar ásetingar um ræði ella heimildir til ávísa játtan.

Niðanfyri er eitt dømi um brot "A. Yvirlit".

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

tús.kr.	Netto	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðsluætlan……..…...	39.780	39.780	-
Løguætlan…….....	2.000	2.000	-
Løgtingið……		**41.780**	-
1.10.1. Løgtingið		32.950	-
1.10.2. Stovnar knýttir at Løgtinginum		8.830	-

Yvirlit yvir høvuðssløg:

Játtan tilsamans		41.780	-
Nettostýrt virksemi		20	20
Virksemi tilsamans		41.800	20
Rakstrarútreiðslur		36.351	-
Rakstrarinntøkur		-	20
Løguútreiðslur		2.000	-
Flytingarútreiðslur		3.449	-

Fyrst í brotinum er eitt játtanaryvirlit. Hetta vísir samlaðu játtanirnar til ymisk endamál.

Fyri hvørt virksemisøki t.d. "1.10.1. Løgtingið" verða vístar samlaðu játtanirnar til hetta økið.

Ovast í játtanaryvirlitinum eru nettotøl fyri rakstrarútreiðslu-, inntøku- og løguætlan. Hesi tøl eru eisini við á landsins rakstrarætlan.

At enda er í brotinum eitt yvirlit yvir *útreiðslusløg*. Hetta yvirlit vísir allar útreiðslur og inntøkur, bókaðar eftir búskaparligari samanseting, tvs. rakstrar- og løguútreiðslur, inntøkur, ymisk sløg av flyting (tilskot, stuðul v.m.) og fíggjarligir postar (t.d. útlán).

Reglan "Nettostýrt virksemi" er ein tekniskur millumrokningarpostur millum játtanartal og bruttovirksemi ("Virksemi tilsamans"). Hetta kemst av, at tað í summum førum verða veittar nettojáttanir, meðan "Virksemi tilsamans" inniheldur bruttotøl.

Næsta brot er “B. Játtanir”.

B. Játtanir

Løgtingið

	Útr.	Innt.
	-tús. kr.-	
1.10.1. Løgtingið		
02. Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn (Lógb.j)……..	3.224	-
03. Løgtingsarbeiði (Rakstrarj.)……	27.726	-
10. Nýggjur bygningur til Føroya Løgting (Løguj). …..	2.000	-
1.10.2. Stovnar knýttir at løgtinginum		
01. Landsgrannskoðanin (Rakstrarj.)……..	5.630	-
07. Løgtingsins umboðsmaður (Rasktrarj)……..	3.200	-

Hvør einstøk upphædd er ein *játtan.* Hvørt útreiðsluøki (t.d. “1.10.1. Løgtingið”) er skift sundur í *høvuðskontur,* t.d. “1.10.1.03. Løgtingsarbeiði *(Rakstrarjáttan)*”.

Hvør regla er um eina ávísa høvuðskonto og inniheldur 4 sløg av upplýsingum.

Dømi:

1.10.1. Løgtingið

03.	Løgtingsarbeiði	*(Rakstrarjáttan)*	27.726 -
7-sifrað høvuðskontu-nummar	Høvuðskontuheiti	Játtanarslag	Játtan (upphædd)

Høvuðskontunummar, verður nýtt í viðmerking, har raðfylgjan fylgir høvuðskontunummari.

Høvuðskontuheiti, vísir *játtanarendamál.*

Játtanarslag, vísir til tær ræðisreglur, sum eru galdandi fyri høvuðskontuna.

Játtanaruppskot, vísir ta upphædd (í túsund kr.), sum er samtykt av Løgtinginum. Fyri hvørja høvuðskontu kunnu vera játtanir fyri bæði útreiðslur og inntøkur. Játtanarsløgini “Rakstrarjáttan” og “Landsfyritøka” hava tó bara eitt játtanaruppskot. Hetta kemst av, at hesi játtanarsløg er nettostýrd.

3. Viðmerkingar til fíggjarlógaruppskotið

Viðmerkingar, lýsa nágreinliga endamálið, og hvørjar fortreytir liggja aftan fyri hvørja játtan. Viðmerkingarnar eru savnaðar undir hvørja grein sær.

Í viðmerkingunum til hvørja grein er í innganginum eitt yvirlit. Yvirlitið vísir bæði *rakstrarætlan, løguætlan* og *útreiðslusløg*.

Í viðmerkingunum til tær einstøku høvuðskonturnar eru:
- Inngangur
- Sundurgreinað ætlan

og í summum førum
- Starvsfólkayvirlit og
- Virksemisyvirlit

a) Í i*nnganginum verður* greitt frá endamáli og grundarlagi v.m.

b) S*undurgreinaða ætlanin* er greinað í undirkontur og standardkontur. Í bruttojáttanum (tvs. løgujáttan, lógarbundin játtan og onnur játtan) verða útreiðslur og inntøkur játtaðar hvør sær. Ovast í talvuni stendur tí
- Útreiðslujáttan
- Inntøkujáttan

Greiningin vísir, hvussu ætlanin er at nýta játtanina, bæði til undirendamál og útreiðslusløg.

Fyri nettostýrd øki (tvs. rakstrarjáttan og landsfyritøkur) verður bara sett ein nettoútreiðslujáttan.

Fyri at tað samlaða virksemið skal síggjast á tí sundurgreinaðu ætlanini, eru tølini fyri samlaðar útreiðslur og inntøkur, aftan á nettoútreiðslujáttan, við í báðum reglum.

Um játtanin verður nýtt til at rinda starvsfólki hjá landinum løn, er eisini eitt *starvsfólkayvirlit*. Í starvsfólkayvirlitinum er víst lønarupphædd og tal á fulltíðarstørvum, býtt sundur millum tey, sum ávikavist eru sett eftir lønarkarmi 36 ella hægri og onnur. Eitt fulltíðarstarv svarar til vanliga árliga arbeiðstíð. Yvirtíð og størv, ið ikki eru fulltíðarstørv, verða umroknað til vanliga árliga arbeiðstíð.

Kontuskipan á Fíggjarlóg

Fíggjarlógin er býtt í greinar. Løgtingið, løgmaður og landsstýrimenn hava sínar serstaku greinar. Afturat hesum eru fýra felagsgreinar fyri inntøkur, gjaldføri landskassans og serinntøkur.

Á hvørjari grein eru játtanirnar, ið verða nevndar høvuðskontur, ásettar við einum 7 siffraðum tali. Í viðmerkinginum er hvør høvuðskonta býtt sundur í eina sundurgreinaða ætlan við 4 siffrum.

Sostatt verður ein 11 siffrað kontuskipan nýtt í fíggjarlógini, og skal bygnaðurin í kontuskipanini lýsast nærri niðanfyri.

Siffur:	Heiti:
1.-2.	Grein (Løgtings-, løgmans-, landsstýrismanna- ella felagsøki)
3.-4.	Málsøki
5.	Virksemisøki
6.-7.	Høvuðskontur
8.-9.	Undirkontur
10.-11.	Standardkontur

Grein (Løgtings, løgmans, landsstýrismanna ella felagsøki). Greinabýtið virkar í høvuðsheitum soleiðis, at allar útreiðslur og inntøkur í einum Løgtings-, løgmans-, landsstýrismannaøki, eru undir eini grein. Undantøk eru i inntøku- og gjaldførisgreinunum.

Málsøki er tað, sum ein grein verður býtt sundur í. Býtið hevur sum endamál at savna játtanir til somu endamál innan fyri landsstýrismannaøkini og at vísa týdningarmikil endamál og útreiðsluskipanir.

Siffrini undir málsøkinum eru eisini skipaði eftir altjóða stigi. Tað ber sostatt til at samanbera tað føroysku fíggjarlógini við fíggjarlógir í øðrum londum.

Høvuðskontur eru sjálv játtanin, sum Løgtingið atkvøður um. Tá ið broytingar verða gjørdar t.e. at upprætta, broyta ella niðurleggja høvuðskontur, verður støða tikin til hetta við fyrilti fyri endamálinum við broytingini, hvussu hóskandi hetta er fyrisitingarligt, og um broytingin hevur munandi sjálvstøðugan játtanarligan áhuga. Av tí at hesi viðurskifti koma undir § 3, 2. stk. í kunngerð um roknskaparverk landsins o.a., har tað stendur, at uppskot m.a. um lógir skulu leggjast Fíggjarmálaráðnum og Føroya Gjaldstovu til góðkenningar, skal Fíggjarmálaráðiðstýrið hava umbønir um broytingar til viðgerðar, áðrenn broytingin verður løgd fyri Løgtingið.

Undirkontur: Hesin táttur kann verða nýttur, um so er, at tað í viðmerkingunum til fíggjarlógina er neyðugt at býta eina játta sundur í fleiri verkevni sum t.d. at skilja innihaldið í játtanini út til tess at kunna gera funktionel hagtalslig býti ella at skilja partar av virkseminum út í inntøkufíggjað virksemi. Undirkontur eigur ikki at verða nýtt til innanvirkis stýringarendamál! Siffur á undikontu er lutvíst ásett. Undirkontur fyri rakstrarjáttanir skulu liggja millum tølini 20 og 39. Inntøkufíggjað virksemi hjá stovnum skal hava undirkontur frá

40-50. Onnur siffur kunnu nýtast frítt. Broytingar í undirkontum krevja somu formligu mannagongd, sum tá ið høvuðskontur verða broyttar.

Tað er Fíggjarmálaráðið, sum ásetir kontuætlanina í fíggjarlógini.

Standardkontur eru tvørgangandi og eru lagaðar eftir teimum hugtøkum, sum m.a verða nýtt í tjóðarbúskapinum.
Fyrsta siffur vísir høvuðsslag:

1.	Rakstrarútreiðslur (11 til 19)
2.	Rakstrarinntøkur (21 til 29)
3.	Løguútreiðslur (31 til 32)
4.	Løguinntøkur (41 til 47)
5.	Flytingarútreiðslur (51 til 58)
6.	Skattur og flytingarinntøkur (61 til 68)
7.	Flytingar millum almennar myndugleikar (71 til 77)
8.	Fíggingarpostar (81 til 89)
9.	Broytingar í “Ogn” og “Skuld v.m”. (91 til 99)

Fíggjarætlanirnar í Løgtings-, løgmans-, landsstýrismanna- ella felagsøkinum verða taldar saman við at nýta omanfyristandandi høvuðssløg.

Annað siffur á standardkontuni er ein neyvari sundurgreining. T.d. verður høvuðsøki 1. Rakstrarútreiðslur greinað í hesar standardkontur:

11.	Lønir v.m.
14.	Keyp av vørum og tænastum
15.	Keyp av útbúnaði, netto
16.	Leiga, viðlíkahald og skattur
17.	Avskrivingar o.a.
19.	Ymsar rakstrarútreiðslur

Føroya Gjaldstova hevur um hendi Kontuskipan landsins.

Yvirlit yvir høvuðskontur

Høvuðskonta	Heiti	Síða
20.52.3.10	Aðrar inntøkur (Onnur játtan)	421
20.50.2.04	Aðrar rentur (Onnur játtan)	405
25.62.1.01	Afturgjald av landskassaskuld (Onnur játtan)	430
6.38.4.01	Akstovan (Rakstrarjáttan)	177
8.11.1.08	Almanna- og heilsumálaráðið (Rakstrarjáttan)	284
7.23.6.08	Almanna- og heilsuskúli Føroya (Løgujáttan)	239
7.23.6.11	Almanna- og heilsuskúli Føroya (Rakstrarjáttan)	240
8.21.1.04	Almannastovan (Rakstrarjáttan)	320
6.33.2.11	Almenn jørð, søla (Løgujáttan)	131
6.33.2.01	Almennar royndir og ráðgeving (Rakstrarjáttan)	127
2.13.2.04	Altjóða samstarv (Onnur játtan)	46
8.21.1.08	Alv-skúlin (Rakstrarjáttan)	324
8.21.6.10	Ansingarsamsýning (Lógarbundin játtan)	357
8.20.2.08	Apoteksverkið (Landsfyritøka)	298
8.20.2.09	Apoteksverkið (Løgujáttan)	299
6.39.1.07	Arbeiðseftirlitið (Rakstrarjáttan)	183
20.52.1.25	Arvagjøld (Onnur játtan)	413
20.52.1.13	Avgjald av kapitaleftirlønum (Onnur játtan)	412
8.21.6.15	Avhendan av eldrasambýlunum í Kollafirði og Vestmanna (Løgujáttan)	360
25.60.1.04	Avtøka av grunnum (Onnur játtan)	428
7.23.1.22	Barnabløð (Onnur játtan)	203
7.23.1.25	Barnabókaútgáva (Onnur játtan)	203
8.21.3.04	Barnapeningur veittur í forskoti (Lógarbundin játtan)	330
8.21.3.01	Barnavernd (Lógarbundin játtan)	328
6.39.4.01	Barsilsskipan (Lógarbundin játtan)	185
7.23.6.17	Biofar (Rakstrarjáttan)	248
7.23.1.19	Bókamiðsølan (Onnur játtan)	203
7.24.3.02	Bókasøvn (Løgujáttan)	267
7.24.3.01	Bókasøvn (Rakstrarjáttan)	264
20.52.2.13	Brennioljugjald (Onnur játtan)	417
25.60.1.01	Broytingar í "virði" og "skuld v.m." (Onnur játtan)	427
6.37.2.22	Brúkarasamtakið (Onnur játtan)	146
8.21.6.26	Bussur til eldrarøkt á Sandoynni (Rakstarjáttan)	364
6.33.2.03	Búnaðarstovan (Rakstrarjáttan)	128
3.15.1.13	Búskaparráðið (Rakstrarjáttan)	66
8.21.6.02	Bústovnar o.a. (Løgujáttan)	350
7.24.3.16	Bygdasøvn (Onnur játtan)	271
3.11.1.35	Bygningur til almennar stovnar í Klaksvík (Løgujáttan)	55
8.21.3.08	Børn og ung (Rakstrarjáttan)	331
8.21.4.01	Dagpeningaskipanin (Lógarbundin játtan)	339
3.18.2.04	Danskar eftirlønir (Lógarbundin játtan)	71
15.14.2.02	Dátueftirlitið (Rakstrarjáttan)	381
8.20.3.30	Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (Rakstrarjáttan)	315
6.33.1.04	Djóralæknatænastur (Rakstrarjáttan)	126
5.34.5.07	Effektivar veðhaldsútreiðslur (Onnur játtan)	108
20.54.1.03	Eftirgeving av ríkislánum (Onnur játtan)	426
3.18.2.07	Eftirløn landsstýrismanna (Lógarbundin játtan)	71
1.10.1.02	Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn (Lógarbundin játtan)	27
3.18.2.01	Eftirlønir (Lógarbundin játtan)	70
8.20.3.17	Eftirlønir innan heilsuverkið (Lógarbundin játtan)	313

7.23.3.21	Eftirútbúgving av yrkislærdum (Rakstrarjáttan)	229
7.23.1.34	Eftirútbúgving og skeið (Rakstrarjáttan)	205
8.21.8.10	Einkjubarnastyrkur (Lógarbundin játtan)	371
8.21.6.04	Eldrarøkt (Rakstrarjáttan)	351
8.21.6.16	Eldrasambýli (Løgujáttan)	361
6.37.1.10	El-nevndin (Rakstrarjáttan)	141
3.13.2.03	Endurgjald av skatti og avgjøldum (Onnur játtan)	57
6.37.2.04	Endurgjald til skipasmíð (Onnur játtan)	145
20.52.5.01	Endurrindan av keyps-MVG (Onnur játtan)	424
7.11.1.49	ES-samstarv (Rakstrarjáttan)	192
8.11.1.38	Familjuøki (Onnur játtan)	289
3.35.1.05	FAS-endurgjald (Onnur játtan)	76
6.38.2.20	Fast samband um Vestmannasund (Onnur játtan)	170
6.39.1.02	Fastur gerðarættur (Onnur játtan)	182
8.21.3.16	Felagið Barnabati (Onnur játtan)	338
20.52.1.07	Felagsskattur (Onnur játtan)	409
20.52.2.25	Ferðaavgjald (Onnur játtan)	419
7.23.3.18	Ferðaendurgjald til læruplass (Lógarbundin játtan)	229
6.38.5.01	Ferðaráð Føroya (Rakstrarjáttan)	179
7.24.1.22	Filmseftirlitið (Rakstrarjáttan)	259
6.36.1.07	Fiskasjúkutænastur (Rakstrarjáttan)	134
5.11.1.05	Fiskimálaráðið (Rakstrarjáttan)	79
5.34.3.01	Fiskirannsóknarstovan (Rakstrarjáttan)	95
5.34.2.05	Fiskiveiðieftirlit (Rakstrarjáttan)	95
5.34.2.01	Fiskiveiðieftirlitið (Rakstrarjáttan)	92
5.34.4.16	Fiskivinnumenning á landi (Onnur játtan)	104
5.34.1.01	Fiskivinnuráð og nevndir (Rakstrarjáttan)	88
5.34.3.07	Fiskivinnuroyndir (Rakstrarjáttan)	101
7.23.3.08	Fiskivinnuskúlin (Løgujáttan)	227
3.11.1.03	Fíggjarmálaráðið (Rakstrarjáttan)	51
20.52.1.22	Fíggjarognaravgjald (Onnur játtan)	413
6.38.3.17	Fjarskiftiseftirlitið (Rakstrarjáttan)	174
7.23.1.28	Fjølrit (Rakstrarjáttan)	204
6.38.2.10	Flogferðsla (Lógarbundin játtan)	167
6.38.2.13	Flogferðsla (Løgujáttan)	168
5.34.4.22	Flutningsstuðul (Lógarbundin játtan)	105
3.11.1.19	Flyting av fíggjar-og búskaparstovnum landsins (Løgujáttan)	53
8.21.8.01	Fólkapensjón (Lógarbundin játtan)	368
7.23.2.01	Fólkaskúlin (Rakstrarjáttan)	207
20.52.2.16	Framleiðsluavgjøld (Onnur játtan)	417
7.24.3.19	Friðað hús og fornminni (Rakstrarjáttan)	272
7.23.5.07	Frítíðarundirvísing (Rakstrarjáttan)	231
7.23.6.15	Fróðskaparsetur Føroya (Løgujáttan)	245
7.23.6.16	Fróðskaparsetur Føroya (Rakstrarjáttan)	245
8.21.8.05	Fyritíðarpensjón (Lógarbundin játtan)	368
8.21.6.20	Føroya blindastovnur (Rakstrarjáttan)	362
7.23.5.01	Føroya fólkaháskúli (Onnur játtan)	230
7.24.3.12	Føroya fornminnissavn (Løgujáttan)	271
7.24.3.10	Føroya fornminnissavn (Rakstrarjáttan)	270
3.15.1.07	Føroya gjaldstova (Rakstrarjáttan)	61
15.14.1.04	Føroya kærustovnur (Rakstrarjáttan)	379
7.23.6.14	Føroya Læraraskúli (Løgujáttan)	244
7.24.3.07	Føroya landsskjalasavn (Rakstrarjáttan)	267
7.24.3.14	Føroya Náttúrugripasavn (Løgujáttan)	271

15.24.3.13	Føroya náttúrugripasavn (Rakstrarjáttan)	385
7.24.1.04	Føroyahúsið í Keypmannahavn (Onnur játtan)	255
7.24.5.02	Føroysk sjómanskirkja (Onnur játtan)	280
7.24.5.04	Føroyskt kirkjumál (Onnur játtan)	280
7.23.3.15	Gjald fyri lærusáttmálar o.a. (Onnur játtan)	228
20.52.1.28	Gjald til barsilsskipan (Onnur játtan)	413
20.52.1.30	Gjald til Búnaðarstovuna (Onnur játtan)	414
5.34.4.14	Gjald til rækjuflotan (Lógarbundin játtan)	104
5.11.1.34	Granskingarætlanir (Rakstrarjáttan)	82
7.23.6.21	Granskingargrunnurin (Onnur játtan)	250
6.37.5.06	Granskingarlund (Løgujáttan)	153
7.23.6.20	Granskingarráð Føroya (Rakstrarjáttan)	249
3.15.2.01	Hagstova Føroya (Rakstrarjáttan)	68
6.36.1.04	Havbúnaðarroyndir (Onnur játtan)	133
7.23.6.26	Havfrøðiliga royndarstøðin - BIOFAR (Løgujáttan)	252
6.38.1.14	Havnir (Løgujáttan)	166
7.24.2.13	Heiðursgávur til mentafólk (Onnur játtan)	263
20.54.1.01	Heildarveiting o.t. (Onnur játtan)	425
8.20.1.06	Heilsuátøk (Onnur játtan)	292
6.37.5.04	Heilsufrøðiliga starvsstovan (Rakstrarjáttan)	148
8.21.3.12	Heilsufrøðiskipanin (Rakstrarjáttan)	337
8.20.1.16	Heilsukanningar av barnakonum (Lógarbundin játtan)	294
5.34.4.05	Heilsukanningar av sjófólki (Lógarbundin játtan)	103
15.14.3.01	Hin føroyski Happadrátturin (Lógarbundin játtan)	382
15.14.3.04	Hin føroyski Happadrátturin, fyrisiting (Rakstrarjáttan)	383
8.21.1.07	Hjálpartólamiðstøðin (Rakstrarjáttan)	323
7.24.6.08	Hugasamband Føroya (Onnur játtan)	282
7.23.5.04	Húsarhaldsskúlar (Onnur játtan)	230
5.34.1.05	Hvalagransking og hvalateljing v.m. (Rakstrarjáttan)	89
8.20.3.25	Hvíldarheimið Naina (Rakstrarjáttan)	315
15.11.1.39	Innlendismálaráðið (Rakstrarjáttan)	375
6.33.2.02	Innsavnan av ull og skinnum (Onnur játtan)	128
5.34.4.01	Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (Lógarbundin játtan)	102
8.20.2.11	Ílegusavnið (Rakstrarjáttan)	300
7.24.6.12	Ítróttaranlegg (Onnur játtan)	283
7.24.6.06	Ítróttarsamband Føroya (Onnur játtan)	281
15.14.3.07	Ítróttarvedding (Onnur játtan)	383
6.32.1.03	Jarðfeingi (Rakstrarjáttan)	122
6.11.1.22	Javnstøðunevndin (Rakstrarjáttan)	119
6.38.3.11	Jólamerkjagrunnurin (Onnur játtan)	173
6.33.1.07	Kanning av djórasjúkum í Føroyum (Rakstrarjáttan)	126
20.52.1.11	Kapitalvinningsskattur (Onnur játtan)	411
6.37.1.17	Kappingarráðið (Rakstrarjáttan)	142
7.24.3.23	Kirkjubømúrurin (Løgujáttan)	275
20.52.1.05	Kirkjuskattur (Onnur játtan)	408
7.23.6.03	Klaksvíkar sjómansskúli (Løgujáttan)	234
7.23.6.04	Klaksvíkar sjómansskúli (Rakstrarjáttan)	234
8.20.3.11	Klaksvíkar sjúkrahús (Løgujáttan)	310
8.20.3.10	Klaksvíkar sjúkrahús (Rakstrarjáttan)	308
6.37.2.16	Kolagrevstur (Onnur játtan)	146
6.33.2.14	Koltursætlanin (Onnur játtan)	132
20.52.1.08	Kolvetnisskattur, feløg (Onnur játtan)	410
20.52.1.06	Kolvetnisskattur, persónar (Onnur játtan)	409
8.20.2.04	Kommunulæknaskipanin (Rakstrarjáttan)	296

8.20.1.10	Koppsetingar (Lógarbundin játtan)	292
7.24.4.06	Kringvarp Føroya (Landsfyritøka)	276
7.24.4.03	Kringvarp Føroya (Løgujáttan)	276
7.38.3.10	Kringvarpssendistøðir (Løgujáttan)	284
7.38.3.07	Kringvarpssendistøðir (Rakstrarjáttan)	284
7.23.1.12	KT í skúlaverkinum (Rakstrarjáttan)	200
6.38.3.19	KT-fyrisiting (Rakstrarjáttan)	176
6.38.5.04	Kunningartænastan (Onnur játtan)	181
6.11.1.48	Kvinnuluttøka í politikki (Rakstrarjáttan)	120
6.33.2.10	Landbúnaðarstuðul (Onnur játtan)	130
1.10.2.01	Landsgrannskoðanin (Rakstrarjáttan)	30
3.11.1.23	Landsins ognir (Rakstrarjáttan)	53
7.23.1.10	Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð (Rakstrarjáttan)	197
8.20.3.04	Landssjúkrahúsið (Rakstrarjáttan)	301
8.20.3.08	Landssjúkrahúsið, útbygging (Løgujáttan)	307
6.38.1.02	Landsverk (Rakstrarjáttan)	156
8.21.6.14	Lán til ellis- og røktarheim í Vági (Onnur játtan)	360
8.22.5.01	Lán til Húsalánsgrunnin (Onnur játtan)	375
6.37.6.01	Lánsafturgjald (Onnur játtan)	154
7.24.8.01	Lánsafturgjald (Onnur játtan)	283
8.20.5.01	Lánsafturgjald (Onnur játtan)	319
15.11.2.07	Lánsafturgjald (Onnur játtan)	377
15.30.3.01	Lánsafturgjald (Onnur játtan)	390
7.24.2.06	Leiklist (Rakstrarjáttan)	261
15.37.4.02	Lendisfyrisiting (Rakstrarjáttan)	393
7.23.7.04	Lestrarstudningur (Lógarbundin játtan)	252
5.34.1.07	Limagjald í altjóða felagsskapum (Onnur játtan)	90
7.24.3.22	Listasøvn (Rakstrarjáttan)	273
6.37.1.08	Loyvisnevndin (Rakstrarjáttan)	141
2.12.3.01	Løgmaður og landsstýrið (Rakstrarjáttan)	40
2.11.1.02	Løgmansskrivstovan (Rakstrarjáttan)	35
1.10.1.03	Løgtingsarbeiði (Rakstrarjáttan)	27
1.10.2.07	Løgtingsins umboðsmaður (Rakstrarjáttan)	32
3.18.3.04	Lønarforskot (Onnur játtan)	72
20.52.2.10	Lønhæddargjald (Onnur játtan)	416
5.34.1.10	Lønjavningarstovan (Rakstrarjáttan)	90
8.20.1.19	Læknakanningar av børnum (Lógarbundin játtan)	295
7.23.2.07	Læraraeftirlønir (Lógarbundin játtan)	215
7.23.6.13	Læraraskúlin (Rakstrarjáttan)	242
5.34.3.04	Magnus Heinason (Rakstrarjáttan)	99
7.24.1.07	Málnevndin (Rakstrarjáttan)	256
8.20.3.06	Medicoteknisk tól (Løgujáttan)	306
7.23.1.37	Meginfelag føroyskra studenta, MFS (Onnur játtan)	206
8.21.6.08	Meginskrivstovan fyri eldri og brekað (Rakstrarjáttan)	356
20.52.2.01	Meirvirðisgjald (Onnur játtan)	414
7.24.3.20	Menning av mentan og mentanararvi (Rakstrarjáttan)	273
2.13.3.04	Menningarhjálp (Onnur játtan)	48
6.37.1.01	Menningarstovan (Rakstrarjáttan)	136
7.11.1.09	Mentamálaráðið (Rakstrarjáttan)	189
7.24.2.04	Mentanargrunnurin (Onnur játtan)	260
7.23.3.05	Miðnámsútbúgvingar (Rakstrarjáttan)	216
7.23.5.10	Musikkskúlar (Rakstrarjáttan)	232
8.21.9.04	Námsfrøðingar í framhaldsútbúgving (Rakstrarjáttan)	373
15.30.1.07	Náttúrufriðingarnevndir (Rakstrarjáttan)	388

2.13.3.02	Neyðhjálp (Onnur játtan)	47
6.38.2.19	Norðoyatunnilin (Onnur játtan)	169
2.13.1.04	Norðurbryggjan í Keypmannahavn (Onnur játtan)	45
7.24.2.10	Norðurlandahúsið (Onnur játtan)	263
7.13.2.01	Norðurlandasamstarv, ráðharraráð (Rakstrarjáttan)	193
6.38.1.07	Nýggir landsvegir (Løgujáttan)	160
3.15.1.10	Nýggj fíggjarstýring (Rakstrarjáttan)	65
7.24.4.05	Nýggj tøkni - Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya (Løgujáttan)	276
1.10.1.10	Nýggjur bygningur til Føroya Løgtings (Løgujáttan)	30
5.34.2.02	Nýtt vaktarskip (Løgujáttan)	94
7.23.1.40	Næmingaheim (Onnur játtan)	206
7.24.1.10	Orðabókagerð (Onnur játtan)	256
56.38.2.52	P/F Atlantsflog, ráðgeving (Onnur játtan)	437
56.38.2.54	P/F Atlantsflog, søla av partabrøvum (Onnur játtan)	437
6.36.1.05	P/f Fiskaaling (Onnur játtan)	133
6.38.2.11	P/F Flogsamband (Onnur játtan)	168
53.15.1.21	P/F Føroya Banki, søla av partabrøvum (Onnur játtan)	433
56.37.1.28	P/F Føroya Lívstrygging, avhendan av partabrøvum (Onnur játtan)	435
56.37.1.30	P/F Føroya Lívstrygging, ráðgeving (Onnur játtan)	436
56.37.1.26	P/F Føroya Lívstrygging, søla av partabrøvum (Onnur játtan)	435
6.37.6.11	Partabrøv, ymsi viðurskifti (Onnur játtan)	155
6.38.3.15	Posteftirlit (Rakstrarjáttan)	173
6.38.3.01	Postverk Føroya (Landsfyritøka)	170
6.38.3.08	Postverk Føroya, eftirlønir (Lógarbundin játtan)	172
6.38.3.02	Postverk Føroya, umskipað til partafelag (Onnur játtan)	172
7.23.1.31	Prógtøkur (Rakstrarjáttan)	205
20.52.2.07	Punktgjøld (Onnur játtan)	416
8.21.3.18	Ráðgevandi toymi (Rakstrarjáttan)	339
8.21.1.19	Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark (Onnur játtan)	326
6.38.4.04	Ráðið fyri ferðslutrygd (Onnur játtan)	178
20.50.2.01	Rentuinntøkur av innistandandi (Onnur játtan)	404
20.50.1.01	Rentur at gjalda (Onnur játtan)	403
8.22.1.01	Rentustudningur til húsabygging (Lógarbundin játtan)	374
6.37.3.01	Rúsdrekkasøla landsins (Landsfyritøka)	147
7.24.3.09	Savnshús (Løgujáttan)	269
6.37.1.07	Sáttmálaeftirlit (Rakstrarjáttan)	140
3.11.1.36	Sáttmálaviðurskifti (Rakstrarjáttan)	55
6.39.1.01	Semingsmannaskipanin (Rakstrarjáttan)	182
2.13.1.01	Sendistovur (Rakstrarjáttan)	41
8.21.6.17	Serflutningsskipan landsins (Onnur játtan)	362
8.21.6.01	Serforsorg (Rakstrarjáttan)	344
7.23.2.02	Sernámsdepilin (Rakstrarjáttan)	209
8.20.3.20	Serviðgerð uttanlands (Rakstrarjáttan)	313
7.24.2.16	Sjónleikarhús (Onnur játtan)	264
5.35.1.01	Sjóvinnufyrisitingin (Skipaskrásetingin) (Rakstrarjáttan)	109
8.20.2.01	Sjúkrakassar (Onnur játtan)	296
5.34.4.04	Sjúkratrygd (Lógarbundin játtan)	102
5.35.1.02	Skipaeftirlitið (Rakstrarjáttan)	110
15.33.2.04	Skógrøkt landsins (Rakstrarjáttan)	391
6.37.1.18	Skráseting Føroya (Rakstrarjáttan)	143
20.52.2.19	Skrásetingargjald (Onnur játtan)	418
7.23.1.13	Skúlabókagerð (Rakstrarjáttan)	201
7.23.1.16	Skúlabókagrunnurin (Rakstrarjáttan)	201
7.23.3.09	Skúladepil í Marknagili (Løgujáttan)	228

7.23.3.06	Skúladepil í Suðuroy (Løgujáttan)	226
8.20.2.07	Skúlalæknaskipanin (Rakstrarjáttan)	298
7.23.2.05	Skúlatilboð til ung við breki (Løgujáttan)	214
7.23.2.06	Skúlatilboð til ung við breki (Rakstrarjáttan)	214
7.23.2.12	Skúlin á Trøðni (Løgujáttan)	216
15.30.1.10	Spilloljureinsing (Onnur játtan)	389
2.11.1.40	Stjórnarskipanarnevnd (Rakstrarjáttan)	38
25.60.1.07	Stovnan av grunnum (Onnur játtan)	429
15.38.2.01	Strandfaraskip landsins (Landsfyritøka)	397
15.38.2.02	Strandfaraskip landsins (Løgujáttan)	399
7.23.3.28	Studentaskúlin í Hoydølum (Løgujáttan)	230
8.21.6.11	Stuðlaskipanin (Rakstrarjáttan)	358
8.21.1.25	Studningur annars (Onnur játtan)	328
7.24.5.01	Studningur til Kirkjugrunnin (Onnur játtan)	279
7.23.3.14	Studningur til læruplàss (Lógarbundin játtan)	228
2.14.1.02	Studningur til politiskt virksemi og upplýsing (Onnur játtan)	49
8.21.1.22	Stuðul til feløg (Onnur játtan)	326
8.21.5.01	Stuðul til feløg hjá brekaðum (Onnur játtan)	342
8.21.5.04	Stuðul til feløg hjá eldri (Onnur játtan)	343
3.21.2.01	Stuðul til flutning og dupult húsarhald (Lógarbundin játtan)	73
7.23.2.03	Stuðul til fólkaskúlar (Onnur játtan)	213
7.24.4.10	Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari (Onnur játtan)	279
6.38.1.21	Stuðul til havnir (Onnur játtan)	167
6.38.1.18	Stuðul til infrakervið á útoyggjum (Onnur játtan)	166
8.21.3.02	Stuðul til rakstur til Barnaverndarstovuna (Onnur játtan)	329
3.22.4.01	Stuðul til rentuútreiðslur (Lógarbundin játtan)	75
15.30.1.01	Stuðul til umhvørvisverndartiltøk (Onnur játtan)	388
8.21.3.05	Stuðul til uppihaldspening (Lógarbundin játtan)	331
15.37.2.19	Stuðul til útoyggjamenning (Onnur játtan)	393
15.38.2.21	Stuðul til útoyggjar (Onnur játtan)	401
7.24.3.25	Stuðul til varðveiting av mentanararvi (Onnur játtan)	275
7.23.1.04	Stuðulsstovnurin (Rakstrarjáttan)	194
8.20.3.15	Suðuroyar sjúkrahús (Rakstrarjáttan)	311
5.11.1.45	Søla av bygningi hjá Fiskimálaráðnum (Løgujáttan)	83
8.20.3.05	Søla av íbúðarbygningum (Løgujáttan)	306
6.11.1.47	Søla av landsins ognum (Løgujáttan)	119
3.11.1.46	Søla av partabrøvum í P/F Elektron (Onnur játtan)	56
6.32.1.04	Søla av seismiskum kanningarúrslitum (Onnur játtan)	125
8.11.1.41	Talgild heilsuskipan (Rakstrarjáttan)	290
7.23.3.07	Tekniski skúli í Klaksvík (Løgujáttan)	227
8.21.1.10	Teknmálstulkatænastan (Onnur játtan)	325
5.34.4.37	Telefonstuðul til langfarafiskimenn (Lógarbundin játtan)	105
5.31.1.04	Tilbúgvingarætlan (Løgujáttan)	87
5.31.1.01	Tilbúgvingarsamskipanin (Rakstrarjáttan)	83
7.24.1.05	Tiltøk fyri børn og ung (Onnur játtan)	255
8.20.1.07	Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu (Onnur játtan)	292
15.37.4.03	Tinglýsingarstovan (Rakstrarjáttan)	395
3.15.1.05	Toll- og skattstova Føroya (Løgujáttan)	61
3.15.1.04	Toll- og skattstova Føroya (Rakstrarjáttan)	58
20.52.2.04	Tollavgjøld (Onnur játtan)	415
7.24.2.01	Tónleikur og sangur (Onnur játtan)	260
5.35.1.10	Trygdarmiðstøðin (Løgujáttan)	113
5.35.1.03	Trygdarmiðstøðin (Rakstrarjáttan)	112
6.37.1.21	Tryggingareftirlitið (Rakstrarjáttan)	144

15.33.2.05	Træplanting (Onnur játtan)	392
15.38.2.04	Tyrlutænastan (Rakstrarjáttan)	401
3.18.1.01	Tænastumannaeftirlønir (Lógarbundin játtan)	70
6.37.5.05	Umbygging av Heilsufrøðiligu starvsstovuni (Løgujáttan)	152
2.11.1.21	Umbygging í Tinganesi (Løgujáttan)	38
20.52.2.28	Umhvørvisavgjald á smyrjiolju (Onnur játtan)	420
15.30.1.15	Umhvørvisvernd (Rakstrarjáttan)	389
6.39.4.04	Umsiting av barsilsskipan (Rakstrarjáttan)	186
3.15.1.19	Umsiting av gjaldførislánum (Rakstrarjáttan)	67
7.24.2.05	Umsiting av Mentanargrunninum (Rakstrarjáttan)	261
3.15.1.23	Umsiting av ogn og skuld landsins (Rakstrarjáttan)	67
3.21.7.11	Umsiting av Trygdargrunninum (Rakstrarjáttan)	74
8.21.8.08	Umsorgararbeiði (Onnur játtan)	370
7.24.1.25	Ungdóms- og bygdarhús (Onnur játtan)	259
8.20.1.04	Upplýsing og ráðgeving (Rakstrarjáttan)	291
8.20.1.13	Upplýsing um gitnaðarfyribyrging (Lógarbundin játtan)	293
5.34.1.04	Upplýsing um grind (Rakstrarjáttan)	88
8.20.2.05	Útbúgving av yngri læknum (Rakstrarjáttan)	297
5.34.3.05	Útgerð til Magnus Heinason (Løgujáttan)	100
7.23.1.11	Útgerð til yrkisskúlar og hægri útbúgvingar (Rakstrarjáttan)	199
3.21.7.10	Útgjald úr Trygdargrunninum (Lógarbundin játtan)	73
20.50.2.10	Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank (Onnur játtan)	406
20.50.2.07	Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya (Onnur játtan)	405
5.34.5.01	Útlán (Onnur játtan)	106
20.52.3.04	Útluting frá almennum partafeløgum (Onnur játtan)	421
20.52.3.01	Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 (Onnur játtan)	420
25.64.1.01	Útvegan av gjaldføri (Onnur játtan)	431
8.21.7.01	Vanlig forsorg (Lógarbundin játtan)	364
20.52.1.01	Vanligur landsskattur (Onnur játtan)	407
6.21.1.13	Vanlukkutryggingarráðið (Rakstrarjáttan)	121
8.21.6.13	Vardar íbúðir, rakstrarstudningur (Onnur játtan)	360
7.24.5.03	Varðveiting av mentanarvirðum (Onnur játtan)	280
20.52.2.22	Vegskattur (Vektgjald) (Onnur játtan)	419
8.21.8.13	Viðbót til ávísar pensjónistar (Lógarbundin játtan)	372
8.20.4.03	Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið (Rakstrarjáttan)	318
8.20.4.02	Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (Rakstrarjáttan)	317
2.11.1.12	Viðlíkahald (Rakstrarjáttan)	37
3.11.1.13	Viðlíkahald (Rakstrarjáttan)	53
5.11.1.15	Viðlíkahald (Rakstrarjáttan)	81
6.11.1.16	Viðlíkahald (Rakstrarjáttan)	118
7.11.1.14	Viðlíkahald (Rakstrarjáttan)	191
8.11.1.18	Viðlíkahald (Rakstrarjáttan)	288
6.37.2.02	Vinnuframagrunnurin (Onnur játtan)	145
6.37.1.03	Vinnuframastovan (Rakstrarjáttan)	137
7.23.6.06	Vinnuháskúlin (Løgujáttan)	239
7.23.6.05	Vinnuháskúlin (Rakstrarjáttan)	236
6.11.1.06	Vinnumálaráðið (Rakstrarjáttan)	116
8.11.1.33	Vísindasiðseminevndin (Rakstrarjáttan)	288
7.23.6.23	Ymiskar verkætlanir (Rakstrarjáttan)	251
7.24.1.13	Ymiskir studningar (Onnur játtan)	257
7.23.1.07	Ymsar felagsútreiðslur (Rakstrarjáttan)	196
15.14.1.01	Ymsar útreiðslur (Rakstrarjáttan)	378
7.24.5.06	Yvirtøka av prestagørðum (Løgujáttan)	281
8.21.3.13	Ættleiðingarstuðul (Lógarbundin játtan)	338